# Økismenningarálitið

Økismenningarnevndin

Mentamálastýrið
2001

Økismenningarnevndin: Økismenning í Føroyum

# Fororð

# Samandráttur

# Samandráttur

# Demografi og trivnaðarfyritreytir

Í hesum partinum verður gjørd ein lýsing av viðurskiftum viðvíkjandi fólkatalsfrøði (demografi) og trivnaðinum fyri hvørt øki í landinum. Galdandi fyri bæði hesi hugtøk er, at tey geva eina lýsing av viðurskiftum, ið hava beinleiðis ávirkan á fólkatalið og fólkatalsgrundarlagið í einum øki. Harumframt eru hesi hugtøk ein týdningarmikil partur av lýsingini av menningarfyritreytunum í økinum.

Tá ein lýsing av hesum viðurskiftum verður gjørd fyri hvørt økið sær, er tað áhugavert at samanbera, hvørjar trupul-leikar økini hava – til tess at fáa eina mynd av, hvørjum avbjóðingum økini standa fyri í næstu framtíð.

Heildarmyndin er tann, at nøkur øki standa fyri avbjóðingum, sum koma av "negativari gongd", og onnur øki standa fyri avbjóðingum sum koma av "ov skjótari positivari gongd".

**Suðuroy** hevur trupulleikar av eini negativari gongd í fólkatali orsakað av vantandi burðaravlopi og fráflyting - og eini 'skeivari' samanseting av alders- og kynsbýtinum. Suðuroy er tað økið í landinum, sum varð harðast rakt av búskaparkreppuni - og er gongdin í økinum enn merkt av hesum. Trivnaðarfyritreytirnar í økinum tykjast hinvegin vera í lagi.

**Sandoyar sýsla** hevur havt trupulleikar av gongdini í fólkatalinum og hevur framhaldandi negativt burðaravlop, men gongdin er vend orsakað av eini lítlari tilflyting. Eins og í Suðuroy eru ávísir trupulleikar av eini ' skeivari' alders- og kynssamanseting - og stendst hetta av, at Sandoy eisini var millum tey harðast raktu av búskaparkreppuni. Trivnaðarfyritreytirnar í Sandoy halta í stóran mun, tá økið verður samanborið við restina av landinum.

**Vága sýsla** hevur seinastu árini verið fyri eini lítlari framgongd, hvat fólkatali viðvíkur, tó tykjast trupulleikar vera av lutfalsliga smáum árgangum av kvinnum í aldursbólkunum 20 - 29 ár og 30 - 39 ár. Viðvíkjandi trivnaðar-fyritreytum, so eru ávísir veikleikar. Um stutta tíð fara Vágar at verða merktar av stórum broytingum orsakað av fasta sambandinum um Vestmannasund.

**Streymoy annars** hevur í stóran mun verið merkt av teirri positivu gongdini í og kring Tórshavn - og er hetta eisini sjónligt í gongdini í fólkatalinum. Størsta avbjóðingin í økinum tykist vera at skapa góðar karmar um trivnaðin, so at økið í ein ávísan mun kann gerast eitt bústaðarøki fyri vakstrarøkini.

**Suður-Eysturoy** hevur verið fyri stórari menning seinastu árini - og kann av røttum kallast eitt 'vakstrarøki' - og er hendan menning eisini vorðin sjónlig í fólkatalinum og í alders- og kynssamanseting. Størsta avbjóðingin hjá økinum er at kunna skapa góðar trivnaðarkarmar, ið nøkta tørvin, sum stóri vøksturin førir við sær.

**Norður-Eysturoy** hevur í ein ávísan mun fingið lut í vøkstrinum í Suður-Eysturoy og í Tórshavnarøkinum, við tað at økið virkar sum uppland fyri 'vakstrarøkini' - og er hesin vøkstur eisini sjónligur í gongdini í fólkatalinum. Sum ein partur av Eysturoy, hevur økið í stóran mun somu tilboð og somu avbjóðingar sum Suður-Eysturoy.

**Norðoyggjar annars** hava hvat fólkatali viðvíkur ikki verið stórvegis ávirkaðar av gongdini í Føroyum sum heild - og verður hetta eisini greitt, tá positiva gongdin í fólkatalinum seinastu 15 árini verður sammett við gongdina í hinum pørtunum av landinum. Hvat trivnaðarfyritreytum viðvíkur, so eru so at siga øll tilboð í Norðoyggjum sum heild í Klaksvík, og setur hetta avmarkingar fyri fólk í Svínoy, Fugloy og Kalsoy orsakað av vánaliga undirstøðukervinum (infrastrukturinum).

**Klaksvíkarøkið** hevur seinastu árini verið fyri eini stórari menning, tó at økið varð hart rakt av búskaparkreppuni. Gongdin í fólkatalinum er eisini tongd at hesi menning - og er hendan menning eisini sjónlig í alders- og kynssamansetingini. Størsta avbjóðingin hjá økinum er at kunna skapa góðar trivnaðarkarmar, ið nøkta tørvin, sum stóri vøksturin førir við sær.

# Fólkatalsfrøði (demografi) og trivnaðarfyritreytir

Hugtakið *demografi* er grikskt og merkir lýsing av viðurskiftum viðvíkjandi fólkatalinum. Tá ið *trivnaðarfyritreytirnar* verða viðgjørdar, verður givin ein mynd av, hvørji almenn- og kommunal tænastutilboð og mentanar- og frítíðartilboð eru í einum øki, hvussu hesi viðurskifti eru skipað – og hvørja ávirkan tey hava á, hvussu fólk støðast í einum øki.

## Alment um fólkatalsfrøði

Fólkatalsfrøði sigur nakað um fólkatal, broytingar í fólkatali, og um hvussu fólkatalið er býtt eftir økjum – harumframt eisini um alдurs- og kynssamanseting o.a. Fólkatalsfrøði verður brúkt til at lýsa fólkatalsgrundarlagið í einum samfelag, í einum øki – og verður eisini brúkt, tá ein lýsing verður gjørd av, hvørjir menningarmøguleikar eru í økinum, hvat fólkatali viðvíkur. Orsøkin til at fólkatalsfrøði hevur týdning fyri menningarmøguleikarnar í einum øki er, at bæði tørvur og arbeiðsorka hjá fólki broytist við aldrinum. Greitt er harumframt, at tørvurin á barnaansing, skúlum, frítíðartilboðum, arbeiðsplássum, bústøðum, heilsu- og eldrarøkt er neyvt tongdur at, hvussu aldurbýtið er í økinum.

Vit brúka aldurspyramidur til at lýsa, hvussu kyns- og aldurssamansetingin er fyri hvørt økið sær. Tað hevur týdning fyri eitt og hvørt øki, at ein munandi partur av fólkinum er í vinnuførum aldri, og harafturat at javnvág er millum tann vinnuføra partin av fólkinum og partin av fólkinum, ið er børn og eldri. Um ov fá eru í vinnuførum aldri, so kann hetta skapa trupulleikar fyri vinnulívið orsakað av vantandi arbeiðsmegi. Um ov fá eru í burðarbúnum aldri, so eru ov fá at bera byrðarnar, og kann hetta skapa eina ónda ringrás, har færri og færri børn verða fødd, við greiðum avleiðingum fyri fólkatalsgrundarlagið í økinum. Um ov stórur partur av fólkinum er eldri, so setir hetta størri krøv til eldra- og heilsurøktina í økinum.

Fyri at fáa eina ábending um, um kyns- og aldursbýtið í einum øki er ”gott” ella ”ringt”, samanbera vit við aðrar aldurspyramidur, sum kunnu sigast vera eitt slag av idealum. Eitt ”vanligt” vakstrarøki í landinum verður oftast brúkt sum eitt ideal – í hesum føri Suður-Eysturoy – og verða aldurspyramidurnar fyri hinar partarnir av landinum so samanbornar við hetta vakstrarøkið.

Týdningarmikið fyri valda idealið er, at viðurskiftini í økinum ikki eru óvanlig, t.e. at hetta økið í prinsippinum kundi verið eitt og hvørt annað øki í landinum. Í Føroyum eru tvey vakstrarøki, ið víkja nógv frá hinum økjunum, og eru tey Tórshavn og Suður-Eysturoy. Men Tórshavn er sum so ikki eitt ”vanligt” vakstrarøki orsakað av, at øll landsumsiting er í Tórshavn, samstundis sum flestu størri stovnar og privat feløg eisini hava høvuðssæti har. Suður-Eysturoy kann hinvegin sigast vera eitt ”vanligt” vakstrarøki við eini vanligari vinnusamanseting, sum í prinsippinum kundi verið í einum og hvørjum øki í Føroyum – og tí verður hetta økið brúkt til samanberingar í álitinum.

Í stuttum kann sigast, at aldurspyramidan fyri Suður-Eysturoy (sí partin um Suður-Eysturoy), hevur skap sum eitt jólatræ, t.e. at tyngdin í aldurspyramiduni er í teimum yngru aldursbólkunum. Í álitinum verður alddurs- og kynsbýtið í Suður-Eysturoy brúkt sum ’ideal-typa’, sum hini økini í stuttum verða sammett við.

Í partinum um fólkatalsfrøði verða eisini gjørdar framrokningar av fólkatalinum í hvørjum einstøkum øki fyri tey næstu 25 árini. Hetta gevur eina mynd av, hvussu gongdin í fólkatalinum undir ávísum fyritreytum kann blíva í komandi tíðum.

## Alment um trivnaðarfyritreytir

Mynstrið í øllum samfeløgum og eisini í føroyska samfelagnum er blivið soleiðis, at fólk í øllum aldri hava alsamt størri tørv á almennum tænastuveitingum – ein av orsøkunum er, at tað í nógvum førum er neyðugt við tveimum lønum til at kunna lívbjarga sær og sínum. Hetta førir við sær ein tørv á ansingarplássum til børn og ung. Og um eitt øki í mun til annað ikki hevur hesa tænastuveiting, kann hetta føra til, at økið verður vrakað sum bústaðarøki. At henda tænastuveiting stendur í boði kann gerast avgerandi, tí barnafamiljan er ofta tann mest flytbæra (mobila) familjan.
Støðan á heilsuøkinum hevur eisini avgerandi týdning fyri búlíkindini í einum øki. Tað er alneyðugt, at veitingar á heilsuøkinum eru á so høgum stigi, at tann einstaki og familjan kenna seg trygg.
Harumframt hava veitingar á eldraøkinum eisini sín týdning. Fyrst og fremst fyri tey, ið eru í og nærkast pensiónsaldri – men hetta hevur eisini týdning fyri yngri fólk, ið ikki hava orku til at passa tey gomlu, ið tey annars moralskt kenna seg noydd at passa. Samstundis hevur hetta eisini týdning fyri tey sjálv, tá ið tey hugsa um egnan aldurdóm.

Almanna og kommunala tænastustigið fær tí alsamt størri týdning fyri menningarmøgu-leikarnar í einum øki. Hesar tænastur eru grundarlagið undir trivnaðarfyritreytunum í økinum og spæla ein ávísan leiklut, tá støða skal takast til, hvar í landinum ein velur at búseta seg. Og tann aktuella búsetingin hevur ávirkan á, hvat slag av vinnu kann mennast í einum ávísum øki.

Tað er ofta trupult at mála almanna- og kommunala tænastustigið í einum øki ella at seta tøl á - og tað verður heldur ikki gjørt her. Men fyri at fáa eina rímuliga ábending um, hvussu trivnaðar-fyritreytirnar eru í einum øki, verður hugt at hvørji skipað almenn og kommunal tilboð eru í økinum, og hvørjum stigi hesi tilboð eru á. Ein lýsing av trivnaðarfyritreytunum verður býtt sundur í hesi øki:

- Barnaansing
- Heilsurøkt

- Eldraøkið og hjálpartænastur annars

**Hesi øki verða so aftur býtt sundur, sum í talvuni niðanfyri.**

| **Barnaansing** | **Heilsurøkt** | **Eldraøkið og hjálpartænastur annars** |
|---|---|---|
| o Vøggustovur | o Sjúkrahús | o Ellisheim |
| o Barnagarðar | o Heilsumiðstøð | o Røktarheim |
| o Dagrøktarskipan | o Kommunlæknar | o Eldrasambýli |
| | o Heilsusystur | o Umlættingarheim |
| | o Skúlaheilsusystur | o Heimarøkt |
| | o Tannlæknar | o Sambýli |
| | o Ljósmóðir | o Vardir verkstaðir |
| | o Fysioterapi | o Dagtilhald |
| | o Onnur serviðgerð | |

*Talva 1. Lýsing av trivnaðarfyritreytum*

Her er ein vegleiðing til, hvat litirnir - ávikavist grønt, gult og reytt - standa fyri í støðulýsingini av almanna-, heilsu- og ansingarøkjunum. Hóast tað ikki altíð ber til beinleiðis at samanbera mentan og frítíð við almanna- og heilsuøkið, loyva vit okkum at brúka sama býti í báðum førum.

- **Grønt**:
  1) tilboðið er í økinum,
  2) nøktandi karmar (t.e. øki, hølisviðurskifti o.t.) eru til taks,
  3) skikkað fyristøðufólk (leiðsla) er,
  4) um borgari ætlar sær at brúka tilboðið, er lítil og eingin bíðitíð í hesum sambandi,
  5) beinleiðis bíðilistar eru ikki.

- Gult:
  1) tilboðið er í økinum,
  2) karmar eru, men hesir kunnu ikki metast sum heilt nøktandi,
  3) skikkað fólk stendur fyri tilboðnum, men støðan er neyvt tongd at einstaklingum,
  4) tá ið borgari ætlar sær at brúka tilboðið, er heldur long tíð, áðrenn viðkomandi sleppur til,
  5) beinleiðis bíðilistar eru møguliga eisini.

- **Reytt**:
    1) tilboðið er í økinum,
    2) nøktandi karmar eru als ikki,
    3) mett verður ikki at skikkað fólk stendur fyri tilboðnum,
    4) tá ið borgari ætlar sær at brúka tilboðið, gongur altíð long tíð, áðrenn viðkomandi sleppur framat,
    5) beinleiðis bíðilistar eru helst eisini.

- tilboðið er ikki í økinum.

Mentanar- og frítíðarvirksemi sigur nakað um, hvørji frítíðartilboð eru til bæði vaksin, ung og børn í einum øki. Ov fá tilboð hava ávirkan, tá ein skal gera upp, um tað er áhugavert at búseta seg í einum øki, og er hetta tí eisini við til at ávirka gongdina í fólkatalinum. Parturin um mentanar- og frítíðarvirksemi er sum nevnt uppbygdur á sama hátt sum parturin um almanna- og heilsumál, og vil tað siga, at gjørd verður ein lýsing av, hvørji tilboð eru í økinum.
Mentanar- og frítíðartilboð kunnu býtast sundur í:

- Ítrótt
- Mentanar- og frítíðarfeløg
- Onnur frítíðartilboð

*Viðmerkingar til býtið í øki í sambandi við viðgerð av trivnaðarfyritreytunum*
Í viðgerðini av trivnaðarfyritreytunum verða økini býtt sundur soleiðis, at Eysturoy og Norðoyggjar verða viðgjørdar undir einum – og ikki sum Norður-Eysturoy og Suður-Eysturoy; og Klaksvíkarøkið og 'Norðoyggjar annars'. Hetta kemst av, at tilboðini í hesum økjum í ein ávísan mun kunnu brúkast av fólki úr øllum økinum, hetta serliga galdandi fyri Eysturoyarøkið. Viðvíkjandi Norðoyggjum er at siga, at økini uttan fyri Klaksvíkarøkið eru so lítil, at tilboðini í ein ávísan ikki hava fólkagrundarlag til at vera í teimum smáu plássunum.

# Føroyar

Á komandi síðum verða gjørdar ein fólkatalsfrøðilig lýsing og ein lýsing av trivnaðinum í hvørjum øki í landinum sær – fyrst verður tó gjørd ein fólkatalsfrøðilig lýsing av Føroyum sum heild.

Tá tosað verður um fólkatalsbroytingar í Føroyum sum heild seinastu 10 árini, er greitt, at kreppan fyrst í nítiárunum hevur havt stóra ávirkan á fólkatal, til- og fráflytingar og á aldurssamansetingina í Føroyum.

Við árslok 1999 vóru 45.409 fólk í Føroyum, 21.907 kvinnur og 23.502, t.e. at uml. 48 % vóru kvinnur og 52 % menn, og er hetta øvugt av býtinum í londunum kring okkum, har tað eru fleiri kvinnur enn menn. Sæð í mun til fólkatalið í 1989, tá 47.787 fólk búðu í Føroyum, so var fólkatalið við árslok 1999 4 % lægri enn í 1989. Gongdin í fólkatalinum í Føroyum síðan 1985 hevur annars verið sum víst á myndini niðanfyri – og er aldurs- og kynssamansetingin 1999 somuleiðis víst niðanfyri.







*Mynd 1. Fólkatal 1985 - 31. okt. 2000 og aldurspyramidur fyri Føroyar 1989 og 1999 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í tíðini eftir 1995 hevur gingið betur í Føroyum búskaparliga, og sæst hetta eisini á broytingini í fólkatalinum, tó at broytingin er ymisk frá einum øki til annað. Í summum økjum er fólkatalið hægri enn í 1985, onnur øki nærkast sama fólkatali, men nøkur øki tykjast hava stabililserað seg á einum væl lægri stigi enn í 1985. Myndin niðanfyri sýnir prosentvísu broytingina í fólkatalinum í mun til 1985 eftir landspørtum.




*Mynd 2. Prosentvís broyting í fólkatalinum í landspørtum í mun til fólkatalið í 1985 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein høvuðsorsøk til hesa gongd er, at økini í Føroyum hava ment seg ymiskt eftir búskaparkreppuna, og hevur hetta m.a. ført við sær, at til- og fráflyting hevur verið ymisk, samstundis sum kreppan hevur havt eina ávirkan á føðitíttleikan í økjunum.

## Framrokningar av fólkatalinum

Við at gera framrokningar av fólkatalinum, fæst ein mynd av, hvussu fólkagrundarlagið í landinum sum heild og í teimum ymisku økjunum kann verða í næstu framtíð. Tílíkar framrokningar eru í høvuðsheitum grundaðar á trý viðurskifti, á trý hugtøk:

- Føðitíttleika
- Deyðstíttleika
- Til- og fráflyting

*Føðitíttleiki*

Føðitíttleikin verður gjørdur upp sum *livandi fødd børn pr. 1.000 kvinnur í burðarbúnum aldri*, t.e. livandi fødd børn pr. 1.000 kvinnur í aldrinum 15–49 ár. Hetta verður eisini nevnt *føðitíttleiki eftir móður aldri* ella *føðikvotienturin*. Samanlagdi føðikvotienturin er grundaður á føðikvotientin fyri hvønn 5 ára aldursbólk av kvinnum í aldrinum 15–49 ár. Samanlagdi føðikvotienturin er eitt mát fyri fruktbærið í fólkinum. Hetta eru tey børn, fødd á lívi, sum 1.000 konufólk í aldrinum 15 - 49 ár seta í heim, um so er:

1. at tær í hvørjum aldursbólki føða júst so nógv børn, sum aldursbýttu føðitíttleikatølini fyri árið siga, og
2. at eingin teirra doyr fyri 50 ára føðingardagin

Í 1999 var samanlagdi føðitíttleikin 2.329 – og sigur hetta, at tá hesin ættarliður av 1.000 konufólk, sum í 1999 vóru 15–49 ára gamlar, allar eru farnar av barnburði, hava tær sett í heim ein nýggjan ættarlið, sum í tali er 2.329 gentur og dreingir, treytað av 1. og 2. omanfyri.

*Deyðstíttleiki*
Deyðstíttleiki verður uppgjørdur sum tal á deyðum fyri hvørji 1.000 fólk. Deyðstíttleikin kann gerast upp í mun til samlaða fólkatalið ella í mun til hvørji 1.000 fólk í 5 ára aldursbólkum. Tá deyðstíttleikin verður uppgjørdur í aldursbólkar, sæst, at deyðstíttleikin er hægstur í teimum elstu aldursbólkunum – og er deyðstíttleikin tí greitt tongdur at aldursbýtinum í samfelagnum.

Um eingin til- ella fráflyting er til og úr Føroyum, so var ein vøkstur ella eitt fall í fólkatalinum í Føroyum einans tongt at burðaravlopinum, tongt at muninum á føðitíttleikanum og deyðstítt-leikanum.

*Burðaravlop*
Munurin á føðitíttleika og deyðstíttleika verður nevndur burðaravlop. Í 1999 vórðu 627 børn fødd á lívi í Føroyum, 403 fólk doyðu, og var burðaravlopið í 1999 sostatt: 627–403=224.
*Til- og fráflyting*
Hugtakið til- og fráflyting sigur nakað um til- og fráflytingar millum øki í landinum og um til- og fráflyting millum Føroyar og útheimin. Búskaparstøðan í landinum sum heild hevur eina greiða ávirkan á, um fólk flyta av landinum ella aftur til lands – hetta var eisini støðan í fyrri helvt av 1990-árunum, tá Føroyar vóru í svárari búskaparligari kreppu. Búskaparstøðan í teimum ymisku kjunum hevur eisini eina greiða ávirkan á, hvagar fólk flyta innlendis, og um flutt verður millum øki í landinum. Hetta hevur eisini verið støðan seinastu árini, at fólk serliga eru flutt til miðstaðarøkið og til syðra part av Eysturoy.

Vinnuliga menningin hevur sostatt stóran týdning fyri, at ein vøkstur verður í fólkatalinum – tí hon er avgerandi fyri, um fólk kunnu vinna lívsins uppihald á staðnum.

## Framrokningar og fyrivarni
Lagt eigur at verða til merkis, at framrokningar sum so *bara* eru útrokningar av, hvussu nógv fólk verða í einum øki komandi árini út frá nøkrum frammanundan fastløgdum fyritreytum. Hesar fyritreytir eru grundaðar á søgulig tøl, t.d. á burðaravlop og til- og fráflyting tey seinastu árini, og eru hesi tøl so grundarlag undir framrokningunum.

Veikleikin við framrokningum er, at tær ikki leggja upp fyri, at stórar vinnuligar broytingar kunnu fara fram. Til dømis verður ikki lagt upp fyri, at stórar íløgur møguliga verða gjørdar í vinnulívið í komandi árum, ella at eitt stórt arbeiðspláss verður stongt í næstu framtíð. Greitt er, at stórar broytingar í vinnusamansetingini í einum øki hava ávirkan á gongdina í fólkatalinum í økinum, og tí skulu tílíkar framrokningar takast við fyrivarni, ikki minst tá roknað verður 25 ár fram.

Framrokningar geva tó eina greiða mynd av, hvussu gongdin í fólkatalinum verður, um viðurskiftini í økinum ikki broytast, t.e. um viðurskifti viðvíkjandi burðaravlopi og til- og fráflyting verða sum seinastu árini ella sagt øðrvísi, at tey verða sum víst á í fyritreytunum, sum eru grundarlag undir framrokningunum.

*Gongdin í fólkatalinum í Føroyum næstu 25 árini*

Hagstova Føroya hevur gjørt framrokningar fyri, hvussu gongdin í fólkatalinum í Føroyum *kann* blíva komandi 25 árini. Hesar framrokningar eru grundaðar á, hvussu gongdin í fólkatalinum í teimum ymisku økjunum í landinum væntandi verður.

Støðið undir hesum metingum er burðaravlopið og til- og fráflytingin seinastu árini – samstundis sum búskaparliga gongdin í landinum sum heild er tikin inn í myndina[i]. Gongdin í fólkatalinum í øllum økjum í landinum verður sostatt eisini ávirkað av hesum – og merkir hetta til dømis, at væntað verður, at gongdin i fólkatalinum í Suðuroy broytist frá einum falli seinastu árini til ein vøkstur í komandi árum. Við øðrum orðum verður væntað, at allar Føroyar í ein ávísan mun koma at merkja til búskaparligu framgongdina, tó at hendan framgongd fer at merkjast ymiskt frá øki til øki.

Hagstova Føroya hevur framroknað, at tað koma at búgva fleiri enn 57.000 fólk í Føroyum í 2024 og er hetta umleið 26 % fleiri enn fólkatalið við árslok 1999. Fyri summi øki merkir hendan gongd, at fólkatalið í 2024 verður væl hægri enn fólkatalið í 1985, men at onnur økið, serliga Sandoy og Suðuroy, als ikki koma at náa sama stig sum í 1985[ii].

| | 1985 | 1999 | 2004 | 2009 | 2014 | 2019 | 2024 | %-vøktur 1999-2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Klaksvíkarøkið** | 5.314 | 5.122 | 5.472 | 5.820 | 6.166 | 6.486 | 6.762 | **32,0 %** |
| **Norðoyggjar annars** | 625 | 691 | 714 | 739 | 762 | 793 | 833 | **20,6 %** |
| **Norður-Eysturoy** | 1.613 | 1.562 | 1.613 | 1.671 | 1.741 | 1.819 | 1.888 | **20,8 %** |
| **Suður-Eysturoy** | 8.487 | 8.434 | 9.037 | 9.633 | 10.186 | 10.683 | 11.143 | **32,1 %** |
| **Tórshavn** | 14.970 | 16.477 | 17.799 | 18.961 | 19.979 | 20.843 | 21.565 | **30,9 %** |
| **Streymoy annars** | 4.162 | 4.087 | 4.298 | 4.522 | 4.761 | 4.995 | 5.193 | **27,1 %** |
| **Vága sýsla** | 2.958 | 2.617 | 2.676 | 2.746 | 2.839 | 2.948 | 3.050 | **16,5 %** |
| **Sandoyar sýsla** | 1.751 | 1.448 | 1.441 | 1.446 | 1.470 | 1.502 | 1.524 | **5,2 %** |
| **Suðuroy** | 5.869 | 4.971 | 4.998 | 5.027 | 5.079 | 5.155 | 5.225 | **5,1 %** |
| **Allar Føroyar** | **45.749** | **45.409** | **48.047** | **50.565** | **52.984** | **55.223** | **57.181** | **25,9 %** |

*Talva 2. Framrokning av fólkatalinum í Føroyum til 2024, við støði í fólkatalinum 1999 (Kelda: Hagstova Føroya 2000)*

Eins og víst verður í talvu 2, veksur fólkatalið í Føroyum sum heild væntandi við umleið 26 % komandi 25 árini. Í Tórshavn, Suður-Eysturoy og í Klaksvíkarøki veksur fólkatalið væntandi við fleiri enn 30 %, meðan fólkatalið í Suðuroy og Sandoy væntandi veksur við umleið 5 %.

# Suðuroy

Suðuroy verður í summum førum býtt sundur í norðaru og sunnaru helvt, og kemst hetta einamest av, at tey stóru plássini, Tvøroyri og Vágur, hava verið miðdeplar fyri menningini í hvør sínum parti av oynni. Hetta er tó serliga galdandi fyri sunnaru helvt í Suðuroy, meðan Hvalba hevur átt greiðan lut í vinnumenningini í norðaru helvt. Tað er eisini serliga í vinnupartinum, at nøkur viðurskifti gera seg galdandi, sum gera, at oyggin má býtast í tvey, tá ið hesi viðurskifti skulu viðgerast.

Hagtalsliga verður Suðuroy eisini býtt sundur í tvey, hóast hetta ofta kann tykjast heldur óneyðugt, tí tað er neyvan nakað serfyribrygdi, at t.d. búskapargongdin er ymisk í ymiskum støðum, í einum øki ella oyggj; hetta serliga tá ið hugsað verður um, at karmar og fyritreytir fyri búskapargongdina kunnu vera heilt ymisk fyri ymiskar bygdir í sama øki/oyggj (t.d. viðv. bygdunum á ávikavist eystara og vestara armi á Skálafirði). Yvirhøvur eigur Suðuroy tó at verða viðgjørd sum ein eind, og verður hetta eisini meginreglan í viðgerðini í hesum áliti, tó at summi viðurskifti gera eitt sundurbýti náttúrligt.

## Fólkatalsfrøði

Í Suðuroy búðu við árslok 1999 4.971 fólk, og svarar hetta til uml. 11 % av fólkinum í Føroyum. Í 1950 búðu 19,5 % av fólkinum í Føroyum í Suðuroy. Í Suðuroy eru 7 kommunur, sum eru rættiliga ymiskar til støddar. Við árslok 1999 búðu 116 fólk í tí minstu kommununi og 1787 fólk í tí størstu – sí talvu niðanfyri.

**Fólkatalið og kynsbýtið í kommununum í Suðuroy 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Hvalbiar[i] | 440 | 341 | 781 |
| Tvøroyrar[ii] | 910 | 877 | 1.787 |
| Fámjins | 64 | 52 | 116 |
| Hovs | 65 | 56 | 121 |
| Porkeris | 188 | 170 | 358 |
| Vágs[iii] | 716 | 689 | 1.405 |
| Sumbiar[iv] | 219 | 184 | 403 |
| **Tilsamans** | **2.602** | **2.369** | **4.971** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Suðuroy er einasta øki í landinum, har gongdin í fólkatalinum ikki er vend eftir búskaparkreppuna. Fólkatalið minkar framhaldandi og er seinastu 15 árini minkað við fleiri enn 15 %.

Á fyrsta sinni síðan í fyrru hálvu av 20-árunum var fólkatalið í Suðuroy við árlok 1999 komið niður undir 5.000 fólk. Harumframt var Suðuroy einasta øki í landinum, har fólkatalið minkaði teir fyrstu 10 mánaðirnar í 2000. Staðfestast kann tí, at Suðuroy er tað økið í landinum, sum hevur størstu trupulleikarnir av búskaparkreppuni!







*Mynd 3. Gongdin í fólkatalinum í Suðuroy 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein av høvuðsorsøkunum til hesa gongd er, at arbeiðsloysið hevur verið stórt í Suðuroy øll 90- árini, samstundis sum arbeiðið innan fiskivinnuna á landi hevur verið óstøðugt í oynni.

## Aldurs- og kynssamanseting

Hvat aldurs- og kynssamanseting viðvíkur, so eru avleiðingarnar av minkingini í fólkatalinum heilt greiðar. Heilt stórar broytingar eru farnar fram í aldurs- og kynssamansetingini í Suðuroy seinastu 10 árini.

Við árslok 1999 búðu 874 fólk færri í Suðuroy enn við árslok í 1989, og kemur hendan minking serliga av fráflyting – harumframt hevur ein lágur føðitíttleiki seinastu árini eisini havt sína greiðu ávirkan. Størsti trupulleikin við hesari gongd er, at tað serliga eru ung fólk, ið flyta. Sum sagt minkaði fólkatalið frá 1989 til 1999 við 874 fólkum, og í aldursbólkinum 20 ár og yngri vóru 445 fólk færri. Í mun til 1989 vóru við árlok í 1999 813 fólk færri í aldrinum 40 ár og yngri, sí aldurpyramidu fyri Suðuroy.




Um aldurspyramidan fyri Suðuroy verður sammett við idealtypuna (Suður- Eysturoy), er ein høvuðsmunur: Tyngdin í pyramiduni er í miðjuni, í mun til í niðara partinum av pyramiduni í idealtypuni. Tað vil siga, at aldursbólkarnir yngri enn 30 ár eru væl minni enn í idealtypuni.

*Mynd 4. Aldurspyramidur fyri Suðuroy 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein stórur partur av hesari minking var í talinum á kvinnum. Talið á kvinnum, ið eru yngri enn 40 ár, minkaði við 416 í árunum 1989 til 1999. Talið á kvinnum í burðarbúnum aldri er somuleiðis minkað munandi – og vóru við árslok 1999 213 kvinnur færri í burðarbúnum aldri enn við árslok í 1989. Hetta hevur sjálvsagt eina greiða ávirkan á føðitíttleikan í Suðuroy. Trupulleikin er harumframt, at talið á kvinnum yngri enn 20 ár er minkað munandi, og kann hetta fáa álvarsamar avleiðingar fyri føðitíttleikan í framtíðini – ikki minst tá tikið verður inn í myndina, at ein partur av hesum kvinnum mugu flyta úr Suðuroy til tess at nema sær útbúgving.

Hóast fólkatalið í Føroyum sum heild er vaksið gott og væl 6 % í tíðarskeiðinum 1995 til 31. oktober 2000, so er fólkatalið í Suðuroy *minkað* meira enn 2,5 % í sama tíðarskeiði. Gongdin í fólkatalinum í Føroyum sum heild hevur sostatt ikki sligið ígjøgnum í Suðuroy enn. Orsakirnar til hetta eru fyrst og fremst tann lági føðitíttleikin í Suðuroy tey seinastu árini, og at fráflytingin úr Suðuroy ikki rættiliga er steðgað enn, hóast hon er minkað nakað seinastu tvey árini.

*Lágur føðitíttleiki*

Fólkatalið í Suðuroy er á leið tað sama  sum í Klaksvík. 31. oktober 2000 búðu 4.959 fólk í Suðuroy og 5.213 í Klaksvík – men hóast hetta er munur á talinum á børnum, ið verða fødd, stórur. Fram til 31. oktober 2000 vórðu 35 børn fødd í Suðuroy, meðan 73 børn vórðu fødd í Klaksvík. Í 1999 vórðu tilsamans 39 børn fødd í Suðuroy, meðan 93 børn vórðu fødd í Klaksvík.

Í Suðuroy er tað serliga í syðru helvt, at føðitíttleikin er lágur. 31. oktober 2000 búðu 2.251 fólk í syðru helvt í Suðuroy – og vóru hetta umleið 1.550 fólk fleiri enn í Norðoyggjum annars, út við 800 fólk fleiri enn í Sandoy, umleið 690 fólk fleiri enn í Norður-Eysturoy, og umleið 390 fólk færri enn í Vágum.

Teir fyrstu 10 mánaðirnar av ár 2000 vórðu fødd 9 børn í Suðuroy. Í sama tíðarskeiði vórðu 11 børn fødd í Norðoyggjum annars, 11 børn fødd í Sandoy, 16 børn í Norður-Eysturoy, og í Vágum vórðu fødd 28 børn.

| | **Fólkatal 31. oktober 2000** | **Fødd 1. jan. – 31. okt. 2000** |
|---|---|---|
| Syðra helvt av Suðuroy | 2.260 | 9 |
| Norðoyggjar annars | 708 | 11 |
| Sandoyar sýsla | 1.457 | 11 |
| Norður Eysturoy | 1.565 | 16 |
| Vága sýsla | 2.640 | 28 |

*Talva 3. Børn fødd í úrvaldum økjum 1. jan. - 31. okt. 2000 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Tann lági føðitíttleikin kemst millum annað av, at talið á kvinnum í burðarbúnum aldri í Suðuroy og í syðru helvt í Suðuroy er lægri enn í landinum sum heild. Harumframt er føðitíttleikin millum kvinnur í burðarbúnum aldri í Suðuroy lægri enn í landinum sum heild, og tykist ein av orsøkunum vera arbeiðsloysi og óstøðugt arbeiði. Hetta er serliga galdandi fyri syðru helvt í Suðuroy, og gerst hesin veruleiki eisini greiður, tá miðallønin hjá lønmóttakarum í Vágs Kommunu, sum er størsta kommuna í syðru helvt í Suðuroy, verður samanborin við miðalløninar í restini av landinum[iii]. Vantandi arbeiði og óstøðugt arbeiði hava eina greiða ávirkan á føðitíttleikan, tí ein størri familja krevur størri fíggjarliga orku - størri inntøku –, og eru hesi viðurskifti ikki í lagi, verður í nógvum førum bíðað við ætlanum um at økja familjuna.

Um hugt verður at langtíðarárinum av hesi gongd, so er tað munandi lættari at loysa vandamál sum arbeiðsloysi enn at rætta strukturellar skeivleikar í aldurs- og kynssamansetingini í einum øki, sum er sera torført. Tí er ein tann størsta avbjóðingin at skapa støðugt arbeiði, ið førir við sær, at fólk ikki flyta úr økinum.

## Trivnaðarfyritreytir

Trivnaðarfyritreytirnar í einum øki eru eisini avgerandi fyri, um fólk trívist ella ikki. Parturin um trivnaðarfyritreytir er, sum nevnt, skipaður sum ein lýsing av, hvørji almenn og kommunal tænastutilboð og mentanar- og frítíðartilboð eru í einum øki, hvussu dygdargóð tilboðini eru, hvussu viðurskiftini eru skipað – og hvørja ávirkan tey hava á, hvussu fólk støðast í einum øki.

### Barnaansing, eldrarøkt og aðrar heilsutænastur í Suðuroy

Í talvuni niðanfyri er gjørd ein støðulýsing av barnaansingarøkinum, eldrarøktini og øðrum heilsutænastum í Suðuroy. Litirnir skulu tulkast sum víst á í innganginum, ”Alment um trivnaðarfyritreytir í økjunum kring landið”.

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[iv] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Barnagarðar | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Dagrøktarskipan | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Sjúkrahús | 🟢 | – | – | – | – | 🟡 |
| Heilsumiðstøðir | 🟡 | 🟡 | 🟢 | – | 🟢 | – |
| Kommunulæknar | 🟡 | 🔴 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Heilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Skúlaheilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Tannlæknar | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Ljósmóðir | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| Fysioterapi | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟡 |
| Ellisheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Røktarheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Eldrasambýli | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Umlættingarheim | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Heimarøktin | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Sambýli | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| Vardir verkstaðir | 🟢 | – | 🟡 | – | 🟡 | 🟡 |
| Dagtilhald | 🟢 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Onnur serviðgerð, stovnar o.a. | 🟢 | 🔴 | 🔴 | 🔴 | 🟡 | 🟡 |

## Barnaansing

Eins og aðrastaðni í landinum verður barnaansingin í Suðuroy røkt av hvørjari kommunu sær. Barnaansingin í Suðuroy kann býtast sundur í tvær skipanir, sum eru vøggustovur/barnagarðar og dagrøktarskipanin. Ein vøggustova/barnagarður er í Suðuroy, á Tvøroyri (í Trongisvági). Dagrøktarskipanir eru í øllum kommunum. Tó at ongir beinleiðis bíðilistar eru á barnaansingar-økinum[v], so er tørvur á vøggustovum/ barnagørðum í teimum størru bygdunum, fyrst og fremst í Vági og í Hvalba.

## Heilsurøkt

*Sjúkrahúsverkið* í Suðuroy er sum heild væl útbygt. Suðuroyar Sjúkrahús er júst ný- og útbygt og er at meta sum eitt nútímans sjúkrahús við øllum hentleikum. Sum heild eru annars flestallar viðgerðir á heilsuøkinum í Suðuroy, tó at ein má av oynni og landinum fyri at fáa summar serviðgerðir. Viðvíkjandi starvsfólki er at siga, at Suðuroyar Sjúkrahús havt ávísar trupulleikar við at fáa starvsfólk, eittnú er útskiftingin á sjúkrasystraøkinum stór, umframt at tað er trupult at fáa læknar og fysioterapeutar.

*Kommunulæknaskipanin* í Suðuroy er býtt sundur í tvey við eini læknamiðstøð í Vági, har tveir læknar eru, og einum læknahøli á Tvøroyri, har somuleiðis eru tveir læknar. Seinastu árini hevur útskiftingin av læknum í Vági verið stór, og hava læknarnir í flestum førum verið

útlendingar, oftast danir, ið bara steðga á í nøkur ár. Á Tvøroyri, hinvegin, hava seinastu mongu árini verið tveir føroyskir læknar, ið báðir eru búsitandi á Tvøroyri.

### Eldraøkið og hjálpartænastur annars

Eldrarøktin í Suðuroy kann býtast sundur í trý: Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, Eldrasambýlið og Heimahjálpin. Eldrarøktin er í løtuni ikki nøktandi - og standa m.a. 20 fólk á bíðilista til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim - pláss er fyri 28 fólkum. Bíðilistarnir hava verið størri, men eru minkaðir við nýggju eldrasambýlunum í oynni.

*Eldrasambýli* eru seinastu árini vorðin alsamt meiri vanlig. Trý eldrasambýli eru í Suðuroy: eitt á Tvøroyri, har 4 fólk búgva, eitt í Vági, har 12 fólk búgva og eitt í Hvalba (ið letur upp í januar 2001), har 8 fólk koma at búgva. Harumframt eru eisini ætlanir um at byggja eitt nýtt eldrasambýli á Tvøroyri. Eldrasambýlini hava ført við sær, at bíðilistin til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim er minkaður. Samstundis er hetta ein betran av korunum lokalt, skilt soleiðis, at eldri sleppa undan at fara av bygdini at fáa røkt.

### Heimarøktarskipanin virkar um alla oynna

Heimarøktarskipanin er ein skipan, ið veitir heimatænastur, umsorgan, heilsu- og sjúkrarøkt til brúkarar, ið hava tørv á hesum. Endamálið við heimarøktarskipanini er at gera tað møguligt

> Heimarøktarskipanin í Føroyum varð umskipað í 1997, soleiðis at heimahjálpin og heimasjúkrasystrarnir vórðu skipaðar undir ein stovn. Hetta hevði við sær, at tann umsitingarligi parturin av heimarøktini varð fluttur úr Havnini út um landið, soleiðis at heimarøktin nú er skipað í 6 øki. Við hesum varð eisini skapt grundarlag fyri, at arbeiðsætlanir kundu samskipast lokalt – og hevur hetta verið ein greiður fyrimunir fyri báði starvsfólk og brúkarar av heimarøktarskipanini.

at verða búgvandi heima sum longst, og so leingi tað er heilsuliga og samfelagsliga ráðiligt. Heimarøktarskipanin í Suðuroy verður samskipað úr Vági. Heimarøktin hevur tó felagshús í teimum stóru bygdunum, ið verða brúkt sum tilhaldsstað, goymsla o.s.fr. Sum er, nøktar heimarøktin í Suðuroy tørvin í samsvari við endamálið við heimarøktarskipanini.

### Onnur heilsutilboð

Viðvíkjandi hjálpartænastum annars, so eru stór framstig gjørd innan tilboð til menningar- og rørslutarnað í Suðuroy. Seinastu 10 árini er gjørdur vardur verkstaður, sambýli og vardar íbúðir, og við hesum slepst undan hjá eitt nú menningartarnaðum at flyta av oynni.

*Sambýlið á Bárðarfløtti* í Vági er fyri menningartarnað – og eru 5 búpláss í sambýlinum. Í mun til fyrr, har menningartarnað vórðu tvungin til at flyta til Havnar ella av landinum ella kravdu fulla tíð frá familju, verður hesin tørvur nú í ein ávísan mun nøktaður við sambýlinum í Vági. Umframt Sambýlið á Bárðarfløtti, so er eisini ein vard íbúð í Vági, ið serliga er ætlað

sálarliga sjúkum. Varda íbúðin hevur 3 búpláss. Greitt er, at sambýlið og varda íbúðin eru stór framstig fyri menningartarnað og sálarlig sjúk í Suðuroy.

*Vardi verkstaður á Bakka* í Vági er eitt dagtilboð til menningar- og rørslutarnað í Suðuroy. Verkstaðurin hevur egnan buss, ið flytir brúkarar úr allari oynni til og frá verkstaðnum. Vardi verkstaðurin ein somuleiðis eitt stórt framstig fyri menningar- og rørslutarnað í Suðuroy.

## Samanumtikið

Støðan viðvíkjandi ansing, røkt og heilsutilboðum í Suðuroy er í stóran mun góð, men eru tó ávísir trupulleikar viðvíkjandi bíðilistum á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi. Víst hevur verið á, at Ellis- og Røktarheimið kundi verið umskipað til eitt røktarheim burturav, soleiðis at teir tungu brúkararnir í størri mun kundu fingið størri gagn av felags kørmunum undir Ellis- og Røktarheiminum og Suðuroyar Sjúkrahúsi. Samstundis kundu tey, ið hava tørv á eldrasambýli, eldraíbúðum og heimarøkt fingið gagn av hesum tænastum lokalt.
Tilboð av hesum slagi kundu verðið samskipað fyri alla oynna undir einum, eins og Heimarøktin er í dag.

Viðvíkjandi kommunulæknum, so hevur tað verið ein afturvendandi trupulleiki, at kommunulæknar bert eru í Vági í eitt stutt tíðarskeið – og er útskiftingin sostatt stór.
Viðvíkjandi tilboðum til menningar- og rørslutarnað, so er ein greið framgongd at síggja seinastu árini til stóran bata og fyrimun fyri báði brúkarar og familju.

## Mentanar og frítíðartilboð í Suðuroy

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[vi] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Frælsur ítróttur** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Pensjónistafeløg** | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Fornminnafeløg** | ● (green) | ● (green) | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (red) | ● (yellow) |
| **Listarfeløg** | ● (yellow) | – | – | – | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Mentanarhús** | – | ● (yellow) | – | ● (yellow) | ● (red) | ● (red) |
| **Dansifeløg** | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Sjónleikarfeløg** | ● (yellow) | – | – | ● (yellow) | ● (red) | ● (yellow) |
| **Bygdafeløg** | ● (red) | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (red) | ● (green) |
| **Ungmannafeløg** | ● (red) | ● (green) | ● (red) | ● (yellow) | ● (red) | ● (green) |
| **Skótar** | ● (yellow) | – | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Sangur & tónleikur** | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) |
| **Andligt virksemi** | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) |
| **Kykmyndahøll** | ● (green) | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | ● (yellow) | – | – | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Klubbavirksemi** | ● (yellow) | – | – | – | ● (red) | ● (yellow) |
| **Matstovur** | ● (yellow) | ● (red) | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) |

So at siga allar vanligar ítróttargreinar kunnu íðkast í Suðuroy í dag. Summar ítróttargreinar, t.d. biljard, hava ment seg serliga nógv seinastu árini, meðan aðrar ítróttargreinar hava havt tað trupult. Sum heild er ítróttin nógv ávirkað av einstøkum undangongufólkum, og eru avleiðingarnar ofta stórar fyri tær smærri ítróttargreinarnar, tá hesi undangongufólk gevast ella falla frá. Hartil eru summar ítróttargreinar serliga á Tvøroyri, t.d. flogbóltur, meðan aðrar serliga eru í Vági, eittnú hondbóltur.

*Mentanar- og frítíðarfeløg*

Í mun til ítróttina, so eru mentanar- og frítíðarfeløg ikki ávirkað stórvegis av kreppuni. Sagt verður eisini, at mentan mennist undir torførum umstøðum, og tykist hetta eisini vera galdandi fyri mentanarvirksemi í Suðuroy í nítiárunum.

*Onnur frítíðartilboð*

Seinastu 2–3 árini er frítíðartilboðini vorðin fleiri og fleiri í Suðuroy. Eittnú eru kykmyndahøll og alnet-kafé latin upp á Tvøroyri – og verða hesi tilboð, serliga kykmyndahøllin, nógv brúkt av øllum suðuroyingum.
Um hugt verður eftir tilboðunum til ung um vikuskiftið, so er dansur hvørt vikuskifti – og oftast í TB-húsinum á Tvøroyri. Sum er, er ongin bussskipan í sambandi við dansin, sum ung úr øðrum bygdum kunnu brúka – tó at ein greiður tørvur tykist verða á hesum.

*Klubbar og matstovur*

Klubba- og matstovuvirksemið í Suðuroy er heldur avmarkað. Ein klubbi er á Tvøroyri, og tey 3 hotellini í oynni virka eisini sum matstovur, men hóast hetta er ein greiður tørvur á

slíkum tilboðum í Suðuroy, og fleiri ætlanir eru eisini í umbúnað, ið betra skulu hesi viðurskiftini í oynni.

*Samanumtikið*

Samanumtikið kann sigast, at økið er rímuliga væl fyri, hvat ítróttarvirksemi viðvíkur, tó at summar ítróttargreinar hava verið nær tongdar at einkultum undangongufólkum. Mentanarparturin haltar hinvegin eitt sindur, tó at ein framgongd hevur verið seinastu árini.

## Framrokning av fólkatalinum í Suðuroy

Hóast fólkatalið í Suðuroy er minkað uttan íhald seinastu árini, so væntar Hagstova Føroya, at hendan gongdin vendir í komandi árum. Víst varð á í talvu 2, at fólkatalið í Suðuroy væntandi veksur við uml. 5 % komandi 25 árini, meðan vøksturin í fólkatalinum í Føroyum sum heild væntandi verður 26 %. Hendan framrokning er grundað á, at framgongdin í Føroyum sum heild eisini fer at gagna Suðuroy – og verður fólkatalið ár 2024 væntandi 5.225.

Tað vil siga, at væntað verður, at burðaravlopið í Suðuroy hækkar í mun til tey bæði seinastu árini, tó at burðaravlopið væntandi framhaldandi verður væl lægri enn í øðrum økjum í landinum. Samstundis verður gingið út frá, at fráflytingin steðgar, og at fólk aftur fara at flyta til Suðuroyar, tó at hendan tilflyting er lítil.

### Framrokningar og ymiskar fyritreytir

Framrokningar av fólkatalinum sum heild eru grundaðar á søgulig tøl og væntaðar broytingar í framtíðini. Ikki er lætt at spáa um framtíðina, og av somu orsøk verða gjørdar framrokningar undir ymiskum fyritreytum – og er hetta eisini gjørt fyri fólkatalið í Suðuroy, sí mynd niðanfyri.




*Mynd 5. Fólkatalið í Suðuroy framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Um vinnuliga menningin í Suðuroy í næstu framtíð broytist munandi til tað betra, og gongdin verður lík gongdini í Suður-Eysturoy seinastu árini, so fer hetta eisini at fáa eina greiða ávirkan á gongdina í fólkatalinum. Framrokningar fyri fólkatalið í Suðuroy, har gingið verður út frá, at gongdin verður sum í Suður-Eysturoy seinastu árini, vísa, at fólkatalið í Suðuroy væntandi verður 6.401 í 2024.

Um gongdin í Suðuroy hinvegin verður, sum hon hevur verið seinastu árini, og sum hon var í 1996 og 1997, tá arbeiðsloysið var stórt, og fráflyting av somu orsøk var stór, samstundis sum føðitíttleikin var lægri enn í landinum sum heild, so vísa framrokningar, at fólkatalið í Suðuroy ár 2024 verður 4.372 fólk. Sostatt er ein ávísur vandi fyri, at fólkatalið í Suðuroy sum eitt av teimum fáu økinum í landinum framhaldandi fer at minka.

- Hvat trivnaðarfyritreytum viðvíkur kann staðfestast, at trivnaðarfyritreytirnar í Suðuroy eru til staðar á sama stigi sum trivnaðarfyritreytirnar í restini av landinum. Tó er verandi gongd í fólkatali, aldurspyramidu og framrokning av fólkatali sera døpur í mun til landið sum heild.
- Fyri at venda hesi gongd, er neyðugt at menna vinnulívið og undirstøðukervið (infrastrukturin). Menningin av vinnulívinum og undirstøðukervinum í Suðuroy sum heild hevur sostatt stóran týdning fyri, hvussu gongdin í fólkatalinum verður í komandi tíðum. Stórt arbeiðsloysi og óstøðugt arbeiði førir við sær, at fólk leita sær annan bústað, har arbeiðið er – meðan støðugt arbeiði fær fólk at verða verandi á staðnum, samstundis sum fólk flyta aftur til plássið at arbeiða, um arbeiðið hevur tær røttu avbjóðingarnar fyri tey.

# Sandoy

Sandur og Skopun hava upp gjøgnum 1980-árini verið vinnuligu deplarnir í Sandoy. Flakavirki var í báðum bygdum, men tey vórðu stongd í kreppuárunum – og førdi hetta við sær, at Sandoy (saman við syðra parti av Suðuroy) var tað økið í landinum, ið var harðast rakt av kreppuni.

Seinastu árini eru flakavirkini á Sandi og í Skopun latin uppaftur, og er eisini eitt nýtt góðskingarvirki latið upp í Skálavík. Hetta hevur ført við sær, at arbeiðsloysið er minkað munandi í oynni, og hevur hetta eisini havt eina ávirkan á gongdina í fólkatalinum, ið er vaksið tvey tey seinastu árini. Nevnast skal tó, at henda positiva gongdin ikki hevur verið galdandi fyri Skopunar Kommunu; hetta hóast virksemið er vaksið nógv aftur í kommununi. Ikki fyrr enn í ár er lutfalsliga stóra afturgongdin í fólkatalinum í Skopunar Kommunu hildin uppat.

### Fólkatalsfrøði

Í Sandoyar sýslu búðu við árslok 1999 1.448 fólk, og svarar hetta til góð 3 % av fólkinum í Føroyum. Í 1950 búðu umleið 5 % av fólkinum í Føroyum í hesum partinum av landinum. Sandoyar sýsla umfatar 4 kommunur í Sandoy og harumframt Skúvoyar kommunu – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Sandoyar sýslu 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Sands | 284 | 275 | 559 |
| Skopunar | 273 | 216 | 489 |
| Skálavíkar | 94 | 69 | 163 |
| Húsavíkar[i] | 79 | 73 | 152 |
| Skúvoyar | 52 | 33 | 85 |
| **Tilsamans** | **782** | **666** | **1.448** |

Eins og í Suðuroy er gongdin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu ikki vend eftir búskaparkreppuna fyrst í nítiárunum, tó er fólkatalið vaksið eitt lítið vet fyrstu 10 mánaðirnar av 2000. Tá fólkatalið var hægst, búðu fleiri enn 1.750 fólk í Sandoyar sýslu – 31. okt. 2000 búðu 1.457 fólk í Sandoyar sýslu.







*Mynd 6. Gongdin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein av høvuðsorsøkunum til hesa gongd er vantandi arbeiði í Sandoy, hetta eftir at bæði flakavirki á Sandi og í Skopun vórðu stongd í fyrri helvt av 1990-árunum. Stóra arbeiðsloysið førdi við sær stóra fráflyting, og sæst hetta eisini aftur í gongdini í fólkatalinum. Tá virkini á Sandi og í Skopun fóru í gongd aftur, varð hendan gongd í ein ávísan mun steðgað – og tykist gongdin verða vend seinastu tvey árini, soleiðis at fólkatalið nú aftur er á veg uppeftir. Fyrstu 10 mánaðirnar í ár 2000 vaks fólkatalið í Sandoyar sýslu úr 1.449 (1. januar) upp í 1.457 (31. oktober) - tó hesin vøkstur er væl lægri í prosentum enn í landinum sum heild.

## Aldurs- og kynssamanseting

Eins í Suðuroy hevur minkingin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu havt greiða ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina seinastu 10 árini. Heildarmyndin í alduspyramiduni í Sandoyar sýslu er í stóran mun tann sama sum í Suðuroy – og kemur hetta til sjóndar soleiðis, at ein størri prosentpartur av fólkinum var ’eldri enn 40 ár’ við árslok í 1999 enn við árslok í 1989. Stutt sagt, verður tyngdin í alduspyramiduni flutt uppeftir – t.e. at parturin av fólkinum í økinum, sum er í eldri aldurs-bólkunum er stórur.




Tá aldurspyramidan fyri Sandoyar sýslu verður sammett við idealtypuna (Suður- Eysturoy), eru fleiri sjónligir munir. Eittnú er tyngdin í pyramiduni í miðjuni - í mun til í niðara partinum av pyramiduni í ideal-typuni. Harumframt er aldursbólkurin av kvinnum 20-29 ár óvanliga lítil í Sandoyar sýslu.

*Mynd 7. Aldurspyramidur fyri Sandoyar sýslu 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Fólkatalið í Sandoyar sýslu minkaði við 308 í tíðarskeiðinum 1989–1999. Í sama tíðarskeiði minkaði aldursbólkurin ’yngri enn 40 ár’ við 323 fólkum, meðan aldursbólkarnir ’50–59 ár’ og ’80 –89 ár’ eru teir einastu, sum eru vorðnir størri í hesum tíðarskeiði.

Størsti trupulleikin við hesari gongd er, at aldursbólkarnir yngri enn 10 ár eru minkaðir munandi - frá 304 fólkum í 1989 til 183 fólk í 1999 – og kann hetta fáa stóra ávirkan á føðitíttleikan, um ikki ein ávís tilflyting verður, so at hesir aldursbólkar gerast størri.

*Lágur føðitíttleiki*

Gongdin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu hevur eisini verið merkt av, at føðitíttleikin hevur verið lægri enn í landinum sum heild[vii]. Ein av orsøkunum til hetta er, at talið á kvinnum í burðarbúnum aldri hevur verið og er lægri enn í landinum sum heild – og harumframt at føðitíttleikin millum kvinnur í burðarbúnum aldri er lægri enn í landinum sum heild.

Ein av orsøkunum til hetta er at finna í tí stóra arbeiðsloysinum í Sandoyar sýslu miðskeiðis í 1990- árunum, meðan flakavirkini á Sandi og í Skopun vóru stongd. Flakavirkini eru farin í gongd aftur sambært eini lokalari ætlan, *Sandoyarætlanin* nevnd, við fíggjarligum stuðli frá tí almenna - og fer hetta væntandi at fáa eina ávirkan á føðitíttleikan í næstu framtíð.

## Trivnaðarfyritreytir

Arbeiðsloysið í Sandoy er minkað munandi, nú flakavirkini á Sandi og í Skopun eru farin í gongd aftur, samstundis sum eitt nýtt góðskingarvirki er farið at virka í Skálavík – og hevur hetta eisini havt sína greiðu ávirkan á miðallønir sum heild, ið eru hækkaðar munandi seinastu tvey árini. Viðurskiftini viðvíkjandi arbeiðsplássum eru sostatt broytt munandi og tykjast vera komin í ’rætt lag’ eftir búskaparkreppuna. Afturat hesum eru at nevna viðurskiftini viðvíkjandi trivnaðarfyritreytunum, ið hava eina ávirkan á, um fólk verða verandi í Sandoy, og um fólk flyta aftur til Sandoyar.

### Barnaansing, eldrarøkt og aðrar heilsutænastur í Sandoyðarøkinum

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýslu | Vága sýsla | Streymoy Annars[viii] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Barnagarðar | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Dagrøktarskipan | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Sjúkrahús | 🟢 | – | – | – | – | 🟡 |
| Heilsumiðstøðir | 🟡 | 🟡 | 🟢 | – | 🟢 | – |
| Kommunulæknar | 🟡 | 🔴 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Heilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Skúlaheilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Tannlæknar | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ljósmóðir** | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fysioterapi** | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟡 |
| **Ellisheim** | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Røktarheim** | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Eldrasambýli** | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Umlættingarheim** | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Heimarøktin** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Sambýli** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Vardir verkstaðir** | 🟢 | – | 🟡 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Dagtilhald** | 🟢 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Onnur serviðgerð, stovnar o.a.** | 🟢 | 🔴 | 🔴 | 🔴 | 🟡 | 🟡 |

*Viðmerkingar til Sandoyar sýslu í omanfyristandandi talvu*

Vit hava bygt okkara støðumynd á viðurskiftini í trimum ymiskum kommunum í Sandoy: Skálavíkar, Skopunar og Sands kommunum. Langt frá allar tænasturnar omanfyri eru í Sandoyar sýslu í dag, og tilboðini kunnu neyvan metast sum nøktandi fyri borgaran í økinum.

*Barnaansingin í økinum*

Ítøkiligar ætlanir eru í øllum kommununum um at fara frá dagrøktarskipan til vøggustovu og barnagarð. Henda loysnin er longu sett í verk í Sands Kommunu, er ávegis í Skálavík, og Skopunar Kommuna ætlar sær somu loysn innan ár 2001 er úti. Ein skipan við vøggustovum og barnagørðum ger tað, alt annars eins, lættari at fáa fakfólk til at taka sær av barnaansingini í økinum, og má hetta sigast at vera ein fyrimunur fyri økið sum heild.

*Læknaviðurskifti og heilsurøkt*

Økið hevur havt sera stórar trupulleikar í sambandi við kommunulæknaskipanina. Staðfestast kann, at kommunulæknar koma og fara - viðhvørt fleiri ferðir um árið -, og at hetta er alt annað enn rímiligt fyri borgarar, ið búgva í Sandoyar sýslu. Ein sokallað 'læknamiðstøð' er í økinum, og tað er har, kommunulæknarnir halda til. Fleiri funktiónir vóru knýttar at miðstøðini fyrr, eittnú varð heimahjálparaskipanin stýrd hagani, áðrenn henda funktiónin varð knýtt at tí nýggju eldrarøktar-skipanini í økinum.

*Eldrarøktin í økinum*

Í løtuni er ein royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoy, har allar kommunurnar í hesi lýsingini eru við. Skipanin fevnir um trý eldrasambýli, sum í dag hava ávikavist 6,7 og 11 búpláss. Høvuðshugsanin í hesi ætlan er at royna eitt alternativ til 'ellis- og røktarheimsskipanina', har lutfalsliga nógv búfólk liva undir "sjúkrahúslíknandi" umstøðum. Meiningin er at samskipa teir aktivitetir, sum eru felags fyri allar eindirnar, t.e. umsiting, starvsfólk osfr. og harvið fáa fyrimunir av eini felagsskipan, sjálvt um búfólkini búgva í fleiri smærri eindum. Heimini lótu upp fyri einum og tveimum árum síðani, og mugu umstøðurnar metast at vera sera góðar.

Skipanin nøktar eisini tørvin í økinum fleiri ár fram. Skipanin sær sostatt út til at vera góð bæði fyri starvs- og búfólk, men tíverri hongur ikki saman millum fíggjarliga játtan og virksemi (dømi: Lagt verður upp til, at t.d. vask er felags millum eindirnar; hetta uttan at játta akfar til uppgávuna). Tað er ikki rætt, um ein tílík royndarskipan, sum í sjálvum sær, er heldur dýrari enn ”sjúkrahús-modellið”, ikki fær neyðuga játtan til virksemi, sum júst skal geva ábendingar um, hvørt hetta modellið er nakað, sum skal gerast ”prototypan” fyri framtíðar eldrarøkt kring alt landið.

*Samanumtikið*

Støðan í Sandoyar sýslu í sambandi við ansing, røkt og heilsutilboð annars er ógvuliga misjøvn. Tá ið talan er um barnaansing og eldrarøkt er økið eitt hitt fremsta í landinum, men tá ið hugsað verður um kommunulæknar og aðrar heilsutænastur, sum t.d. tilboð til ófullførar borgarar og sertilboð á heilsuøkinum yvirhøvur, kann bert staðfestast, at Sandoyar sýsla er eftirbátur; hetta í mun til flest øll størri øki í Føroyum (t.e. Føroyar, burtursæð frá útoyggjum).

## Mentanar og frítíðartilboð í Sandoyar sýslu

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[ix] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fræls ítrótt** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Pensjónistafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fornminnafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Listarfeløg** | 🟡 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Mentanarhús** | – | 🟡 | – | 🟡 | 🔴 | 🔴 |
| **Dansifeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sjónleikarfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Bygdafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟢 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ungamannafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🔴 | 🟡 | 🔴 | 🟢 |
| **Skótar** | 🟡 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sangur & tónleikur** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Andligt virksemi** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 |
| **Kykmyndahallir** | 🟢 | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Klubbavirksemi** | 🟡 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Matstovur** | 🟡 | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |

*Skipað mentanar- og frítíðartilboð í Sandoyar sýslu*

Um hugt verður at yvirlitinum omanfyri, so er tað ógvuliga sjónligt, at økið ikki hevur eins nógv ymisk tilboð á frítíðar- og mentanarøkinum at bjóða sínum borgarum, sum onnur størri øki í Føroyum (t.e. hini økini í hesi lýsing). Ein av høvuðsorsøkunum er sjálvsagt, at eingin ítróttarhøll er í økinum, men hinvegin eru frítíðartilboð sum t.d. talv, bridge, biljard og dart, ið ikki krevja serlig hølisviðurskifti, heldur ikki til í økinum.

*Ítróttarhøll*

Arbeitt hevur verið við at fáa eina ítróttarhøll heilt síðani 1986, men kreppan beindi meiri ella minni fyri øllum hugsanum um ítróttarhøll fyrst í 90-árunum. Av tí at eingin ítróttarhøll er, varð roynt at nýta skúlafimleikarhøllina til t.d. hondbólt og flogbólt. Í nøkur ár spældu sandoyingar hond- og flogbólt í landskappingini í hesi høll. Seinni gjørdust krøvini harðari til hallarumstøður o.a. og kravt varð, at sandoyingar spældu heimadystir sínar í veruligari ítróttarhøll. Eitt stutt tíðarskeið varð spælt í Havn, men hetta datt síðani niðurfyri av praktiskum trupulleikum. Eingin ivi er um, at tað er avgerandi fyri framtíðar trivnað í økinum, at tilboð, sum typiskt eru tongd at eini ítróttarhøll, koma at standa borgarum í Sandoy í boði í næstu framtíð.

*Ungmannafeløg*

Í hvørji bygd í Sandoy er eitt virkið ungmannafelag. Hetta er helst eindømi í øllum Føroyum. Hesi feløg hava góðar karmar at virka undir, við tað at øll ungmannafeløgini hava megnað at fáa eitt felagshús upp at standa. Hesi hús verða fíggjað við ymiskum tiltøkum, ið øll oyggin stuðlar; eisini er vanligt, at avoyggjagestir og útlendingar gista í hesum húsum fyri eitt ávíst gjald.

*Dansifeløg*

Íbúgvarnir í Sandoy bera orð fyri at vera góðir dansarar, og er hetta helst orsøk til, at tvey sera virkin dansifeløg eru í økinum. Annað av hesum feløgum hevur á hvørjum vetri skeið o.a. í útlendskum dansi, meðan hitt roynir at halda gamla siðin við føroyskum dansi uppi. Hesi bæði feløgini skipa nakrar ferðir um árið fyri tiltøkum fyri at samla inn pening, og eru hesi tiltøk ofta sera væl vitjað.

*Fornminnafeløg*

Nøkur pláss í Sandoy eru sera gomul, m.a. er bygdin Heima á Sandi óivað landnámsbygd og í Húsavík eru toftirnar av garðinum hjá húsfrúnni. Tískil er ikki so løgið, at fleiri sandoyingar hava sera stóran áhuga fyri fornminnum. Hesin stóri áhugin hevur ført við sær, at tvey ógvuliga virkin fornminnafeløg eru sett á stovn. Annað felagið gevur blað út á hvørjum ári, har tey m.a. greiða frá, hvørjum tey hava arbeitt við tað seinasta árið. Feløgini hava eisini verið sera virkin, tá ið talan er um at seta gomul hús í upprunastand, seta upp gamalt innbúgv osfr.

*Samanumtikið*

Tá ið dragast skal saman um mentanar- og frítíðarvirksemið í Sandoyar sýslu kann staðfestast, at økið stendur sera sterkt, tá ið talan er um sjálvan mentanarpartin. Hetta eru dansurin, fornminna- og ungdómsfeløgini fullgóð dømi um. Hinvegin stendur ikki so væl til, tá ið talan er um frítíðartilboð, og eingin ivi er um, at ein ítróttarhøll avgjørt má raðfestast høgt millum komandi íløgur í økinum. Tann veruleiki, at eingin ítróttarhøll er í økinum, ger, at Sandoyar sýsla í dag má metast at vera væl aftan fyri restina av Føroyum, tá ið talan er um ítróttartilboð.

## Framrokningar av fólkatalinum í Sandoyar sýslu

Hagstova Føroya væntar, við støði í fólkatalinum í 1999, at gongdin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu broytist í mun til seinastu árini. Hendan broyting er fyri so vítt vorðin sjónlig fyrstu 10 mánaðirnar í ár 2000, tá fólkatalið vaks 0,5 %.

Væntað verður, at fólkatalið í Sandoyar sýslu veksur 5 % komandi 25 árini, meðan fólkatalið í landinum sum heild veksur 25 % í sama tíðarskeiði. Væntað verður sostatt, at burðaravlopið veksur, tó at tað ikki kemur upp á sama stig sum í landinum sum heild, samstundis sum ein lítil tilflyting verður til Sandoyar sýslu. Hendan framrokningin er grøna strikan í myndini niðanfyri.

### Framrokningar og ymiskar fyritreytir

Stutt tíð er farin, síðan endurreisingin av vinnulívinum í Sandoyar sýslu byrjaði, og er tí ikki heilt greitt, í hvønn mun økið hevur fingið fótin fyri seg aftur í vinnuligum høpi. Hetta førir eisini við sær, at tað er trupult at spáa um, hvussu gongdin í fólkatalinum í Sandoyar sýslu verður komandi 25 árini.

Um flakavirkini Heima á Sandi og í Skopun steingja aftur og avleiðingarnar verða stórt arbeiðsloysi, kann gongdin venda til tað verra, og fallið í fólkatalinum gerast stórt – tann reyða strikan í myndini niðanfyri.




*Mynd 8. Fólkatalið í Sandoyar sýslu framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Um gingið verður út frá, at tað fer at ganga heilt væl í Sandoyar sýslu, og fólk í stóran mun fara at flyta aftur til økið, samstundis sum burðaravlopið gerst væl størri – eins og í Suður-Eysturoy seinastu árini – so kann fólkatalið koma upp á 1.845 fólk í ár 2024. Sum er, tykist trupulleikin og størsta avbjóðingin vera eitt hall í burðaravlopinum - og her skal ein vend koma í fyri at fáa eina postiva gongd í fólkatalinum.

- Lýsta gongdin í fólkatali, aldurspyramidum og framrokningum av fólkatalinum vísa, at Sandoyar sýsla er eitt av teimum veikaru økjunum í landinum - tó at ein ávís positiv gongd er at hóma. Hinvegin eru trivnaðarfyritreytirnar als ikki nøktandi - og hetta øki er aftanfyri restina av landinum.
- Tann positiva gongdin í fólkatalinum stavar fyrst og fremst frá tí vinnuligu menningini, ið hevur verið í Sandoy seinastu árini. Hetta staðfestir, at ein lokal loysn saman við fíggjarligum stuðli frá tí almenna - tann sokallaða *Sandoyarætlanin* - hevur borið ávøkst.

# Vága sýsla

Vágar eru sermerktar við at einasti flogvøllurin í landinum er í oynni. Flogvøllurin hevur eisini stóran týdning fyri oynna sum størsta arbeiðspláss í økinum. Harafturat er flogvøllurin helst ein av høvuðsorsøkunum til, at tað nú verður arbeitt við at fáa fast samband við Streymoy; undirsjóvar-tunnilin verður væntandi klárur til nýtslu á vári 2003.

Tá ið talan er um *vinnustruktur*, eru Vágar, burtursæð frá flogvøllinum og tí virksemi, sum er tongt at honum, sera líkar øðrum útjaðarøkjum. Flakavirkini í Miðvági og Sørvági hava verið og eru sera týdningarmikil arbeiðspláss í oynni. Tá ið flakavirkini miðskeiðis í 1990-árunum vórðu afturlatin í eina tíð, hevði tað munandi avleiðingar fyri alt økið. Eisini er vert at nevna Oilwind, sum í nógv ár hevur verið millum fremstu maskinverkstaðir í landinum.

Higartil hevur tað víst seg at vera ein stórur vansi, at so at siga eingir útbúgvingarmøguleikar hava verið í oynni. Hetta hevur ført við sær, at nógvur ungdómur, sum ætlar at nema sær víðari útbúgving, hevur verið noyddur at flyta úr oynni. Nú fast samband verður borað undir Vestmannasund, verður gjørligt hjá skúlaungdómi at verða búgvandi í oynni, meðan tey leita sær útbúgving í t. d. Tórshavn.

Í Vága sýslu búðu við árslok 1999 2.617 fólk, og svarar hetta til sløk 6 % av Føroya fólki. Í 1950 búðu fleiri enn 8 % av fólkinum í Føroyum í Vága sýslu. Vága sýsla umfatar 4 kommunur í Vágum og harumframt Mykines kommunu – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Vága sýslu 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Sandavágs | 371 | 320 | 691 |
| Miðvágs[i] | 481 | 472 | 953 |
| Sørvágs | 473 | 413 | 886 |
| Bíggjar | 39 | 32 | 71 |
| Mykines | 8 | 8 | 16 |
| **Tilsamans** | **1.372** | **1.245** | **2.617** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Vága sýsla er saman við Suðuroy og Sandoyar sýslu tað økið í Føroyum, sum hevur ment seg minst eftir búskaparkreppuna. Hóast ein lítil vøkstur hevur verið í fólkatalinum í Vága sýslu síðan 1996, so er hesin vøkstur lítil í mun til vøksturin í fólkatalinum í landinum sum heild. Vøksturin í fólkatalinum stendst av, at burðaravlopið seinastu árini hevur verið størri enn tann nettofráflyting, ið hóast alt hevur verið.




*Mynd 9. Gongdin í fólkatalinum í Vága sýslu 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Gongdin í Vága sýslu tykist tó vera á beinari leið, hvat vinnumenning viðvíkur. Í 1999 varð flakavirkið í Sørvági latið upp aftur, og er framleiðslan á Føroya Fiskavirking í Miðvági harumframt komin í eina fastari legu. Ein jøvn menning hevur eisini verið innan vinnulívið sum heild – og hetta fer saman við undirsjóvartunlinum at fáa stóra ávirkan á gongdina í fólkatalinum í Vágum.

## Alders- og kynssamanseting

Tann stóra minking í fólkatalinum 1990 – 1995 hevur heilt greitt havt ávirkan á alders- og kynssamansetingina í Vága sýslu. Í alderspyramiduni gerst hetta serliga sjónligt við eini stórari minking í aldursbólkinum 20 – 29 ár. Ávirkanin á teir yngru aldursbólkarnar hevur hinvegin ikki verið so stór sum í t.d. Suðuroy og Sandoyar sýslu, og kann ein orsøk vera, at gongdin í Vága sýslu í ein ávísan mun longu kom í fasta legu í 1995 og 1996.




Tá alderspyramidan fyri Vága sýslu verður samanborin við idealtypuna (Suður- Eysturoy), so eru tær í ein ávísan mun líkar, hvat yngru aldursbólkunum viðvíkur. Teir eldru aldursbólkarnir í Vága sýslu eru somuleiðis nakað størri enn í idealtypuni. Meðan aldursbólkurin 20–29 ár er væl minni enn í idealtypuni.

*Mynd 10. Alderspyramidur fyri Vágaøkið 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Aldurs- og kynssamansetingin í Vága sýslu hevur annars verið merkt av, at tað eru lutfalsliga fáar kvinnur í aldursbólkunum 20–29 ár og 30–39 ár. Hesin ”skeivleiki” er vorðin alsamt størri í árunum 1989–1999, og er hetta eitt hjáárin av búskaparkreppuni. Ein av orsøkunum til hesa gongd kann vera, at ov fá arbeiðstilboð eru til kvinnur í økinum, og verða tær tískil noyddar at flyta eftir arbeiði. Hetta mynstur er eisini kent í Sandoyar sýslu og í ein ávísan mun í Suðuroy, og standa hesi øki í landinum fyri somu avbjóðing, tá ið tað snýr seg um at skapa arbeiðstilboð til kvinnur.

Ein framhaldandi gongd við færri og færri kvinnum í aldursbólkunum 20-29 ár og 30-39 ár kann skapa strukturellar skeivleikar, sum føra við sær, at færri og færri børn verða fødd og at føði-títtleikin av hesi orsøk gerst lægri og lægri - og verður langtíðarárinið tá ein minking í fólkatalinum, um ikki ein ávís tilflyting verður til økið.

## Trivnaðarfyritreytir

Umframt at skapa arbeiðstilboð, eru trivnaðarfyritreytirnar avgerandi fyri, hvussu fólk trívist á einum staði.

### Barnaansing, eldrarøkt og aðrar heilsutænastur í Vága sýslu

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[x] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Barnagarðar | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Dagrøktarskipan | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Sjúkrahús | 🟢 | – | – | – | – | 🟡 |
| Heilsumiðstøðir | 🟡 | 🟡 | 🟢 | – | 🟢 | – |
| Kommunulæknar | 🟡 | 🔴 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Heilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Skúlaheilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Tannlæknar | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Ljósmóðir | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| Fysioterapi | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟡 |
| Ellisheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Røktarheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Eldrasambýli | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Umlættingarheim | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Heimarøktin | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Sambýli | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| Vardir verkstaðir | 🟢 | – | 🟡 | – | 🟡 | 🟡 |
| Dagtilhald | 🟢 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Onnur serviðgerð, stovnar o.a. | 🟢 | 🔴 | 🔴 | 🔴 | 🟡 | 🟡 |

*Viðmerkingar til Vága sýslu í omanfyristandandi talvu*

Vit hava bygt okkara støðumynd á viðurskiftini í trimum ymiskum kommunum í Vágum, hesar eru Sandavágs, Miðvágs og Sørvágs Kommunur. Yvirhøvur kann staðfestast, at støðan innan almanna- og heilsuøkið í Vágum er rímilig uttan tó á nakran hátt at vera fyrimyndarlig. Lutfalsliga nógv tilboð í økinum eru eisini merkt av, at ”tey eru har”, tó uttan at nøktandi karmar og/ella starvsfólk eru til hesi tilboð.

*Barnaansingin í økinum*

Í Vágum eru báði dagrøktar- og barnagarðsskipanir. Dagrøktarskipanir eru í øllum trimum kommununum. Í Sørvágs Kommunu er tó báði barnagarðs- og dagrøktarskipan. Ein felagstrupulleiki fyri dagrøktarskipanirnar í økinum er, at teir hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Størsti trupulleikin er ikki bíðilistar men dagligu umstøðurnar, sum dagrøktarskipanin hevur at bjóða starvsfólki og børnum. Ein annar trupulleiki, sum er sera vanligur, tá ið talan er um dagrøktarskipanir yvirhøvur, er, at tað er trupult at fáa skikkað starvsfólk til dagrøktarskipanina. Til dømis hevur Sandavágs Kommuna lýst starv leyst uttan at fáa umsøkjarar til starvið.

Barnagarður er í Sørvágs Kommunu, hesin barnagarðurin hevur 3–7 ára gomul børn. Bíðilistin hevur verið langur til barnagarðspláss, men í ár hevur kommunan uppnormerað dagrøktina mun-andi. Hetta er gjørt fyri at sleppa undan einum alt ov stórum trýsti á barnagarðsplássini. Tað ber ikki til at taka fleiri børn inn í barnagarðsskipanina í Sørvágs Kommunu, um ikki ein útbygging verður framd. Í Sandavágs Kommunu hava tey ítøkiligar ætlanir um ein barnagarð. Kommunan hevur samtykt, at ein barnagarður skal byggjast, og ein arbeiðsbólkur er settur at taka sær av málinum. Í Miðvágs Kommunu eru ongar ítøkiligar ætlanir um eina barnagarðsskipan, men sannlíkt er, at kommunan ”fylgir við”, tá ið barnagarður nú eisini verður í Sandavági.

*Heilsumiðstøð við góðum umhvørvi*

Í Miðvági er ein nýmótans heilsumiðstøð við nógvum ymiskum møguleikum og tilboðum. Í heilsumiðstøðini húsast eittnú kommunulæknar, heilsusystrar, ljósmóðir o.o., og eru fysisku karmarnir eisini í lagi. Hendan miðsavnan ger, at tað ber betur til at fáa eina samskipan millum tey ymisku heilsutilboðini, og lættari verður at finna fram til møguligar tørvir og annað, sum ikki er nøktandi innan heilsuskipanina í økinum.

> Royndirnar av at samskipa heilsutilboðini á heilsumiðstøðini í Miðvági kundu verðið brúkt aðrastaðni í landinum til gagns fyri brúkaran.

*Eldrarøktin og Ellis- & Avlamisheimið í Vágum*

Í yvirlitinum omanfyri hevur eldrarøktin í økinum fingið litin ’gult’. Ein stórur partur av eldrarøktini í økinum liggur hjá Ellis- og Avlamisheiminum í Vágum. Lutfalsliga langir bíðilistar eru til pláss á heiminum, báði tá ið talan er um umlætting og ’fast pláss’. Kring alt

landið er gongdin yvirhøvur tann, at brúkarin á ellis- og røktarheimum gerst alsamt eldri, og er Ellis- og Avlamisheimið í Vágum einki undantak í hesum sambandi. Í dag er støðan tann, at heimið er vorðið eitt ”sjúkrahúslíknandi” ellis- og avlamisheim, tí at brúkarin yvirhøvur er vorðin eldri og verri fyri.

*Samanumtikið*

Yvirhøvur er støðan innan almanna- og heilsuøkið í økinum ógvuliga lík støðuni aðrastaðir í landinum: Lutfalsliga nógv ymisk tilboð, men ofta eru hvørki hølis- ella starvsfólkaviðurskifti nøktandi, og førir hetta við sær langar bíðilistar til tey ymisku tilboðini. Eldrasambýli og sambýli fyri ófullførar borgarar, er nakað sum fólk í økinum raðfesta høgt, tá ið talan er um nýggjar íløgur innan almanna- og heilsuøkið. Í dag er eingin tílíkur stovnur í økinum.

## Mentanar og frítíðartilboð í Vága sýslu

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xi] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fræls ítrótt** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Pensjónistafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fornminnafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Listarfeløg** | 🟡 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Mentanarhús** | – | 🟡 | – | 🟡 | 🔴 | 🔴 |
| **Dansifeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sjónleikarfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Bygdafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟢 |
| **Ungmannafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🔴 | 🟡 | 🔴 | 🟢 |
| **Skótar** | 🟡 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Sangur & tónleikur** | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) | ● (green) | ● (yellow) |
| **Andligt virksemi** | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) | ● (green) |
| **Kykmyndahøll** | ● (green) | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | ● (yellow) | – | – | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) |
| **Klubbavirksemi** | ● (yellow) | – | – | – | ● (red) | ● (yellow) |
| **Matstovur** | ● (yellow) | ● (red) | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) | ● (yellow) |

### *Skipað mentanar- og frítíðartilboð í Vága sýslu*

Í Vágum eru øll tey mest vanligu mentanar- og frítíðartilboðini. Tey tilboð, sum eru knýtt at eini ítróttarhøll og/ella fótbóltsvøllum, eru væl umboðað í økinum. Hinvegin eru tað lutfalsliga nógv mentanartilboð, sum eru knýtt at øðrum fysiskum kørmum, sum ikki eru so væl umboðað í økinum; herundir kykmyndahøll, alnet-kafé, biljard og klubbavirksemi.

### *Ítróttarhøllin á Giljanesi*

Ein ítróttarhøll er í Vágum, og er hon á Giljanesi. Eingin ivi er um, at ítróttarhøllin hevur stóran týdning fyri frítíðartilboðini í økinum; hetta serliga tí at so nógvar ymiskar ítrottargreinar og onnur frítíðartilboð við kunnu vera í eini tílíkari høll. Á hesum økinum má sigast, at munandi broytingar betra vegin eru hendar. Áðrenn ítróttarhøllin kom miðskeiðis í 1980-árunum, var bara møguligt at íðka ítróttargreinar sum t.d. badminton og flogbólt í fimleikarhøllini hjá Miðvágs-Sandavágs skúla. Í Sørvágs Kommunu er eingin ítróttarhøll, men ein stór fimleikarhøll. Úrslitini hjá Sørvágs Ítróttarfelag í flogbólti vísa greitt, at gjørligt er at fáa góð ítróttarúrslit uttan at hava optimal viðurskifti at leika undir.

### *Fótbóltur í Vágum*

Tað eru sera góðar umstøður at leika fótbólt í Vágum. Graslíkisvøllir eru í øllum teimum stóru kommunununum í økinum, og somuleiðis eru felagshús við allar vøllirnar. Tey trý gomlu bygdafeløgini, Sandavágs Ítróttarfelag, Miðvágs Bóltfelag og Sørvágs Ítróttarfelag, eru gingin saman um ein ”yvirbygning” - FS Vágar. Hetta er besta liðið í økinum, sum er eitt felagslið úr øllum trimum feløgunum. Tann sannroynd, at ítróttarlig úrslit og umstøður ikki eru beinleiðis treytað av hvørjum øðrum (smb. flogbóltinum omanfyri), sæst eisini aftur í fótbóltinum í Vágum: Fyrst í 90-árunum høvdu Vágar tvey lið í 1. deild og eitt í 2. deild. Í dag hevur økið eitt lið í 1. deild, einki í 2. deild og einki í 3. deild, so her má sigast, at onnur viðurskifti enn fysiskar umstøður gera seg galdandi.

### *Onnur mentanar og frítíðartilboð í Vágum*

Eisini í Vágum er áhugin fyri fornminnum stórur, og eru fornminnafeløg í øllum trimum bygdunum. Hølisviðurskiftini eru størsti trupulleikin hjá hesum feløgum: Í Sandavági er einki høli beinleiðis til fornminni, í Miðvági er kommunukjallarin innrættaður til endamálið, og í Sørvági er bygdarsavnið beinleiðis á privatum hondum. Ungmannafeløg eru ikki longur í

økinum. Hesi feløg hava tó verið fyrr, men vóru hesi fast knýtt at teimum persónum, sum tóku sær av virkseminum.

*Samanumtikið*

Støðan í Vágum gevur greiðar ábendingar um, at einki beinleiðis samband er millum umstøður og úrslit. Sjálvandi eru teir røttu karmarnir sera gott støði, men fyritakssemi, áhugi og samstarvsevni eru eins týdningarmiklir eginleikar, um eitt gott úrslit skal spyrjast burturúr. Hetta er ein sannroynd, sum t. d. skal havast í huga, tá ið krøv um betri umstøður o.t. skulu viðgerast.

## Framrokning av fólkatalinum í Vága sýslu

Framrokningar av fólkatalinum í Vága sýslu – við gongdini seinastu árini sum grundarlag – vísa, at fólkatalið í ár 2024 kann koma upp á 3.050 fólk. Hetta er ein vøkstur, sum svarar til uml. 17 % í mun til fólkatalið í 1999. Vøksturin í fólkatalinum í Føroyum sum heild verður væntandi 26 % í sama tíðarskeiði.

Væntað verður, at tann lítla fráflytingin, sum hevur verið úr Vága sýslu seinastu árini, verður vend til eina lítla tilflyting, og hetta fer saman við burðaravlopinum at føra við sær, at fólkatalið veksur.

### Framrokningar undir ymiskum fyritreytum

Eins og fyri gongdina í fólkatalinum í Suðuroy og í Sandoyar sýslu eru eisini gjørdar framrokningar undir ymiskum fyritreytum fyri Vága sýslu. Suðuroy og Sandoyar sýsla vórðu harðari raktar av kreppuni enn Vágar. Vágar hava harumframt ment seg skjótari enn Suðuroy og Sandoyar sýsla eftir kreppuna, sum myndin niðanfyri sýnir. Spurningurin tykist bara vera, hvussu stórur vøksturin í fólkatalinum verður. Munurin á gulu og reyðu linjuni er, at fyritreytirnar fyri gulu linjuni rokna við eini lítlari tilflyting til Vága sýslu, men fyritreytirnar fyri tí reyðu linjuni rokna við eini heilt lítlari fráflyting - í báðum førum við einum postitivum burðavlopi.




*Mynd 11. Fólkatalið í Vága sýslu framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Um gongdin í Vága sýslu broytist munandi til tað betra – og fer at líkjast gongdini í Suður-Eysturoy, kann fólkatalið í Vága sýslu vera komið upp á 3.454 í 2024. Undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund kann fáa stóra ávirkan á hesi viðurskifti, við tað at Vágar verða knýttar fastar at meginøkinum - og verða møguleikarnir fyri at arbeiða og brúka tilboðini í meginøkinum tá munandi betri. Harumframt verður tann náttúrligi marknaðurin hjá framleiðslu- og tænastuvinnum í Vágum størri, tá koyrandi verður undir Vestmannasund.

- Verandi gongd í fólkatali, aldurs- og kynssamanseting og framrokningar av fólkatali staðfesta eina ávísa framgongd í Vága sýslu - tó at hendan framgongd ikki er so stór. Vert er tó at nevna, at aldursbólkurin av kvinnum í aldrinum 20-29 ár og 30-39 ár er lutfalsliga lítil - og kann hetta fáa ávirkan á tað annars positiva burðaravlopið.
- Trivnaðarfyritreytirnar eru nakað veikar í økinum, og tykist hetta vera einamest orsakað av vantandi samskipan.
- Ein sera týdningarmikil katalysator fyri samlaðu menningina av oynni verður uttan iva undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, ið fer at bøta um trivnaðar- og heilsuviðurskifti, umframt at vinnulívið fær nýggjar marknaðarmøguleikar.

# Streymoy annars

Økið ‘Streymoy annars’ fevnir um alla Streymoy, høvuðstaðarøkið undantikið. Kommunurnar í Streymoy annars eru rættliga ymiskar til støddar, og torført er at siga, um nøkur einstøk kommuna í økinum hevur verið avgerandi fyri menningina í økinum. Sjálvsagt hevur gongdin í Vestmanna, har flestu íbúgvarnir í økinum búgva, týdning fyri økið sum so, men torført er at siga nakað greitt um, í hvønn mun gongdin í Vestmanna hevur týdning fyri restina av økinum.

Hinvegin kann staðfestast, at Tórshavn hevur havt sera stóran týdning fyri menningina av restini av Streymoy, við tað at ein munandi partur av arbeiðsstyrkini arbeiðir í høvuðsstaðarøkinum. Tunnilin úr Kollafirði í Kalbaksbotn hevur eisini gjørt tað væl lættari at arbeiða og nýta tænastur, sum eru í Tórshavn.

Um hugt verður eftir tríbýtinum millum framleiðslu, byggivinnu o.a. og almenna fyrisiting o.t. sæst rættiliga týðuliga, at nógvir íbúgvar í ‘Streymoy annars’ fáa løn umvegis Tórshavn (t.e., at lutfalsliga nógvir pendlarar[xii] eru í økinum).

Í Streymoy annars búðu við árslok 1999 4.877 fólk, og svarar hetta til 9 % av Føroya fólki - tá Kollafjarðar Kommuna hevur lagt saman við Tórshavnar Kommunu, búgva umleið 7 % av fólkinum í hesum partinum av landinum. Í 1950 búðu út við 11 % av fólkinum í Føroyum í Streymoy annars. Streymoy annars umfatar 8 kommunur í Streymoy[xiii] og harumframt Hests og Nólsoyar Kommunur – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Streymoy annars 31.12.1999**

| **Kommunur** | **Menn** | **Kvinnur** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|
| Haldórsvíkar[i] | 139 | 117 | 256 |
| Saksunar | 14 | 16 | 30 |
| Hvalvíkar[ii] | 189 | 158 | 347 |
| Hósvíkar | 129 | 111 | 240 |
| Kollafjarðar | 507 | 432 | 939 |
| Kvívíkar[iii] | 301 | 258 | 559 |
| Vestmanna | 602 | 608 | 1.210 |
| Kirkjubøar[iv] | 99 | 102 | 201 |
| Hests[v] | 25 | 21 | 46 |
| Nólsoyar | 142 | 117 | 259 |
| **Tilsamans** | **2.147** | **1.940** | **4.087** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Sum víst á myndini niðanfyri hava broytingarnar í fólkatalinum í Streymoy annars síðan 1985 fylgt við broytingunum í fólkatalinum í Føroyum sum heild. Fólkatalið í Streymoy annars var í 2000 komið upp á sama stig sum í 1985.




*Mynd 12. Gongdin í fólkatalinum í Streymoy annars 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein av høvuðsorsøkunum til hesa gongd er, at Streymoy annars í stóran mun er ávirkað av gongdini í høvuðsstaðarøkinum – og vil tað siga, at framgongdin í Tórshavn seinastu árini hevur gagnað Streymoy annars.

## Alders- og kynssamanseting

Eins og aldurspyramidurnar í flestu økjum er heildarmyndin viðvíkjandi aldurspyramiduni fyri Streymoy annars tann, at teir eldru aldursbólkarnir eru vorðnir lutfalsliga størri í tíðarskeiðinum 1989-1999, og teir yngru aldursbólkarnir eru í stóran mun vorðnir lutfalsliga minni. Eitt undantak er tó, at í 1999 vóru fleiri kvinnur í aldursbólkinum 10–19 ár enn í 1989.




Aldurspyramidan fyri Streymoy annars er í heilt stóran mun lík idealtypuni (Suður-Eysturoy), tó at onkur smávegis munur er. T.d. viðvíkjandi aldursbólkinum 30–39 ár, sum er eitt vet minni enn í idealtypuni.

*Mynd 13. Aldurspyramidur fyri Streymoy annars 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Fólkatalið í Streymoy annars er minkað við 251 fólkum í tíðarskeiðinum 1989 til 1999 – og er hetta lutfalsliga ein minni minking í fólkatalinum enn í t.d. Suðuroy og í Sandoyar sýslu. Árinini á føðitíttleika og barnatal eru sostatt eisini heilt ymisk í økjunum.

## Trivnaðarfyritreytir

Umframt at skapa arbeiðstilboð og taka av arbeiðstilboðum í t.d. Tórshavn eru trivnaðarfyritreytirnar avgerandi fyri, hvussu fólk trívist á einum staði.

**Barnaansing, eldrarøkt og aðrar heilsutænastur í Streymoy annars**

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xiv] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Barnagarðar | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Dagrøktarskipan | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Sjúkrahús | 🟢 | – | – | – | – | 🟡 |
| Heilsumiðstøðir | 🟡 | 🟡 | 🟢 | – | 🟢 | – |
| Kommunulæknar | 🟡 | 🔴 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Heilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Skúlaheilsusystrar | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Tannlæknar | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Ljósmóðir | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| Fysioterapi | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟡 |
| Ellisheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Røktarheim | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Eldrasambýli | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| Umlættingarheim | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Heimarøktin | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Sambýli | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| Vardir verkstaðir | 🟢 | – | 🟡 | – | 🟡 | 🟡 |
| Dagtilhald | 🟢 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| Onnur serviðgerð, stovnar o.a. | 🟢 | 🔴 | 🔴 | 🔴 | 🟡 | 🟡 |

*Barnaansing*

Í kreppuárunum høvdu barnaansingarskipanirnar í fleiri av kommununum í økinum hug at tódna burtur í onki, men í dag hava flestu kommunurnar egnar dagrøktarskipanir, ella hava tær avtalu við grannakommunu um at keypa pláss. Í Kvívík hava vøggustova og barnagarður nú avloyst dagrøktina, og tað tykist, sum hetta eisini verður gongdin aðrastaðni. Samanumtikið má økið sigast at vera hampuliga væl fyri, hvat nøktan av tørvinum á barnaansing viðvíkur.

*Heilsurøkt*

Sjúkrahús er, øllum kunnugt, ikki í økinum, so her er Landssjúkrahúsið álitið. Kommunurnar í økinum hoyra til Eiðis og Vestmanna læknadømi, og læknaviðtala er á Oyrabakka, í Kollafirði, Kvívík og Vestmanna. Skúlaheilsutænastan verður røkt av kommunulæknunum. Í eystara parti av økinum hevur tænastan ikki verið nøktandi, men nú Eiðis læknadømi í næstum verður styrkt við einum lækna aftrat, sum skal halda til á Oyrabakka, eru útlit til, at neyðuga orkan til skúlaheilsutænastuna verður tøk.Tannrøktin fyri tey 0-16 ára gomlu er antin beinleiðis kommunal ella verður framd hjá sjálvstøðugum tannlæknum, har kommunurnar bera kostnaðin. Tænastan er á høgum stigi.

*Eldrarøkt*

Ellis- og røktarheim er í løtuni ikki í økinum, og kommunurnar hava keypt sær ellis- og røktarheimspláss uttan fyri økið, eins og hinar kommunurnar í økinum hava útvegað borgarum pláss í eldrasambýlunum í Kollafirði og Vestmanna, sum vórðu sett á stovn fyri nøkrum árum síðani.

Eitt kommunalt tiltak fyri at fá bygt eitt ellis- og røktarheim í felagskommunalum høpi í Sundalagnum er komið væl ávegis, tekningar o.t. liggja tøkar, og arbeitt verður nú við fíggingarspurninginum, og spurninginum um hvønn leiklut landskassin skal hava.

Einstøk umlættingarpláss eru í sambandi við eldrasambýlini, men skipað dagtilhald fyri eldri finst ikki.

Økið er sjálvsagt við í almennu heimarøktarskipanini, men serstakliga í mun til tey minst sjálvhjálpnu eru skipanirnar á eldrarøktarøkinum langt frá nøktandi. Trongir játtanarkarmar og rationaliseringskrøv hava avmarkað heimarøktina, sum nærum bara kann loysa tær praktisku uppgávurnar. Vantandi ellis- og røktarheimsplássini hava eisini við sær, at uppgávan hjá eldrasambýlunum í stóran mun er vorðin ein onnur, enn teimum upprunaliga var tilætlað.

Á eldrarøktarøkinum eru umstøðurnar í Norðstreymoy als ikki nøktandi. Og hvat viðvíkur vardum verkstøðum, íbúðum til menningartarnað osfr., so er ógvuliga tómligt á økinum.

**Mentanar- og frítíðartilboð í Streymoy annars**

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xv] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fræls ítrótt** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Pensjónistafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fornminnafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Listarfeløg** | 🟡 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Mentanarhús** | – | 🟡 | – | 🟡 | 🔴 | 🔴 |
| **Dansifeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sjónleikarfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Bygdafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟢 |
| **Ungmannafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🔴 | 🟡 | 🔴 | 🟢 |
| **Skótar** | 🟡 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sangur & tónleikur** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Andligt virksemi** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 |
| **Kykmyndahøll** | 🟢 | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Klubbavirksemi** | 🟡 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Matstovur** | 🟡 | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |

## Mentan og frítíð

Nakrar ítróttargreinar – serliga hondbóltur, kappróður og borðtennis - eru rættiliga væl umtóktar í økinum. Bert ein ítróttarhøll er í økinum. Hon er í Vestmanna, men farið er undir at byggja eina ítróttarhøll í Kollafirði eisini. Hetta hevur sett mark fyri úrvalinum av innandura ítróttargreinum. Stórur tørvur er á graslíkisvøllum, og í ávísan mun eru tað fótbóltsfeløgini í Tórshavn, sum taka ímóti fótbóltsáhugaða ungdóminum í økinum. Til ber at svimja í størru skúlunum, men hyljarnir standa ikki altjóða mát. Ítróttarfeløg eru í fleiri bygdum, talvfeløg í einstøkum bygdum.

Musikkskúlin hevur deild í Norðstreymoy, men tilboðini eru ikki altíð so fjølbroytt.

Hóast øllum kommunum sambært lóg er áløgd skylda at hava fólkabókasavn, so eru tað nærum bara tær størstu kommunurnar, sum lúka hetta krav, og ofta vera fólkabókasavn og skúlabókasavn rikin saman og undir somu lon.

Kykmyndahøll er ongin í Norðstreymi, heldur ikki gistingarhús, og einasta matstova í økinum er í Vestmanna.

Samanumtikið eru skipaðu frítíðar- og mentanartilboðini í økinum kanska ikki so øgiliga nógv og fjølbroytt, og hóast eitt ávíst frítíðar- ella mentanartilboð er at finna í økinum, so skulu fólk í flestu bygdum av bygdini fyri at kunna luttaka. Fyri fleiri av tiltøkunum/tilboðunum er eisini galdandi, at aktivitetsstigið er svingandi ár um ár. Í yvirlitinum omanfyri skal guli liturin soleiðis ofta heldur takast sum tekin um, at tilboðið bert finst í einstøkum bygdum og ikki er so lætt atkomuligt, heldur enn at góðskan á sjálvum tilboðnum kann sigast at vera lág.

Fólk í norðara parti av Streymoy hava tó í mun til onnur øki í landinum lutfalsliga stutt til tey frítíðar- og mentanartilboð, sum bara eru í Havnini, og hjá íbúgvunum í pørtum av Norðstreymoy er stytri til Havnar enn til aðrar bygdir í økinum.

## Framrokningar av fólkatalinum

Búskapargongdin í Streymoy sum heild, herundir eisini í ’Streymoy annars’, hevur ein greiða ávirkan á, hvussu gongdin í fólkatalinum verður komandi 25 árini. Um verandi gongd heldur fram, er tað sum so bara ein spurningur um, hvussu stórur vøksturin í fólkatalinum í ’Streymoy annars’ verður.

Í myndini niðanfyri eru framrokningar av gongdini í fólkatalinum í Streymoy annars undir ymiskum fyritreytum. Um gongdin verður heilt góð – sum í Suður-Eysturoy –, kann fólkatalið koma upp á umleið 5.800 fólk í 2024.




*Mynd 14. Fólkatalið í Streymoy annars framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Sannlíkt er, at gongdin í Streymoy annars verður betri, enn hon hevur verið seinastu árini, hetta orsakað av at góða undirstøðukervið (infrastrukturin) í økinum gevur góðar møguleikar fyri pendling – t.e. at ein kann búgva í einari kommunu og arbeiða í aðrari. Tískil er eisini góður møguleiki fyri, at partur av vøkstrinum í Tórshavnar Kommunu verður fluttur út um kommunumark, skilt soleiðis, at fólk fara at búseta seg í øðrum kommunum i Streymoy, ið ikki hava trupulleikar viðvíkjandi eitt nú barnaansing, og so ferðast til arbeiðis í Tórshavn.

- Broytingin í fólkatalinum o.ø. í Streymoy annars líkist nógv tí, íð hevur verið galdandi fyri landið sum heild.
- At økið sum so er eitt uppland hjá Tórshavn, hevur ført við sær, at menning í Streymoy annars í stóran mun hevur verið tongd at menningini í Tórshavn. Tað vælútbygda undirstøðukervið gevur eisini fólki í økinum góðar møguleikar at brúka mentanar- og frítíðartilboðini í allar Streymoy - og partvís eisini í Eysturoy.
- Eyðsæð er, at kommunur í økinum hava góðar møguleikar at bjóða seg fram sum bústaðarkommunur hjá fólki, ið arbeiða í Tórshavn - hetta serliga um kommunurnar megna at bjóða nøktandi tænastur á eitt nú barnaansingarøkinum.

# Suður-Eysturoy

Suður-Eysturoy er tann parturin av Føroyum, sum saman við Tórshavn hevur ment seg skjótast eftir búskaparkreppuna fyrst í 1990-árunum. Ein av høvuðsorsøkunum til hetta er tað fjøltáttaða vinnulívið, sum er í hesum partinum av landinum.

Í Fuglafirði verður t.d. serliga virkaður uppsjóvarfiskur, í Gøtu er saltfiskaframleiðsla og laksasláturvirki, í Runavík er eitt vanligt flakavirki, sum er partur av Føroya Fiskavirking, umframt laksavirki og landingarmiðstøð, á Toftum er saltfiskaframleiðsla á virkinum hjá Føroya Fiskavirking, umframt at uppboðssølan eisini hevur heimstað har. Afturat hesum er nógv annað ídnaðarvirksemi í økinum, samstundis sum nógv handils- og tænastuvinna er á eystara armi á Skálafirði.

Afturat tí virksemi sum er tongt at fiski- og alivinnuni, hevur hesin parturin av landinum eisini megnað at fáa veruliga gongd á aðra framleiðslu, serliga innan maskinídnaðin. Í Suður-Eysturoy er vinnulívið munandi meiri fjølbroytt enn aðrastaðir í landinum. At pláss er fyri nógvum ymiskum fakbólkum í økinum hevur stóran týdning fyri í hvønn mun fólk velja at búgva í økinum, og sæst hetta beinleiðis aftur í tí vøkstri í fólkatalinum, sum Suður-Eysturoy hevur havt seinastu árini.

Í Suður-Eysturoy búðu við árslok 1999 8.434 fólk, og svarar hetta til góð 18,5 % av fólkinum Føroyum. Í 1950 búðu útvið 17 % av fólkinum í Føroyum í syðra parti av Eysturoy, og er hetta saman við Klaksvík og Tórshavn tann einasti partur av landinum, ið er vorðin størri í prosentum av samlaða fólkatalinum í mun til 1950.

Í Suður-Eysturoy eru 7 kommunur – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Suður- Eysturoy 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Fuglafjarðar[i] | 798 | 699 | 1.497 |
| Leirvíkar | 421 | 397 | 818 |
| Gøtu[ii] | 494 | 465 | 959 |
| Nes[iii] | 595 | 523 | 1.118 |
| Runavíkar[iv] | 1.262 | 1.149 | 2.411 |
| Sjóvar[v] | 520 | 486 | 1.006 |
| Skála[vi] | 328 | 297 | 625 |
| **Tilsamans** | **4.418** | **4.016** | **8.434** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Í kreppuárunum í fyrri hálvu av nítiárunum, fylgdi gongdin í fólkatalinum í Suður-Eysturoy í stóran mun gongdini í fólkatalinum í Føroyum sum heild – og fólkatalið minkaði við fleiri enn 700 fólkum frá 1990 til 1996, tá vend kom í.

Seinastu árini hevur vøksturin í fólkatalinum í Suður-Eysturoy verið størri enn í landinum sum heild, og er orsøkin fyrst og fremst ein stór tilflyting til økið.







*Mynd 15. Gongdin í fólkatalinum í Suður-Eysturoy 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Eins og ein stór minking í fólkatalinum er ein trupulleiki fyri eitt øki, so kann ein ov stórur vøkstur eisini skapa ymiskar trupulleikar. Í Tórshavn hava seinastu árini verið stórir trupulleikar av ov fáum barnaansingarplássum – og kemur hesin trupulleiki einans av einum ov skjótum vøkstri í fólkatalinum, sum stóra tilflytingin til Tórshavnar hevur skapt. Suður-Eysturoy er við at fáa somu trupulleikar sum Tórshavn, m.a. herðast krøvini um at útbyggja fólkaskúlan og at nøkta tørvin á barnaansingarøkinum.

## Alddurs- og kynssamanseting

Búskaparkreppan í 1990-árunum hevur eisini havt ávirkan á aldurs-og kynssamansetingina í Suður- Eysturoy, tó at henda ávirkan ikki hevur verið eins stór og í øðrum pørtum av landinum. Heildarmyndin er, at aldursbólkarnir 30 ár og eldri lutfalsliga eru vorðnir størri, og aldursbólkarnir yngri enn 30 ár eru minkaðir – tó við undantaki av kvinnum, ið eru yngri enn 10 ár.




*Mynd 16. Alduspyramidur fyri Suður-Eysturoy 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Tilflytingin til Suður-Eysturoy seinastu árini hevur sjálvsagt havt eina greiða ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina. Hetta gerst serliga sjónligt, um alduspyramidan verður samanborin við alduspyramiduna fyri Suðuroy, har manglandi tilflyting hevur ført við sær, at broyting í summum aldursbólkum, sum stóðst av fráflyting í fyrri helvt av 1990-árunum, ikki er útjavnað aftur orsakað av tilflyting seinastu árini.

## Framrokningar av fólkatalinum

Uttan mun til um væntað verður, at tað fer at gangast verri í Suður-Eysturoy í komandi árum, ella um tað fer at ganga betur, so kann væntast, at fólkatalið veksur munandi komandi árini - og eins og víst í myndini niðanfyri, tykist spurningurin bara vera, hvussu stórur hesin vøkstur verður.



*Mynd 17. Fólkatalið í Suður-Eysturoy framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Mest sannlíka framrokningin av fólkatalinum vísir, at fólkatalið í Suður-Eysturoy – við støði í verandi gongd viðvíkjandi burðaravlopi og eini minking í tilflytingini í komandi tíðum – fer at vaksa so nógv, at tað verða fleiri enn 11.000 fólk í økinum í 2024. Hetta er ein vøkstur, sum svarar til góð 30 %, og hetta fer at føra við sær, at sløk 20 % av fólkinum í landinum fara at búgva í Suður- Eysturoy í 2024, í mun góð 18,5 % við árslok í 1999.

- Suður-Eysturoy kann í stuttum lýsast sum eitt "vakstrarøki". Hesin veruleiki er eisini sjónligur, tá hugt verður at vøkstrinum í fólkatalinum. Ein av høvuðsorsøkunum til hetta er eitt fjøltáttað vinnulív, samstundis sum eitt gott undirstøðukervi hevur skapt góðar fyritreytir fyri vinnuligari menning.
- Størstu avbjóðingarnar fyri økið í næstu framtíð tykjast vera at skapa fleiri pláss viðvíkjandi barnaansing og eldrarøkt. Tað sama er galdandi fyri mentanar- og frítíðartilboð. Harumframt verða sett størri krøv til hesi viðurskifti í framtíðini, og er hetta m.a. ein avleiðing av einum ov skjótum vøkstri, hvat fólkatali viðvíkur.

# Norður-Eysturoy

Um vit samanbera Norður-Eysturoy við syðra partin av oynni, eru tað heilt onnur viðurskifti, sum her eru galdandi. Bygdirnar í økinum eru lutfalsliga smáar, og kommunalu eindirnar eru somuleiðis smáar í mun til í syðra parti av Eysturoy. Vinnustrukturin í økinum vísir, at fólk her liva av tí, sum sjógvurin gevur.

Tey seinastu árini hava bygdir sum Oyrarbakki, Oyndarfjørður og Eiði klára seg rættuliga væl vinnuliga sæð. Á Oyrarbakka hava tey í nógv ár havt eitt nútíðarhóskandi rækjuvirki, og Oyndar-fjørður hevur stórt ali– og kryvjivirksemi. Á Eiði hevur umframt fiskivinnuna á sjógvi og landi annað virksemi tikið seg upp seinastu árini. Hetta er serliga innan maskinídnað og ídnað annars. Lutfalsliga nógv vinnuligt virksemi er somuleiðis norður gjøgnum Sundalagið Eysturoyarmegin.

Av almennari fyrisiting og útbúgvingartilboðum er tó nærum einki í økinum. Tað er í sunnaru helvt av Eysturoy og í Tórshavn, at vit finna ta umsiting og teir útbúgvingarmøguleikar, sum Norður- Eysturoy kann gagnnýta. Hesin trupulleiki er tó ikki serliga stórur í mun til aðrastaðir í landinum, tí møguleikarnir at ferðast eftir ”meginlandinum” eru góðir, báði tá ið talan er um Eysturoy og miðstaðarøkið.

Í Norður-Eysturoy búðu við árslok 1999 1.562 fólk, og svaraði hetta til sløk 3,5 % av Føroya fólki. Í 1950 búðu fleiri enn 5 % av fólkinum í Føroyum í hesum parti av Eysturoy. Í Norður-Eysturoy eru 6 kommunur – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Norður-Eysturoy 31.12.1999**

| **Kommunur** | **Menn** | **Kvinnur** | **Tilsamans** |
|---|---:|---:|---:|
| Eiðis[i] | 362 | 325 | 687 |
| Sunda[ii] | 248 | 207 | 455 |
| Funnings | 50 | 45 | 95 |
| Gjáar | 29 | 29 | 58 |
| Oyndarfjarðar | 89 | 76 | 165 |
| Elduvíkar[iii] | 62 | 40 | 102 |
| **Tilsamans** | **840** | **722** | **1.562** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Broytingin í fólkatalinum í Norður-Eysturoy hevur verið nakað tann sama sum í Føroyum sum heild seinastu 15 árini, tó at fólkatalið í Norður-Eysturoy í sept. 2000 enn var nøkur prosent lægri enn í 1985.







*Mynd 18. Gongdin í fólkatalinum í Norður-Eysturoy 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Ein av orsøkunum til hesa gongd er, at Norður-Eysturoy er uppland hjá Suður-Eysturoy og sum so eisini hjá Tórshavnarøkinum. Tað vil siga, at fólk í økinum hava kunnað leitað sær arbeiði í eittnú Suður-Eysturoy og í Tórshavn, tá ov fá arbeiðstilboð hava verið í Norður-Eysturoy. Ein onnur orsøk er, at alivinnan er lutfalsliga væl fyri í økinum, umframt at flakavirkið á Eiði aftur er farið í gongd, eftir at tað var afturlatið í eitt tíðarskeið.

## Alburs- og kynssamanseting

Minking í fólkatalinum í kreppuárunum er enn sjónlig í aldurspyramiduni fyri Norður-Eysturoy. Serliga er hetta galdandi fyri minkingina í aldursbólkinum 20-29 ár.




Tá aldurspyramidan fyri Norður-Eysturoy verður samanborin við idealtypuna (Suður- Eysturoy) sæst, at tær eru líkar, hvat teimum yngru aldursbólkunum viðvíkur. Ein tann størsti munurin er annars, at aldursbólkurin 20–29 ár er væl minni enn í idealtypuni.

*Mynd 19. Aldurspyramidur fyri Norður-Eysturoy 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Viðvíkjandi teimum yngru aldursbólkunum er at siga, at teir eru lutfalsliga stórir. Vert er at nevna, at aldursbólkurin 20-29 ár í 1999 er eins stórur og aldursbólkurin 10-19 ár í 1989. Sostatt er aldursbólkurin 10-19 ár í 1989 ikki merktur stórvegis av kreppuárunum - og kann tí

væntast, at tann lutfalsliga lítli aldursbólkurin 20-29 ár í 1999 ikki gerst ein varandi trupulleiki.

## Framrokning av fólkatalinum í Norður-Eysturoy

Í mun til gongdina í fólkatalinum frá 1995 til 1998, tá ið tað var ein lutfalsliga stórur vøkstur í fólkatalinum, hevur gongdin verið jøvn seinastu 2-3 árini tó við einum lítlum vøkstri í fólkatalinum. Hóast hetta verður væntað, at fólkatalið veksur í komandi tíðum - og tykist hetta eisini at vera ein sjálvsøgd gongd, við tað at ein vinnulig menning er farin fram í Norður-Eysturoy, samstundis sum økið virkar sum uppland hjá vakstrarøkinum í landinum.




*Mynd 20. Fólkatalið í Norður-Eysturoy framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Uttan mun til hvussu gongdin verður - út frá gongdini seinastu árini - so verður ein vøkstur í fólkatalinum í Norður-Eysturoy. Um tað gongst heilt væl í økinum, kann fólkatalið koma upp á 2.135 í 2024. Ein miðalgongd við eini tilflyting á sama stigi sum seinastu árini, fer at føra við sær ein vøkstur til tilsamans 1.888 fólk. Ein lítil fráflyting førir til, at fólkatalið verður 1.690 í 2024.

Við vinnumenningini í huga og tá tikið verður inn í myndina, at tað uttan størri hóvastták ber til at arbeiða í Suður-Eysturoy ella í Tórshavn og búgva í Norður-Eysturoy, so er tað ikki óhugsandi, at vøksturin í fólkatalinum fer at liggja millum ta gulu og grønu linjuna í myndini omanfyri.

- Norður-Eysturoy hevur eins og Streymoy annars ávísar fyrimunir av at vera uppland hjá vakstrarøkjunum Suður-Eysturoy og Tórshavn. Ikki tað, vinnumenning í hesum partinum av landinum hevur eisini verið sjónligur seinastu árini við m.ø. eini sterkari alivinnu, samstundis sum flakavirkið á Eiði er latið uppaftur. Sum heild tykjast fyritreytirnar tí verða góðar fyri einum vøkstri í fólkatalinum.

## Trivnaðarfyritreytir í Eysturoy

Trivnaðarfyritreytirnar í Eysturoy verða viðgjørdar undir einum. Hetta orsakað av at tilboðini í økinum í ein ávísan mun kunnu brúkast av øllum, ið búgva í økinum. Vit hava bygt okkara støðumynd á viðurskiftini í seks ymiskum kommunum í Eysturoy: Runavíkar, Gøtu, Fuglafjarðar, Eiðis, Skála og Stranda Kommunum.

### Barnaansing, eldrarøkt og aðrar heilsutænastur í Eysturoy

Allar tænastur viðvíkjandi barnaansing, eldrarøkt og heilsu (uttan sjúkrahús) eru í Eysturoy. Serliga á eystara armi av Skálafirði eru tilboðini yvirhøvur nøktandi fyri borgaran. Tala vit harafturímóti um aðrar partar av Eysturoy, so er myndin nógvastaðni ein onnur.

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xvi] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | ● (gult) | ● (grønt) | – | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) |
| Barnagarðar | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) |
| Dagrøktarskipan | ● (grønt) | ● (gult) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Sjúkrahús | ● (grønt) | – | – | – | – | ● (gult) |
| Heilsumiðstøðir | ● (gult) | ● (gult) | ● (grønt) | – | ● (grønt) | – |
| Kommunulæknar | ● (gult) | ● (reytt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Heilsusystrar | ● (grønt) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Skúlaheilsusystrar | ● (grønt) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Tannlæknar | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Ljósmóðir | ● (grønt) | ● (gult) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) | ● (gult) |
| Fysioterapi | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) | ● (grønt) | ● (reytt) | ● (gult) |
| Ellisheim | ● (reytt) | – | ● (gult) | – | ● (reytt) | ● (gult) |
| Røktarheim | ● (reytt) | – | ● (gult) | – | ● (reytt) | ● (gult) |
| Eldrasambýli | ● (grønt) | ● (grønt) | – | ● (gult) | ● (grønt) | ● (gult) |
| Umlættingarheim | ● (reytt) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) |
| Heimarøktin | ● (grønt) | ● (grønt) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) | ● (gult) |
| Sambýli | ● (grønt) | – | – | – | ● (reytt) | ● (gult) |
| Vardir verkstaðir | ● (grønt) | – | ● (gult) | – | ● (gult) | ● (gult) |
| Dagtilhald | ● (grønt) | – | ● (gult) | – | ● (reytt) | ● (gult) |
| Onnur serviðgerð, stovnar o.a. | ● (grønt) | ● (reytt) | ● (reytt) | ● (reytt) | ● (gult) | ● (gult) |

*Barnaansing í økinum*

Innan økini barnaansing (stovnar og dagrøkt) sær út til at standa væl til í allari Eysturoy. Barnagarðar og vøggustovur eru í Runavík, Gøtu og Fuglafirði. Í hinum trimum kommununum er dagrøktarskipan, og lata tey væl at hesum skipanum í øllum trimum kommununum. T.d. hevur Eiðis Kommuna eisini frítíðaransing fyri skúlabørn upp til 10 ára

aldur, og á Strondum eru børnini í skipanini, til tey eru 9 ár ella liðug við 2.flokk í barnaskúlanum.

*Heilsumiðstøðir við nógvum tilboðum*

Sum sagt, er einki sjúkrahús í Eysturoy, men harafturímóti eru heilsumiðstøðir í fýra av teimum seks kommununum, sum vit hava við í okkara lýsing av Eysturoy. Skáli og Eiði hava ikki heilsumiðstøð í kommununi, men langt er ikki til tær næstu, sum eru á Strondum og á Oyrarbakka. Tænastur, sum eru til taks á hesum miðstøðum, eru í flestu førum: Kommunulæknar, heilsusystrar, tannlæknar, vøddamýkjarar, fótarøkt o.a.

*Eldrarøktin er ymisk í økinum*

Eldrarøktin tykist verða ein lutfalsliga stórur trupulleiki í Eysturoy. Stovnar og skipanir, ið hava við eldrarøkt at gera í økinum, eitt nú ellisheim, røktarheim, umlættingarheim og heimarøkt, fáa øll sera ivasamt skoðsmál í Eysturoy. Bert eldrasambýlini sleppa undan reyðum og gulum blettum í yvirlitinum omanfyri, tá ið talan er um eldrarøkt. Størsti trupulleikin í sambandi við raksturin av Ellis- og Røktarheiminum í Eysturoy er, at brúkararnir gerast alsamt eldri og verri fyri, og førir hetta við sær, at brúkararnir krevja meiri og meiri røkt og tískil meiri arbeiðsorku. Men játtanin fylgir ikki við økta arbeiðstrýstinum.

*Tilboð til borgarar, ið ikki eru fullførir*

Stovnar og skipanir, ið skulu taka sær av teimum, sum ikki eru fullfør, fáa heldur ikki gott skoðsmál í lýsingini omanfyri. T.d. fær eingin av hesum stovnum ein grønan blett út fyri sítt virksemi. Verður sæð burtur frá Runarvíkarøkinum, so hevur Eysturoy eitt sera avmarkað úrval av tilboðum til eittnú sálarliga- og/ella likamliga menningartarnað.

*Aðrir viðgerðarhættir*

Støðan í Eysturoy er heldur ikki serliga góð, tá ið talan er um onnur sertilboð og aðrar viðgerðarhættir. Her er tað tó ein hjálp, at økið hevur fast samband til Tórshavnar, sum hevur nógv tey flestu og fjølbroyttu tilboðini, tá ið talan er um viðgerðarhættir. Hetta hevur samband við, at Landssjúkrahúsið liggur í økinum.

*Samanumtikið*

Samanumtikið kann sigast, at Eysturoy í løtuni er væl fyri, hvat viðvíkur barnaansing og heilsurøkt. Tó kann tann stóri vøksturin í økinum føra til, at barnansingin innan stutta tíð gerst ein trupulleiki. Innan eldrarøktina er neyðugt við tiltøkum, báði viðvíkjandi støðuni sum er og ikki minst framyvir.

## Mentanar- og frítíðartilboð

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xvii] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fræls ítrótt** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Pensjónistafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fornminnafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Listarfeløg** | 🟡 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Mentanarhús** | – | 🟡 | – | 🟡 | 🔴 | 🔴 |
| **Dansifeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sjónleikarfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Bygdafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟢 |
| **Ungamannafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🔴 | 🟡 | 🔴 | 🟢 |
| **Skótar** | 🟡 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sangur & tónleikur** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Andligt virksemi** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 |
| **Kykmyndahøll** | 🟢 | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Klubbavirksemi** | 🟡 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Matstovur** | 🟡 | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |

*Skipað mentanar- og frítíðartilboð í Eysturoy*

Ítróttarhallir eru í helvtini av teimum kommunum, sum eru við í hesi kanning av skipaðum frítíðar- og mentanartilboðum í Eysturoy, nevniliga í Fuglafirði, Runavík og á Skála.

Harafturat eru Gøta og Strendur við til at gjalda og nýta hallirnar í ávikavist Kambsdali og á Skála. V.ø.o. er bert ein av seks kommunum, ið ikki hevur beinleiðis og/ella sera lagaliga atgongd til eina ítróttarhøll nærhendis.

*Fyrsti grasvøllurin og nógvir graslíkisvøllir*

Tá ið teir nýggju graslíkisvøllirnir komu til Føroya, vóru eysturoyingar millum teir fyrstu, sum tóku á seg hesa avbjóðing. Eisini er vert at nevna, at eysturoyingar vóru teir fyrstu, sum tóku stig til, at ein altjóða góðkendur vøllur varð bygdur í landinum. Hetta gjørdist veruleiki, tá ið toftamenn løgdu nýggjan grasvøll á Svangaskarði mitt í 1990-árunum.

Graslíkisvøllir eru í øllum seks kommununum, og hava hesir sera stóran týdning fyri trivnaðin hjá ungum sum eldri í allari Eysturoy. Onkrir av hesum eru tó við at gerast heldur gamlir, og standa kommunurnar sostatt fyri at skula gera eina stóra íløgu á hesum øki í næstu framtíð.

*Lagalig atgongd til ítróttarhallir*

Í mun til tann veruleika, at fimm av seks kommunum hava sera lagaliga atgongd til ítróttarhallir, er tað vert at nevna, at flogbóltsfeløg, badmintonfeløg og borðtennisfeløg, sum øll kunnu húsast í ítróttarhøllum, eru sera illa umboðað í økinum. Hesin veruleiki kann geva ábendingar um, at tað ikki einans er talan um at hava teir fysisku karmarnir í lagi, men at tað eisini krevst, at onkur leggur lag á og ikki minst, at traditión er fyri ítróttini í økinum.

*Onnur ítrótt*

Ítróttargreinarnar kappróður og fimleikur eru heilt væl umboðaðar í økinum, sæð í mun til landið sum heild. Nú eru einar 10 bátsmanningar kring Skálafjørðin farnar at byggja nýtt kappróðrarneyst, soleiðis at hølisumstøðurnar standa ájavnt við áhugan fyri hesi ítróttargrein. Fimleikur hevur eisini verið eitt eyðkenni fyri Runavík, meðan ”smáar” ítróttargreinar, sum t.d. biljard, bridge, dart, talv og fræls ítrótt, tykjast hava sera avmarkaða undirtøku í økinum.

*Kvøldskúlavirksemi og andligt virksemi*

Tá ið talan er um andligt virksemi, sang, tónleik og kvøldskúlatilboð, er Eysturoy millum tey fremstu økini í landinum. Í sambandi við kvøldskúlavirksemi er tað ein stórur fyrimunur, at tað er koyrandi millum Tórshavnar og Eysturoyar; hetta serliga tá ið hugsað verður um lærarar. Nógv barna- og samkomukór eru eisini í økinum - ikki minst á vestara armi av Skálafirði. Hinvegin verður lutfalsliga lítið gjørt við t.d. matstovu- og klubbavirksemi, einasti vanligi klubbin í økinum er Fuglafjarðar Klubbi.

*Samanumtikið*

Samanumtikið er Eysturoy helst millum tey øki í landinum, sum eru frægast fyri, tá ið talan er um tilboð innan mentan og frítíð. Ein annar avgerandi fyrimunur fyri økið er eisini, at lutfalsliga lagalig atgongd er til tilboð í Tórshavn. Hetta ger, at borgarar í Eysturoy eisini

kunnu nýta tilboð, sum bara eru til staðar í høvuðsstaðarøkinum. Hetta er ein fyrimunur, sum ikki er galdandi fyri nógv onnur øki kring landið.

# Norðoyaøkið

Norðoyaøkið er eitt lutfalsliga ”fløkt” hugtak at arbeiða við. Har er Klaksvík, sum næststørsta pláss í landinum, og har eru fleiri smærri oyggjar, nakrar fysiskt bundnar upp í Klaksvík og aðrar ikki. Klaksvíkarøkið fevnir um Klaksvíkar- og Hvannasunds kommunu, og fevna Norðoyggjar annars so um írestandi partin av Norðoyggjum. Hetta sundurbýti inniber, at Norðoyggjar annars og Klaksvíkarøkið verða viðgjørd hvør sær, hetta tó mest galdandi í hagtalsligum høpi.

Klaksvíkarøkið er bæði búskaparliga og vinnuliga nógv betur fyri enn Norðoyggjar annars. Hetta kemst serliga av teimum landafrøðiligu fyrimununum, ið hetta økið hevur fram um tær smáu oyggjarnar. Í vinnuligum høpi er Klaksvíkarøkið drívmegin í Norðoyggjum, har fiskivinnan er sjálvur aksin, sum vinnuliga virksemið í økinum melur um. Tað er eisini í Klaksvík, at umsitingin og útbúgvingarmøguleikarnir í økinum eru.

Ein trupulleiki, sum Norðoyggjar tykjast at hava, er at sambandið millum Klaksvíkarøkið og hinar partarnar í økinum ikki er nøktandi. Ikki einans tá ið talan er fysiska undirstøðukervið (t.e. vegir, ferjur osfr.), men eisini í sambandi við t.d. almanna- og heilsutænastur yvirhøvur. Ein greið lokal- og landspolitisk uppgáva má vera at fáa Norðoyggjar at virka sum eina funktionell eind, har borgarin kann rokna við eins tænastustigi, uttan mun til hvar í økinum hesin hevur valt at búgva.

# Norðoyggjar annars

Í Norðoyggjum annars búðu við árslok 1999 691 fólk, og svarar hetta til gott og væl 1,5 % av fólkinum í Føroyum. Í 1950 búðu útvið 3,5 % av fólkinum í Føroyum í hesum parti av landinum.

Í Norðoyggjum annars eru 6 kommunur – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Norðoyggjum annars 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Fugloyar[i] | 27 | 13 | 40 |
| Svínoyar | 33 | 26 | 59 |
| Viðareiðis | 176 | 142 | 318 |
| Kunoyar[ii] | 76 | 60 | 136 |
| Mikladals[iii] | 39 | 39 | 78 |
| Húsa[iv] | 31 | 29 | 60 |
| **Tilsamans** | **382** | **309** | **691** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Prostentbroytingin í fólkatalinum í Norðoyggjum annars fylgir als ikki broytingini í Føroyum sum heild. Sæð í mun til fólkatalið í 1985 hevur gongdin í fólkatalinum í Norðoyggjum annars verið positiv, skilt soleiðis, at fólkatalið ongantíð er farið niður um fólkatalið í 1985.







*Mynd 21. Gongdin í fólkatalinum í Norðoyggjum annars 1985 - 31. okt 2000; og samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Gongdin í fólkatalinum í Norðoyggjum annars vísir, at gongdin í fólkatalinum í smáoyggjunum í Føroyum hevur lítið samband við gongdina í landinum sum heild. T.d. er

fólkatalið í Norðoyggjum annars minkað munandi síðan 1950, meðan fólkatalið í Føroyum sum heild er vaksið. Ein av orsøkunum til hetta er, at talan er um hvør sítt slag av lokalbúskapi: Har gongdin í t.d. Sumba hevur verið nær tongd at gongdini í eittnú fiskiídnaðinum í Vági, er gongdin á smáplássum sum t.d. Svínoy og Mikladali tongd at smáfiskiskapi og landbúnaði á staðnum og ikki at gongdini í Klaksvík.

### Aldurs- og kynssamansetingar

Ein aldurspyramida í prosentum, ið er grundað á eitt øki við lítlum fólkatali, kann geva stór sveiggj, hóast talan bara er um eina heilt lítla minking í tølum.




Sum heild er trupult at gera nakrar saman-beringar við eina aldurspyramidu, ið er grundað á eitt so lágt fólkatal sum alduрs-pyramidan fyri 'Norðoyggjar annars' – hetta orsakað av, at ein í tali lítil broyting gevur stór sveiggj í pyramiduni.

*Mynd 22. Aldurspyramidur fyri Norðoyggjar annars 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Tað áhugaverda í aldurspyramiduni fyri Norðoyggjar annars er, at broytingarnar ikki hava verið so stórar - ikki minst tá rákið viðvíkjandi flyting úr bygd í bý verður tikið inn í myndina. Ein minking hevur verið í aldursbólkinum 20-29 ár - og kann hetta fáa eina ávirkan á føðitíttleikan í økinum, sum annars hevur verið støðugur seinastu árini.

## Framrokningar av fólkatalinum

Framrokningar, ið Hagstova Føroya hevur gjørt, vísa, at fólkatalið í Norðoyggjum annars fer at vaksa í komandi tíðum - hetta eisini um ein lítil fráflyting fer at verða úr Norðoyggjum annars.




*Mynd 23. Fólkatalið í Norðoyggjar annars framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Um gongdin verður heilt góð í komandi tíðum, kann fólkatalið koma upp á 966 í 2024; um gongdin verður miðal, kann fólkatalið koma upp á 833, meðan fólkatalið við eini gongd við eini lítlari fráflyting kann koma upp á 739.

### *Viðmerking viðvíkjandi Norðoyggjum annars*

Í hagtalsligum høpi gevur sundurbýtið av Norðoyggjum annars eina 'skeiva' mynd, tí partar av økinum eru landfastir við Klaksvíkarøkið og kunnu sostatt eisini nýta arbeiðs- og trivnaðartilboð í økinum. Rættast hevði uttan iva verðið, at tikið oyggjarnar Svínoy, Fugloy og Kalsoy undir einum - og verður hetta eisini í væl størri mun gjørt í álitinum hjá útoyggjanevndini - tí hesi pláss hava smáar møguleikar at nýta tilboðini í Klaksvíkarøkinum.

# Klaksvíkarøkið

Í Klaksvíkarøkinum búðu við árslok 1999 5.122 fólk, og svarar hetta til fleiri enn 11 % av fólkinum í Føroyum. Í 1950 búðu beint oman fyri 10,5 % av fólkinum í Føroyum í Klaksvíkarøki – og er hetta øki sum nevnt, saman við syðra parti av Eysturoy og Tórshavn tað einasta økið í Føroyum, ið er vorðið størri í prosentparti av samlaða fólkatalinum í Føroyum í mun til tølini frá 1950.

Klaksvíkarøkið umfatar tvær kommunur, Klaksvíkar kommunu og Hvannasunds kommunu. Fólkatalið í Klaksvíkar kommunu var við árslok 1999 4.679 og í Hvannasunds kommunu 443 – sí talvu.

**Fólkatal og kynsbýtið í kommununum í Klaksvíkarøki 31.12.1999**

| Kommunur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Klaksvíkar[i] | 2.440 | 2.239 | 4.679 |
| Hvannasunds[ii] | 231 | 212 | 443 |
| **Tilsamans** | **2.671** | **2.451** | **5.122** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Klaksvíkarøkið varð sera hart rakt av búskaparkreppuni fyrst í 1990-árunum orsakað av, at so stórur partur av vinnuni í økinum er treytaður av fiskiveiðu. Eftir stutta tíð megnaði vinnan tó at fóta sær aftur, og er hendan gongd eisini vorðin sjónlig í einum vøkstri í fólkatalinum.







*Mynd 24. Gongdin í fólkatalinum í Klaksvíkarøki 1985 - 31. okt 2000; samanborin við prosentvísu broytingina í fólkatalinum í Føroyum 1985 - 31. okt. 2000. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Gongdin í fólkatalinum hevur tó ikki verið heilt lík gongdini í landinum sum heild - og gerst hetta serliga sjónligt við tað, at fólkatalið helt áfram at minka, tá gongdin í landinum sum heild vendi. Hinvegin hevur vøksturin í fólkatalinum í Klaksvíkarøki seinastu árini verið lutfalsliga størri enn í landinum sum heild.

### Alldurs- og kynssamansetingar

Størsta broytingin í aldurspyramidunum fyri Klaksvíkarøkið í 1989 og í 1999 er, at aldursbólkurin 20-29 ár er minni í 1999 enn í 1989. Hendan minking tykist ikki verða stór, men tá hugt verður at støddini á aldursbólkinum 19-20 ár í 1989 (tann aldursbólkurin, sum er 20-29 ár í 1999), so er hetta ein munandi minking.




> Tá aldurspyramidan fyri Klaksvíkarøkið verður samanborin við idealtypuna (Suður- Eysturoy), eru tær í ein ávísan mun líkar, tó eru yngstu aldursbólkarnir nakað minni enn í idealtypuni. Hinvegin eru teir eldri aldursbólkarnir eitt lítið vet størri – og er hetta somuleiðis galdandi fyri aldurs-bólkin 40–49 ár.

*Mynd 25. Alduspyramidur fyri Klaksvíkarøkið 1989 - 1999. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Heildarmyndin er annars tann sama sum aðrastaðni í landinum, nevniliga at tyngdin í alduspyramiduni er flutt uppeftir, t.e. at teir eldri aldursbólkarnir eru vorðnir lutfalsliga størri, tó at lítil vandi tykist vera fyri nøkrum strukturellum skeivleika av hesum.

## Framrokningar av fólkatalinum

Væntað verður, at postiva gongdin í fólkatalinum Klaksvíkarøki seinastu árini heldur áfram í næstu framtíð. Harumframt verður eisini væntað, at vøksturin í fólkatalinum í ávísan mun fer at líkjast gongdini í Suður-Eysturoy - tó at tilflytingin væntandi ikki verður eins stór.




*Mynd 26. Fólkatalið í Klaksvíkarøki framroknað undir ymiskum fyritreytum til ár 2024 (Hagstova Føroya, des. 2000)*

Uttan mun til hvør gongdin verður í Klaksvíkarøki, kann væntast - við støði í fyritreytunum seinastu árini - ein munandi vøkstur í fólkatalinum komandi árini. Um tað fer at ganga heilt væl, og tilflytingin verður eins stór og í Suður-Eysturoy, kann fólkatalið koma upp á 7.287 í 2024. Við eini miðal tilflyting kann fólkatalið koma upp á 6.762, meðan ein minni tilflyting ger, at fólkatalið kann vaksa til 6.347 fólk í ár 2024.

## Trivnaðarfyritreytir í Norðoyaøki

Trivnaðarfyritreytirnar í Norðoyaøki verða viðgjørdar undir einum. Sum tað sæst í talvuni, eru bert gulir blettir. Hetta kemst av, at talan eru um Norðoyaøkið og ikki bara Klaksvíkarøkið. Allar tær nevndu tænasturnar eru í Klaksvíkar Kommunu og eru á mangan hátt nøktandi fyri borgaran har. Tala vit harafturímóti um Norðoyaøkið, so er myndin ein heilt onnur. Bert heilt fá tilboð røkka allar oyggjarnar. Har fast samband er, t.e. av Viðareiði, úr Hvannasundi, Norðdepli og Kunoy ber til at koyra til Klaksvíkar og harvið fáa gagn av tilboðunum har. Men tey øki, ið ikki hava fast samband eru avskorin frá møguleikunum.

### Barnaansing, eldrarøkt og onnur heilsutilboð í Norðoyaøki

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xviii] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustovur | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Barnagarðar | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| Dagrøktarskipan | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| Sjúkrahús | 🟢 | – | – | – | – | 🟡 |
| Heilsumiðstøðir | 🟡 | 🟡 | 🟢 | – | 🟢 | – |
| Kommunulæknar | 🟡 | 🔴 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heilsusystrar** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Skúlaheilsusystrar** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Tannlæknar** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Ljósmóðir** | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fysioterapi** | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟡 |
| **Ellisheim** | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Røktarheim** | 🔴 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Eldrasambýli** | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Umlættingarheim** | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Heimarøktin** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Sambýli** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Vardir verkstaðir** | 🟢 | – | 🟡 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Dagtilhald** | 🟢 | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Onnur serviðgerð, stovnar o.a.** | 🟢 | 🔴 | 🔴 | 🔴 | 🟡 | 🟡 |

*Barnaansing*

Vøggustovur: bert í Klaksvík, bíðilisti er til tilboðið. Barnagarðar: bert í Klaksvík, bíðilisti er til tilboðið. Dagrøktarskipan: í Klaksvík, á Viðareiði og í Hvannasundi – ein lítil bíðilisti er til hesi pláss. Kunoyar kommuna hevur í avtalu tryggjað børnunum í kommununi pláss í dagrøktini hjá Klaksvíkar Kommunu.

*Sjúkrahús*

Sjúkrahúsið: eitt nøktandi tilboð í løtuni, ið røkkur allar borgarar í Norðoyggjum, men henda støða er bert fyribils, sum útlitini eru í løtuni. Hetta verður nærri viðgjørt seinni.
Heilsumiðstøðir: ongar í Norðoyggjum

*Kommunulæknaskipanin*

Kommunulæknar: 3 kommunulæknar eru í Klaksvík. Høli og virksemi eru bert í Klaksvík. Har sum fast samband er, vitja kommunulæknarnir sambært avtalu. Kommunulæknarnir koma nærum ongantíð til útoyggjarnar. Sjúklingar av útoyggjunum verða fluttir við strandferðsluni ella tyrluni til Klaksvíkar – í hvørgum av hesum flutningsskipanum eru umstøður at flyta sjúklingar á børu á nøktandi hátt.

*Heilsusystraskipanir*

Heilsusystrar: ein heilsusystir røkir alt Norðoyaøkið, og tað er ógjørligt hjá henni at gera sítt arbeiði nøktandi. Heilsusystirin kemur til bygdirnar, ið hava fast samband, men nærum ongantíð til útoyggjarnar.
Skúlaheilsusystir: er knýtt at skúlunum í Klaksvík, men fer eftir fastari skipan til skúlan á Viðareiði og á Fossanesi. Skúlaheilsusystirin sigur, at henda skipan er alt annað enn nøktandi. Skúlaheilsusystir kemur ikki út til útoyggjaskúlarnar.

*Tannlæknaskipanin*

Tannlæknar: 2 privatir og 1 skúlatannlækni eru í Klaksvíkar Kommunu. Tannlæknaskipanin er nøktandi fyri Klaksvík og bygdirnar, ið hava fast samband, men útoyggjarnar hava einki tannlæknatilboð á staðnum.

*Onnur heilsutilboð*

Ljósmóðir: ljósmóðurskipan er á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og røkkur allar Norðoyggjar. Øll viðtala og kanning fer fram á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, so barnakonur úr útoyggjum noyðast at ferðast til Klaksvíkar til viðtalu.
Fysioterapi: Klaksvíkar Sjúkrahús hevur fysioterapi knýtta at viðgerð á sjúkrahúsinum, afturat hesum er ein privat fysioterapistova í Klaksvík, sum tekur sjúklingar eftir ávísing frá kommunulækna ella serlækna. Ongin fysioterapiviðgerð fæst í øðrum bygdum og í útoyggjunum.

*Eldrarøkt*

Ellisheim: eitt Ellis- og Røktarheim er í Klaksvík. Bíðilisti er til plássini her. Upptøkuøkið er allar Norðoyggjar.

Norðoya Vistarheim er ein bústovnur fyri eldri, upptøkuøkið er allar Norðoyggjar. Bíðilisti er til pláss á vistarheiminum.

*Eldrasambýlið.* Eitt eldrasambýli er í Klaksvík og tekur í høvuðsheitinum eldri úr Klaksvíkar Kommunu, bíðilisti er til eldrasambýlið. Ongi onnur sambýli eru í Norðoyggjum.

Umlættingarheim: Umlættingarheimið Dáin hevur upptøkuøkið allar Føroyar – men upptøkuøkið til frítíðarheimið er Norðoyggjar. Bíðilisti er til pláss í Dáanum.

*Heimarøktarskipanin*

Heimarøktin: talan er um Norðoya Heimarøkt, men røkkur tó bert Klaksvík og tær oyggjarnar, sum hava fast samband. Heimarøktin á útoyggjunum virkar bara, um tað er onkur í bygdini, sum kann átaka sær heimahjálpararbeiðið ella heimasjúkrarøkt, men tað er langt frá nøktandi.
Sambýli: sambýlið fyri autistar er komið í Klaksvík fyri stuttum. Í løtuni verður sambýli fyri downs syndrom og evnaveik bygt í Klaksvík. Hetta fer at hava Norðoyggjar sum upptøkuøki. Fleiri eru á bíðilista til hetta sambýli.

*Tilboð til ófullførar borgarar*

Vardur verkstaður: ein er í Klaksvík, og upptøkuøkið er allar Norðoyggjar, men tað eru bert tey úr Klaksvík og bygdunum við føstum sambandi, ið hava gagn av hesum. Bíðilisti er til pláss á varda verkstaðnum.

Dagtilhald: tvey dagtilhald eru í Klaksvíkar Kommunu, hesi virka væl. Dagtilhald eru ikki aðrastaðni í Norðoyggjum.

*Onnur sertilboð*

Onnur serðviðgerð, stovnar o.a.: á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru fleiri tilboð um serviðgerð, og serlæknar á ymiskum økjum koma á Klaksvíkar Sjúkrahús eftir tørvi.

## Mentanar og frítíðartilboð í Norðoyaøki

| Tilboð | Suðuroy | Sandoyar sýsla | Vága sýsla | Streymoy Annars[xix] | Eysturoy | Norðoyar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ítróttarhallir** | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |
| **Graslíkisvøllir** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fótbóltsfeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🔴 | 🟢 | 🟡 |
| **Hondbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟡 | 🟢 | – | 🟡 |
| **Flogbóltsfeløg** | 🟢 | – | 🟢 | – | 🟢 | – |
| **Badmintonfeløg** | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Borðtennisfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Fimleikarfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟢 | 🟡 |
| **Kappróðrarfeløg** | 🟡 | – | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 |
| **Svimjifeløg** | 🟢 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Fræls ítrótt** | 🟢 | – | 🔴 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Bridgefeløg** | 🟡 | – | 🟢 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Biljardfeløg** | 🟢 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Dartfeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟢 | 🟡 |
| **Talvfeløg** | – | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Ríðifeløg** | – | – | 🟢 | – | 🟡 | 🟡 |
| **Froskmannafeløg** | – | – | 🟡 | – | 🔴 | 🟡 |
| **Pensjónistafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Fornminnafeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Listarfeløg** | 🟡 | – | – | – | 🟡 | 🟡 |
| **Mentanarhús** | – | 🟡 | – | 🟡 | 🔴 | 🔴 |
| **Dansifeløg** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sjónleikarfeløg** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🔴 | 🟡 |
| **Bygdafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🔴 | 🟢 |
| **Ungmannafeløg** | 🔴 | 🟢 | 🔴 | 🟡 | 🔴 | 🟢 |
| **Skótar** | 🟡 | – | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟡 |
| **Sangur & tónleikur** | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Kvøld / frítíðar-skúlar** | 🟡 | 🟡 | 🟢 | 🟡 | 🟢 | 🟡 |
| **Andligt virksemi** | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 | 🟢 |
| **Kykmyndahøll** | 🟢 | – | – | – | – | – |
| **Alnet-kafé** | 🟡 | – | – | 🟡 | 🟡 | 🟡 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Klubbavirksemi** | 🟡 | – | – | – | 🔴 | 🟡 |
| **Matstovur** | 🟡 | 🔴 | 🟡 | 🟡 | 🟡 | 🟡 |

*Skipað mentanar- og frítíðartilboð í Norðoyum*

Viðvíkjandi lýsing av skipaða mentanar- og frítíðarvirkseminum í Norðoyum sambært myndini omanfyri sæst, at ongir grønir litir eru, hóast virksemi er á nærum øllum nevndu økjum.

Orsøkin er, at alt hetta virksemi er í Klaksvík, og røkkur tað tí ikki alt Norðoyaøkið. Einasta skipaða ítróttarvirksemi, ið er utan fyri Klaksvík, er flogbóltur á Fossanesi.

*Bygda- og ungdómsfeløg*

Í nøkrum bygdum er frítíðarvirksemi knýtt at bygda- og ungmannafeløgum. Talan er um hesar bygdir: Árnafjørð, Haraldssund, Viðareiði, Húsar, Mikladal og Kunoy.

Í Fugloy og í Hvannasundi er í umbúna at skipa ella endurreisa bygdarfeløg. Andligt virksemi er skipað í nærum øllum bygdum í Norðoyaøkinum.

*Felagsvirksemi í Klaksvík*

Fyri at taka saman um felagsvirksemi í Klaksvík eru nøkur øki væl fyri, meðan onnur ikki hava góðar umstøður.

*Ítróttarhøll*

Ítróttarhøllin hjá felagnum KÍ er einsamøll um at nøkta tørvin á ítrótti, sum hevur brúk fyri vølli ella høll. KÍ hevur leigað høllina út, men tað er avmarkað, hvussu nógvar tímar og nær høllin er tøk. Fimleikarhallir skúlans verða eisini leigaðar til ítróttarvirksemi, m.a. fimleikarfeløg, flogbóltsfelagið Mjølnir o.o. Ímillum feløgini í býnum er semja um, at tørvur er á einari nýggjari høll til m.a. flogbólt, hondbólt o.t.

*Hølistrupulleikar o.a.*

Tað eru nøkur feløg í Klaksvík, sum hava høli til virksemi, eittnú skótarnir, svimjifelagið, talvfelagið o.s.fr., men fleiri feløg hava onki stað at virka í. Virksemið fer úr einum staði í annað við tí úrsliti, at felagsvirksemið sovnar ella dettur heilt niðurfyri. Ein annar stórur meinbogi fyri felagsvirksemi er fígging. Tað er mangan so tungt at fíggja rakstur og leigu av hølum, at tað mesta av orkuni hjá feløgunum fer til at savna inn pening. Tey halda bingo og skipa fyri øðrum tiltøkum, sum ofta drena felagið fyri sjálvbodna arbeiðsmegi eisini við tí úrsliti, at felagsvirksemið sovnar ella doyr. Badminton, borðtennis og biljard: Hetta eru feløg í Klaksvík, sum hava verið virkin, men sum m.a. orsakað av hølisviðurskiftum ikki hava nakað virksemi longur.

*Mentanarhús*

Klaksvík hevur eitt mentanarhús, virksemið har er avmarkað til tiltøk hjá sjónleikarfelagnum. Trupulleikar við rakstri og fígging av húsinum ger, at húsið ikki virkar eftir endamálinum.

*Andligt virksemi, sangur, tónleikur o.a.*

Viðvíkjandi sangi og tónleiki, sjónleiki, kvøld- og frítíðarskúlum er at siga, at rímiliga nógv virksemi hevur verið í Klaksvík, og umstøðurnar hava verið góðar.
Ongin kykmyndahøll er í Norðoyggjum. Orsøkin er ikki vánalig hølisviðurskifti, men at tann skipanarligi parturin ikki hevur virkað, og fólksliga og politiska undirtøkan fyri at fáa tílíkt virksemi at bera til ikki hevur verið til staðar í nóg stóran mun.

*Klubbavirksemi og matstovur*

Klubbavirksemi og matstovur eru í Klaksvík, sum í rímiliga stóran mun nøktar tørvin í býnum, men dansiviðurskiftini eru vánalig, og møguleikin at skipa fyri øðrum undirhaldi fyri ung og eldri er ikki til staðar.

*Samanumtikið*

Taka vit saman um Norðoyaøkið, so er mesta virksemið í Klaksvík, men allar umstøður eru ikki nøktandi fyri feløgini í Norðoyggjum annars. Bert fá og summastaðni ongi skipaði tiltøk eru í Norðoyggjum annars á omanfyri nevndu økjum.

- Lýsta gongdin í fólkatali, aldurs- og kynssamanseting og framskrivingum av fólkatali í Norðoyggjum sum heild (bæði Norðoyggjar annars og Klaksvíkarøkið) vísir, at økið er í menning á javnt við Føroyar sum heild. Allar framrokningar vísa eina postiva gongd.
- Trivnaðarfyritreytirnar eru til staðar, og er hetta alneyðugt fyri eitt øki, ið er so langt frá miðstaðarøkinum. Trupulleikin er tó, at øll tilboð eru í Klaksvík, og kunnu hesi tilboð í stóran mun bert brúkast av teimum, ið uttan størri hóvasták kunnu ferðast til og úr Klaksvík - t.e. av borgarum í teimum plássum, har koyrast kann til Klaksvíkar.
- Størsta avbjóðing fyri økið er at fáa knýtt oyggjarnar Svínoy, Fugloy og Kalsoy at Klaksvíkarøkinum á ein skilagóðan hátt, soleiðis at tilboðini í Klaksvík í størri mun kunnu verða øllum borgarum í Norðoyggjum til gagns - og ikki bara teimum, ið eru "landfastir" við Klaksvíkarøkið.

# ØKISMENNINGARPOLITIKKUR

## Fyritreyir fyri økismenning

***Betri fysiskt undirstøðukervi – Betri elektroniskt undirstøðukervi – Styrkt útjaðaraøki***

## Fysiska undirstøðukervið og samfelagsligar broytingar tey seinnu árini

Á heimsatlasinum eru Føroyar bara ein evarska lítil prikkur, um tað yvirhøvur er viðmerkt, at Føroyar eru til. Men hóast hetta sera lítla landøki, so hevur fólkið livað spjatt í lutfalsliga nógvum smáum bygdasamfeløgum við sera avmarkaðum dagligum sambandi millum bygdirnar. Soleiðis hevur verið fram til byrjanina av 20. øld, men fólkatalið vaks í stórum, og nú hendi ein miðsavning á teimum størstu fiskaplássunum kring landið. Við hesum varð sjøtul eisini settur á at betra tann fysiska infrastrukturin í landinum.



1996



1950



1970 2000

**Mynd: útbygging av veganetinum frá LF (1916, 1950, 1970 og 2000)**

Síðani eru nógvan broytingar farnar fram í føroyska samfelagnum, ikki minst í sambandi við búskaparliga vøksturin síðani miðskeiðis í sjeytiárunum. Nøkur eyðkenni í hesum broytingum eru:

- Eitt meira sundurgreinað vinnubýti
- Almenna tænstuvirksemið er nógv vaksið
- Kunnleikastigið er hækkað
- Samskiftið millum bygdir og oyggjar nógv batnað

Útbygda samskiftið bygdi yvirhøvur á eina politiska semju um, at so nógv sum gjørligt skuldu hava møguleika fyri at fáa lut í framgongdini og fáa tað har, ið tey búðu. Uttan mun til, hvussu hesin politikkur annars hevur virkað (hugtakið 'bygdamenning' osfr.), kann staðfestast, at henda meginregla í stóran mun hevur forðað fyri eini ógvusligari miðsavning. T.d. øktist fólkatalið í høvuðsstaðnum í mun til samlaða fólkatalið í Føroyum einans úr 30 til 34% í 20 ára skeiðinum frá frá 1970 til 1990 (hvussu er støðan nú?).

Eftir búskaparliga skrædlið fyrst í 90-árunum, sum at kalla hevur avtikið studningsbúskapin, eru tað almenna og vinnulívið farin í holt við eina endurreisn:

- *Innan tað almenna* verða krøvini til politiska raðfesting og fíggjarstýring alsamt herd; hervið verður trýstið større fyri at samskipa og/ella miðsavna almennar tænastur og útbúgvingar.
- *Innan tað privata*, ið nú skal ”hvíla í sær sjálvum”, verður tað alt meiri átrokandi at laga seg til skiftandi kappingar- og samstarvstreytir.

Nakrar avgerandi forskjótingar í kjalarvørrinum á teirri búskaparligu rationalisering, sum er nevnd omanfyri, eru hesar:

- Sjóvegis farmaflutningurin til og úr Føroyum fer í  nógv størri mun enn fyrr um Havnina.
- Fiskivinnan á landi er umskipað við almennari stórfyritøku, uppboðssølu osfr.
- Kappingin millum føroyskar tænastu- og framleiðslufyritøkur á heimamarknaðinum er herd.
- Kunnleikakrøvini og harvið tørvurin á støðugari atgongd til kunnleikaumhvørvi verða alt størri.
- Almennir tænastustovnar kring landið verða spardir niður/burtur (t.d. innan Postverk Føroya).
- Deildirnar hjá fíggjarstovnum í útjaðaranum missa avgerðarrættindi.
- Samstarv millum fyritøkur gerst alt meiri vanligt.

Øll hesi viðurskifti hava við sær, at flutningur av fólki og farmi fær alt størri týdning. Samfelags-menningin stendur á einum vegamóti, soleiðis at tey val, ið nú verða gjørd, fara at fáa avgerandi týdning fyri, hvussu føroyska samfelagið sær út um nøkur ár.

Um mann ikki politiskt velur at ganga aðrar vegir, hevur tað umrødda rationaliseringsrákið við sær, at tað alt meiri verður miðstaðarøkið, sum kemur at mennast, meðan støðið verður máað undan útjaðaraøkjunum kring landið.

Ein gott undirstøðukervi er á mangan hátt avgerandi fyri menningarmøguleikarnar í einum øki. Undirstøðukervið hevur t.d. týdning fyri, um tað er áhugavert at reka vinnuvirksemi í økinum. Harumframt hevur undirstøðukervið eisini týdning fyri, um tað yvirhøvur er áhugavert at búseta seg í økinum.

Ymiskt er eisini, í hvønn mun og *hvussu* undirstøðukervið hevur týdning fyri eitt øki, tá ið talan er um búseting, fólkatal og vinnulív. T.d. er undirstøðukervið í Suðuroy ógvuliga avgerandi fyri, hvørjar vinnur yvirhøvur kunna yvirliva í økinum og harvið eisini avgerandi fyri, hvat slag av fólki oyggin er før fyri at draga til sín.

Tá ið lívsgrundarlagið hjá fólki er neyvt tongt at vinnulívinum, sum t.d. í Suðuroy, er tað sera umráðandi fyri menningarmøguleikarnar í økinum, at undirstøðukervið er nøktandi.  Av

landafrøðiligum orsøkum er tað ógjørligt hjá fólki at búgva í oynni og arbeiða í t.d. almennu umsitingini í miðstaðarøkinum. Hesi fólk verða í dag noydd at liva av tí vinnulívi, sum tað ber til at reka í oynni[xx].

Hesin veruleiki ger, at vinnulív, fólkatal/búseting og undirstøðukervi í einum tílíkum øki eru nógv neyvari tongd at hvørjum ørðum enn í einum øki, sum kann nýtast sum *bústaðarøki* fyri pendlarar, har lokala vinnulívið ikki er ein beinleiðis fyritreyt fyri livilíkindinum í økinum (dømi: Norðstreymoy).

### Undirstøðukervi og fyrisitingarligar uppgávur

Eitt betri undirstøðukervi kann verða avgerandi fyri samfelagsliga integratión. Um munurin og „fjarstøðan“ millum landspartarnar gerst minni, kunnu landspolitisk mál viðgerast meira óheft av lokalum málum, og menningin kring landið kann fara fram eftir egnum fyritreytum og við atliti til teir møguleikar, ið eru fyri eginmenning.

Verandi almenna fyrisitingin er funktionelt uppbygd, t.e. at hon fyrst er skift sundur í ávísar funktiónir, t.d. almannafyrisiting og skúlafyrisiting, og síðani er hon býtt sundur í øki. Fyrisitingarliga sundurbýtið er merkt av, at vit liva í einum oyggjasamfelag, har sjóvegis samband í stóran mun bindur oyggjarnar saman.

Tess betri sambandið verður, tess betri eru møguleikarnir at gera eina sundurbýtta fyrisiting, har skilt verður millum økis- og landsfyrisiting. Eitt betri undirstøðukervi gevur møguleika fyri meiri skilvísum (rationellum) og fólkaræðiligum (demokratiskum) loysnum, tá ið talan er um almenna fyrisiting. At loysnir eru skilvísar skal ikki skiljast soleiðis, sum tað annars ofta verður gjørt, nevniliga sum meiri miðsavnað fyrisiting, men hinvegin sum ein betri fyrisiting sum er før fyri at skapa skilabestu loysnirnar fyri eitt ávíst nærumhvørvi. Harvið fáa vit eina meira skilvísa fyrisiting - báði landið og borgarin.

### Undirstøðukervi og vinnulívið

Ávikavist manglandi *títtleiki* og manglandi *kapasitetur* eru høvuðstrupulleikarnir hjá stórum pørtum av føroyskum vinnulívi, tá ið talan er um fysiska undirstøðukervið her á landið. Í hvønn mun hesar báðar støðurnar – manglandi títtleiki og/ella manglandi kapasitetur - eru ein trupulleiki veldst um tær lokalu umstøðurnar, og hvat slag av fyritøkum/vinnulívi talan er um. Her veldst m.a. um:

- Hvussu umfatandi samskifti við onnur øki fyritøkurnar hava fyri neyðini
- Hvussu umráðandi stundislig veiting er
- Hvussu stórur partur flutningskostnaðurin er
- Um ferðingin er orsøk til, at møguleikar (potentiali) ikki verða brúktir

Granskarar, ið fáast við samferðsluspurningar, arbeiða við hugtøkunum ’goymd bíðitíð’ og ’ferðingarkostnaður’. Goymd bíðitíð er avlopstíð, sum stavar frá, at tú ert heftur at t.d. einum ferjusambandi, uttan at tú fær brúkt hesa tíðina til nakað. Ferðingarkostnaður er tað, sum ein brúkari er sinnaður at gjalda fyri øktan títtleika ella ’fullan fleksibilitet’. Teir fyrimunir, sum

eitt betri undirstøðukervi beinanvegin gevur einum øki, sum hevur havt trupulleikar við títtleikanum og/ella kapasitetinum, eru í høvuðsheitum:

- Lægri útreiðslur til ferðing/flutning
- Betri samband við viðskiftafólk/marknaðin
- Marknaðurin ella talið á møguligum viðskiftafólki veksur
- Lagaligari atgongd til kunnleikaumhvørvi
- Nýtsla av óroyndum/óbrúktum møguleikum

Við lagaligari ferðasambandi fært tú lutfalsliga fleiri ferðandi í vinnuørindum í mun til samlaða ferðafólkatalið; hetta er serliga galdandi fyri ferðandi frá útjaðaraøkjunum, tí tey eru mest sinnað at gjalda fyri øktan (og/ella fullan) fleksibilitet. Í hesum sambandi er talan um tvey ymisk perspektiv a) plássini uttanfyri miðstaðarøkið, sum útjaðari í føroyskum høpi, og b) Føroyar sum útjaðari í altjóða høpi. Hetta merkir, at fólk í útjaðaranum í Føroyum fáa mesta nyttuvinningin av einum betri infrastrukturi í føroyskum høpi, og føroyingar fáa mest burtur úr einum lagaligari ferðasambandi við útheimin í einum altjóða høpi.

Við ávísum fyrivarni ber til at siga, at búskaparfrøðingar halda, at íløgur í undirstøðukervið yvirhøvur loysa seg fyri samfelagsbúskapin sum heild. Hetta hevur stutt sagt samband við, at tess størri møguleikar kapitalur og arbeiðsmegi hava fyri at flyta seg, tess betri verða tey gagnnýtt. At tað loysir seg fyri samfelagið sum heild sigur tó einki um, hvar í landinum hesin fyrimunur kemur at síggjast best.

Yvirhøvur ber til at siga, at tess betri samband, tess meiri virksemi og størri fólkatal. Royndir vísa, at tað eru øki, sum liggja nær búskaparligum miðdeplum, sum hava størsta vøksturin í fólkatali. Hetta kann eisini vera galdandi, tá ið talan bert er um smærri broytingar í samferðslukervinum (t.d. eina betri ferju, ella øktan títtleika).

Til tess at eitt betri undirstøðukervi við rættiliga stórari vissu skal hava positivan týdning fyri eitt útjaðaraøki, krevst tó í minsta lagi:

- At tað er eitt ávíst vinnuligt grundarlag í útjaðaraøkinum frammanundan.
- At verandi vinna frammanundan hevur tilfeingis-, virkis- og marknaðarmøguleikar, sum ikki kunnu nýtast (fult út) orsakað av avmarkingini í ferðasambandinum til meginøkið.
- At vinnulívið í útjaðaraøkinum er kappingarført (um tað fær henda møguleikan).
- At útjaðaraøkið longu frammanundan hevur ítøkiligar og væl fyrireikaðar ætlanir um, hvussu tað ætlar at fáa gagn av betraða sambandinum.

### Undirstøðukervi og Økismenningarálitið

Í hesum áliti verður tað, sum omanfyri er borið fram, nýtt sum ein grundleggjandi partur av sjálvum ástøðinum (forståelsesrammen), tá ið ítøkiligir spurningar um trupulleikar og møguleikar fyri menning í útjaðaraøkjum verða viðgjørdir.

Í álitinum verða í høvuðsheitum fólkatalsfrøðiligir, trivnaðarligir, vinnuligir og fyrisitingarligir spurningar viðgjørdir, og øll uppskot og allar loysnir eru neyvt knýttar at tí undirstøðukervi, ið bindur okkara oyggjasamfelag saman.

Tá ið Økismenningarálitið leggur upp til ein framtíðar økismenningarpolitikk, verða broytingar í undirstøðukervinum kring landið ein fyritreyt fyri, at hesin politikkur í veruleikanum kann bera til. Ein av høvuðsfyritreytunum fyri einari javnari menning av øllum tí føroyska samfelagnum byggir á, at vit fáa nøkur, men lutfalsliga fá, funktiónell øki, sum m.a. gera, at vit fyristingarliga gerast før fyri at loysa uppgávur á einum hóskandi nærleikastigi. Her er tað ein ófrávíkilig treyt, at øll øki í útjaðaranum hava eina rættiliga ómaksleysa atgongd til hesar stovnar og tænastur annars.

## Elektroniskt undirstøðukervi og nýggir búskaparligir møguleikar

Fjarskifti og kunningartøkni mennast alsamt skjótari um allan heim, og týdningurin, sum hetta hevur fyri búskapin í teimum einstøku londunum, gerst alsamt størri. Búskaparfrøðingar tala beinleiðis um „ein nýggjan búskap“, har vøkstur og framburður eru beinleiðis treytaðir av, hvørjum kunningartøkniligum stigi landið er á. Í hesum sambandi verða fjarskiftistænastur og -kostnaður ofta nevnd sum ein tann mest avgerandi fyritreytin fyri framburði.

Týdningurin av nýggju búskaparmenningini er ikki minni í Føroyum enn aðrastaðni, heldur hinvegin. Fjarskotna støða Føroya ger, at føroyingar fáa serligar fyrimunir av skjótu menningini á fjarskiftisøkinum. Eitt tað besta dømi um hetta er internetið, sum hevur við sær, at týdningurin av fjarstøðu og flutningstíð minkar alsamt. Á sama hátt er einki longur til hindurs fyri, at fyritøkur reka virksemi í Føroyum og nýta arbeiðsmegi úr øðrum londum, ella øvugt, at føroyingar arbeiða fyri útlendskar fyritøkur, hóast teir búgva í Føroyum.

Ein nýggj føroysk fjarskiftislóg setti í 1997 sjøtul á eitt nýtt tíðarskeið á føroyska fjarskiftis-marknaðinum. Føroya Tele varð umskipað frá almennum stovni til partafelag í 1998. Á vári 1999 fekk FT virkisloyvi (konsessión) frá Vinnumálastýrinum til at reka fjarskifti og fjarskiftistænastur. Tað nýggja í hesum er, at eisini aðrar fyritøkur nú hava fingið virkisloyvi og sostatt kunnu kappast við Føroya Tele.

Sum almennur og nógv størstur fjarskiftisútbjóðari í Føroyum hevur Føroya Tele eisini skyldu til at veita øllum Føroya fólki tær grundleggjandi tænasturnar uttan mun til kostnað og fjarstøðu. Henda veitingarskylda hevur ovurstóran týdningi serliga í einum lítlum oyggjasamfelagi, har meirkostnaður av útjaðaraveitingum ikki er til at koma uttanum. Sostatt er heilt greitt, at Føroya Tele spælir ein avgerandi leiklut, tá ið talan er um fjarskiftismenning í øllum landinum - ikki minst tá ið talan er um menning av útjaðaranum.

### Á hvørjum veitingarøkjum hevur Føroya Tele einkarloyvi?

Føroya Tele hevur einkarloyvi til at leggja, hava í hondum og reka alment útvarp, tráðborið fjarskiftiskervi og almenna fjarskiftistænastu. Talan er um eitt *loyvi* og ikki ein einkarrætt.

Virkisloyvið annars fevnir um at veita tænastur á fylgjandi økjum:

1. Innanlands telefonitænastur (íroknað veitan av føstum linjum) o.a.m. veittar á føstum telefonkervi
2. Tekst- og dátasamskiftistænastur
3. Uttanlands telefonitænastur
4. Fylgisveinatænastur
5. Allar virðisskapandi tænastur, íroknað alnet-tænastu
6. NMT450 og NMT900 farfjarskiftistænastur
7. GSM900 farfjarskiftistænastur
8. Frambering av útvarps- og sjónvarpssendingum á fjarskiftiskervi
9. Sjómobilar tænastur (sum ikki eru umfataðar av pkt. 4, 6 og 7.)
10. Møguligar samansetingar av pkt. 1- 9

**Atgongd til tænastu**

Virkisloyvið er galdandi fyri føroyskt land- og sjóøki, fyri skip og flogfør skrásett í Føroyum og frálandavirksemi á landgrunninum. Fjarskiftiseftirlitið kann krevja, at FT tilevnar viðskiftatreytir, soleiðis at ein og hvør felagi undir somu treytum fær atgongd til fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu virkisloyvishavans. Harumframt kann Fjarskiftiseftirlitið krevja broytingar í hesum treytum.

Landsstýrismaðurin kann áleggja virkisloyvishavanum at átaka sær serligar uppgávur, sum kunnu hava við sær, at vanligur vinningur ikki fæst burturúr, ella at tap stendst av hesum. FT kann ikki lata øðrum rættin til at leggja, hava í hondum ella reka alment fjarskiftiskervi ella almenna fjarskiftistænastu á virkisloyvisøkjum, uttan við loyvi frá landsstýrismanninum í samskiftismálum.

**Veitingarskyldan**

Høvuðsendamálið við veitingarskylduni er at tryggja eina javnvág millum marknaðin, sum nú er latin upp fyri kapping (við virkisloyvum og /ella frælsum økjum), øðrumegin og tørvin á at halda megintáttum í fjarskiftistænastuni í einari rímiligari príslegu. Veitingarskylda merkir, at lágmarks-tænasta á einum tilskilaðum góðskustigi verður øllum feløgum atkomulig uttan mun til, hvar teir eru búsettir, og móti einum gjaldi sum er rímiligt eftir umstøðunum.

**Hvat er umfatað av veitingarskylduni?**

Veitingarskyldan fevnir um veiting av teimum fylgjandi fjarskiftistænastunum til allar brúkarir, ið biðja veitingarskylduútbjóðaran um tað:

1. Telefoninet og tilhoyrandi telefonitænastur.
   Við í almenna telefontænastu er tann møguleikin eisini roknaður at kunna senda og taka ímóti faxum og atgongd til lágorkuskjalaflutning, t.d uppringt alnet-samband gjøgnum mótald.

2. ISDN net og tilhoyrandi ISDN tænastur innan 31.12. 2001 (tó við tí fyritreyt at í minsta lagi 10 hava umbiðið tænastuna í ávísari bygd innan 6 mánaðir).

**Rætt til veitingar**

Grundhugsanin er, at allir borgarar hava rætt til veitingarnar, sum veitingarskyldan fevnir um, uttan mun til, hvar teir eru búsettir í landinum. Í verki verða tó ávís undantøk gjørd í mun til hesa meginreglu. Føroya Tele skal játta umsóknum um telefon, um linja er løgd har, sum biðið verður um at fáa telefon. FT skal eisini játta umsóknum um telefon, hóast nýggj linja má leggjast, um ein av niðanfyri nevndu treytum er uppfylt:

a. Umsøkjarin, ið biður um heimatelefon, hevur váttað, at hann hevur fastan bústað har, sum biðið verður um at fáa telefon, og hevur givið fráboðan um, at hann ætlar at verða búgvandi har í minst eitt ár eftir at søkt var um telefon
b. Umsøkjarin, ið biður um telefon til vinnuligt endamál, hevur váttað, at fyritøka hansara er lógliga skrásett har, sum biðið er um at fáa telefon, og hevur givið fráboðan um, at fyritøkan starvar í minst eitt ár.

Hóast hesar ásetingar kann FT kortini havna einari umsókn um telefon, um fjarstøðan frá meginlinju í fjarskiftaneti hansara til umsøkjaran er longri enn 1 km., ella um kostnaðurin verður mettur at verða serliga høgur. Um FT ikki sær seg føran fyri at veita einum og hvørjum veitingarnar eitt nú orsakað av fjarstøðu, kostnaði ella øðrum forðingum, kann viðkomandi leggja ósemju um slíka noktan fyri Fjarskiftiseftirlitið, sum síðani ger úrskurð. Stovnurin skal meta umsóknina við atliti til almannagagns og kann gera av at áleggja virkisloyvishavanum at játta umsóknini.

**Málsetningar og tænastustig**

Í ársfrágreiðingini frá 1999 setir Føroya Tele m.a. hesar málsetningar upp fyri næstu framtíð:

- At betra tænastustigið, tænastudygdina og skjótleikan í báði kundaavgreiðslu og innføring av nýggjum tænastum og tænastumøguleikum
- At betra kappingarførleikan við einum betri og víðkaðum tænastuútboði við lægri prísum
- Við eini langtíðar íløguætlan at fáa til vega størri kapasitet og betri tryggleika í kervinum báði innanlands og út í heim
- At gera støðugar tillagingar av bygnaði felagsins
- At skapa starvsfólkunum betri viðurskifti við miðvísum útbúgvingar- og starvsfólkapolitikki
- At skapa fíggjarlig úrslit, ið tryggja framhaldandi rakstur og íløgur.

Í samrøðu við umboð fyri Føroya Tele kom til sjóndar, at vanligir avgreiðsluspurningar sum fakturering og haldaragjald ikki virka eins væl og FT kundi hugsað sær, eittnú er ikki gjørligt at koyra ymisk haldaragjøld upp á somu rokning hjá einum viðskiftafólki osfr., so tá ið tosað

verður um tænastudygdina í avgreiðslu av viðskiftafólki, eru tað sostatt m.a. hesi viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss.

Tá ið talan er um útboð av tænastum og kappingarførleika, er støðan hjá FT tann, at á føroyska marknaðinum er felagið nógv tað størsta, og hevur felagið eisini betri møguleika at veita eina fjøltáttaða tænastu enn nakar av kappingarneytunum. Fíggjarliga loysir tað seg tó ikki at hava fleiri sertænastur, enn marknaður er fyri, og tískil hevur Føroya Tele hinvegin ikki sama útboð sum fleiri av kappingarneytunum á altjóðamarknaðinum. Hetta er tí, at føroyski marknaðurin er sera lítil í mun til londini kring okkum.

Produktini og loysnirnar, sum Føroya Tele velir at arbeiða við, eru yvirhøvur á altjóðastigi. Hetta tryggjar FT sær við ikki at marknaðarføra eitt produkt, áðrenn altjóðamarknaðurin hevur ”góðkent” tað við at hava brúkt tað í langa tíð (t.e. 1-2 ár). Hetta ger, at FT sjáldan er millum tey fyrstu við einum nýggjum produkti (t.d. ISDN ella ADSL), men hinvegin eru produktini væl ”royndarkoyrd”, áðrenn FT kemur á marknaðin við sínum loysnum. Yvirhøvur er Føroya Tele somikið væl fyri *tøkniliga* at metast má, at felagið er ført fyri at nøkta tørvin hjá øllum virkjum og stovnum í landinum, eisini um brúkarin er uttan fyri miðstaðarøkið. Henda meting varð eisini undirbygd í samrøðu við Føroya Tele, har sagt varð, at um politiskur vilji t.d. var fyri at leggja stórar stovnar og/ella almennar fyritøkur uttan fyri miðstaðarøkið, so var hetta eingin tøkniligur trupulleiki hjá Føroya Tele.

**Framtíðarútlitini innan fjarskiftisviðurskifti**

Í seinnu helvt av 90-árunum byrjaði, sum fyrr sagt, eitt nýtt tíðarskeið á marknaðinum fyri fjarskifti, har fleiri fjarskiftisútbjóðarar fingu virkisloyvi. Hesir kunnu nú kappast við Føroya Tele. Føroya Tele, Fjarskiftiseftirlitið og aðrir fjarskiftisútbjóðarar hava tey seinastu árini nýtt nógva tíð og orku til at fáa í lag avtalur um at nýta fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele, og væntandi er kappingin komandi árini at taka veruligt dik á seg.

Liberaliseringin av fjarskiftismarknaðinum byrjaði í teimum størru evropeisku londunum í 80-árunum, men ofta gingu fleiri ár, áðrenn viðskiftafólkini fingu fleiri veitarar at velja ímillum. Fleiri minni lond, sum Føroyar vanliga samanbera seg við (t.d. Grønland), eru júst farin undir at fyrireika liberalisering av fjarskiftismarknaðinum, so sigast kann, at her eru føroyingar minst á hædd við aðrar, tá ið talan er um at fylgja gongdini á altjóðamarknaðinum.

Føroya Tele hevur brúk fyri góðum fíggjarligum úrslitum til tess at halda sær á einum nøktandi tøkniligum stigi í komandi tíðum og til tess at vera kappingarført mótvegis øðrum útbjóðarum á fjarskiftismarknaðinum. Hetta setir stór krøv til felagið, sum samstundis hevur veitingarskyldu mótvegis øllum viðskiftafólkum - uttan mun til hvar í landinum hesi viðskiftafólk búgva.
Samrøður við umboð fyri Føroya Tele benda á, at ein *privatiseringsloysn* hevði givið Føroya Tele fyrimunir, sum kundu bøtt munandi um framtíðarútlitini hjá felagnum. Ein tílík loysn má tó síggjast í ljósinum av, hvat tað er, ein ætlar at fáa burtur úr eini tílíkari privatisering. Full

greið má eittnú fáast á, um endamálið er t.d. ein *fíggjarliga sterkari* støða fyri felagið ella *betri veitingar* til viðskiftafólk kring *alt landið*.

**Kapping og Økismenning**

Í samrøðu við Økismenningarbólkin hava umboð fyri Føroya Tele mett, at økt kapping á fjarskiftisøkinum væntandi fer at bera í sær, at minni orka framyvir kemur at verða brúkt til útjaðaran. Henda støða kemst av, at Føroya Tele frameftir alt meira má leggja seg eftir at vera kappingarført eftir marknaðartreytum og tískil ikki hevur møguleika at leggja orku í menning av fjarskiftiskervinum í útjaðaranum, sum ofta hevur beinleiðis fíggjarligt tap við sær.

Tað eru fleiri orsakir til at halda, at metingin omanfyri kann gerast veruleiki, og tað verður sera trupult hjá landsins myndugleikum báði at krevja eina umfatandi veitingarskyldu og vanligt búskaparligt kappingarføri av Føroya Tele í komandi tíðum. Tað er og verður ein búskaparlig sannroynd, at um marknaðurin fyri eini vøru og/ella tænastu er sera lítil, sum t.d. 5-10 fólk á eini útoyggj, so gevur tað onga marknaðarbúskaparliga meining at fáast vit eitt tílíkt øki yvirhøvur.

Dømið omanfyri er rímiliga sjálvsagt, men tað eru onnur dømi, ið eru líka sannlík sum tað omanfyri, ið eisini geva ábendingar um, at tað frameftir kann gerast soleiðis, at einans heilt fáa øki í landinum verða áhugaverd hjá fjarskiftisútbjóðarum. Um vit taka núverandi ’heildarkervi’ hjá Føroya Tele (sí mynd), so eru nakrir ’økis-deplar’ settir upp kring landið. Um viðskiftafólk er meira enn eina ávísa fjarstøðu frá tí næsta deplinum, føra veitingar við sær meirkostnað fyri fjarskiftis-útbjóðaran og/ella viðskiftafólkið. ISDN kann t.d. ikki takast beinleiðis frá einum depli, um fjarstøðan er longri enn 6-7 km. Í fleiri førum gerst meirkostnaðurin av fjarstøðuni so stórur, at eingin veiting kemur upp á tal, og kemur hetta sjálvsagt serliga fyri í útjaðaraøkjum, har viðskiftafólkini eru fá.

Um fjarskiftisútbjóðarar ikki hava veitingarskyldu til øki, ið liggja longri enn nakrar heilt fáar kilometrar frá høvuðsnetinum, er trupult at ímynda, sær hvussu útjaðarin yvirhøvur skal koma við í komandi samfelagsliga menning, sum í stóran mun kemur at byggja á møguleikar í sambandi við tað nýggja sam- og fjarskiftissamfelagið. Eitt annað, sum ger støðuna enn verri, er, at tær nýggju vinnugreinarnar og teir nýggju búskaparligu møguleikarnir yvirhøvur, aloftast eru neyvt tongdir at fjarskiftiskervinum og teimum møguleikum, sum hanga uppivið tí.

At húsa komandi undirvísingarháttum og t.d. eini oljuvinnuna kemur at krevja munandi meiri av fjarskiftiskervinum kring landið, enn kervið er ført fyri at veita í dag. Hesin veruleikin ger, at útjaðarin, um hann ikki politiskt verður raðfestur høgt, enn einaferð kemur at tapa í spælinum um fólksliga, fólkaræðiliga og búskaparliga menning her á landi.

## Styrkt útjaðaraøki

Í Útbúgvingarálitinum frá 1999 stendur ein orðing á síðu 16, sum Økismenningarbólkurin tekur fult undir við. Upprunaliga er henda orðing skrivað í sambandi við skúla- og granskingarviðurskifti, men eru hesi orð eins viðkomandi í einum meira almennum samanhangi, har tann einstaki samfelagsborgarin verður settur í miðdepilin.

Endamálið er at geva øllum í Føroyum bestu møguleikar at mennast persónliga og til at liva í einum fólkaræðiligum og livandi samfelag, sum alla tíðina er ført fyri at laga seg eftir broyttum umstøðum og nýggjum møguleikum og samstundis at styrkja føroyska samleikan

- At bjóða øllum møguleika at útbúgva seg og á jøvnum føti menna síni verkligu, bókligu og skapandi evni alt lívið
- At skapa eitt vitanarstøði í samfelagnum, sum almenningurin, myndugleikar og vinnulív kunnu nýta sum grundalag undir skilagóðum avgerðum, sum tryggja varandi loysnir
- At skipa fyri góðum sambandi millum skúlar, útbúgvingarstovnar, almenning og vinnulív
- At skapa øktar møguleikar hjá vinnulívinum við at byggja upp gransking og førleika á nýggjum økjum, sum kunnu verða støði undir einum meira fjøltáttaðum føroyskum vinnulívi
- Í stuttum at skapa góðar og mennandi karmar um útbúgving, menning og gransking, so vit fáa sum mest burtur úr størsta tilfeingi Føroya: viti og áræði fólksins.

Málsetningurin omanfyri byggir á sunnan burðardyggan og fólkaræðiligan hugburð. Fyrsti setningurin ”Endamálið er at geva øllum í Føroyum bestu møguleikar at mennast persónliga og til at liva í einum demokratiskum og livandi samfelag, sum alla tíðina er ført fyri at laga seg til broyttar umstøður og nýggjar møguleikar og samstundis styrkja føroyska samleikan” er heilt greitt ein málsetningur, sum verdur er at taka til eftirtektar – spurningurin er bara, hvussu letur tað seg gera at fylgja hesum vísdómsorðum.

**Tillaging til broyttar umstøður**

Latið okkum byrjað við brotinum ”…sum alla tíðina er ført fyri at laga seg til broyttar umstøður og nýggjar møguleikar”. Her er eyðsýnt at hugsanarhátturin er tann, at samfelagið ikki stendur í stað, men er fyri støðugari broyting. Tað er eingin ivi um, at vit, sum skulu leggja framtíðarætlanir fyri samfelagsmenning yvirhøvur, verða noydd at taka støði í tí veruleika, at samfelagið ikki er ’statiskt’ (t.e. stendur stilt), men alla tíðina er í broyting.

Hvørjar eru so tær broytingar, sum okkara samfelag í dag stendur fyri? Hvussu stórar hesar samfelagsligu avbjóðingar, sum standa fyri durum, veruliga eru, geva høvuðspunktini niðanfyri eina greiða ábending um (tilvildarlig raðfylgja):

- Altjóðagerð

- Rationaliseringsrákið yvirhøvur
- Privatiseringin av almennum ognum
- Partabrævamarknaður
- Kunningarsamfelagið
- Fullveldistilgongdin
- Oljuvinnan
- Burðardygg náttúru- og umhvørvisrøkt

Tá ið hugt verður at avbjóðingunum omanfyri, gerst tað sjálvsagt, at tað er ábyrgdarleyst ikki at taka hesar broytingar í fullum álvara, tí einki er at taka seg aftur í, at hesi rák - og hesar broytingar - koma at fáa avgerandi týdning fyri livilíkindini hjá flestøllum føroyingum - uttan mun til, hvar í landinum, teir búgva.

**Persónlig menning og eitt fólkaræðiligt samfelag**

Latið okkum síðani taka fyrsta partin av málsetninginum: ”Endamálið er at geva øllum í Føroyum bestu møguleikar at mennast persónliga og til at liva í einum demokratiskum og livandi samfelag..”. Her er talan um veruliga stór orð, sum tó altíð eiga at vera fremst í huga, tá ið talan er um samfelagsliga menning av einum fólkaræðiligum samfelag. Vit eiga ikki og skulu heldur ikki lata okkum tøla av tí veruleika, at her er talan um ein málsetning og eina avbjóðing, sum samfelagsskipanin neyvan nakrantíð kemur á mál við – hinvegin skal hetta vera ”leiðarstjørnan á himni”, sum vit til alla tíðina eiga at miða okkum eftir[xxi].

**Føroysk mentan og samleiki**

Taka við seinasta partin av málsetninginum ”…og samstundis styrkja føroyska samleikan”, er her talan um grundleggjandi fyritreytina fyri, at vit føroyingar yvirhøvur kenna okkum sum eitt fólk og tjóð. Tað er eingin ivi um, at árinini frá m.a. altjóðagerðini og eini komandi oljuvinnu fara at verða ein avgerandi avbjóðing fyri okkara føroyska samleika.

Í komandi tíðum fer føroysk fólkamentan at koma undir trýst uttanifrá sum sjáldan fyrr og fer at broytast eins og at kalla øll onnur føroysk samfelagsviðurskifti. Alt hongur saman: Tað er ógjørligt at skilja vinnupartin og tann búskaparliga partin frá tí mentanarliga partinum av samfelagnum. Stýrir tú ikki landinum soleiðis, at tú allatíðina stimbrar eina felagskenslu millum føroyinga, so kanst tú heldur ikki vænta, at úrslitið verður ein felags mentan og ein felags føroyskur samleiki

Mentanin og samleikin eru sostatt treytað av, hvussu samfelagið annars verður skipað, og verður samfelagið skipað soleiðis, at t.d. útjaðarin als ikki megnar at fylgja við vakstrarøkjunum, so verður støðan tann, at samfelagið tá verður enn meiri spjatt, og tað fer at hava við sær, at kenslan av at vera føroyingur ikki verður sama felagskensla millum allar føroyingar, men hinvegin ein samleiki, ið er treytaður av, hvar borgarin býr í landinum. Tískil er økismenning heldur ikki bara ein búskaparligur spurningur, men ein fyritreyt fyri, at vit eisini frameftir kunnu tosa um hugtøkini føroyska mentan og føroyskan samleika.

**Búskaparliga rákið**
Báði herheima og á altjóðastigi er gongdin tann, at tað verður munandi truplari at draga til sín íløgur, nýggj arbeiðspláss og búskaparligan vøkstur. Rákið er heilt greitt: Tað virksemi, sum ikki loysir seg búskaparliga eftir vanligum marknaðartreytum (og hesar gerast alsamt harðari), fer ongantíð at gerast veruleiki.

Tíðin, tá ið pláss var fyri patriotismu osfr., er farin, og frameftir verða tað tey øki, sum eru áhugaverd búskaparliga, sum fara at merkja vøkstur og framburð. Og í teimum økjum, sum ikki eru kappingarfør eftir marknaðartreytum, verða frameftir enn færri framtíðaríløgur gjørdar.

Rákið ber í sær, at um vit vilja varðveita búseting á øllum oyggjum, so er ein politikkur neyðugur, sum ger, at tað eisini búskaparliga er áhugavert at fáast við øki fyri vestan, norðan og sunnan í Føroyum - ikki minst tá ið hugsað verður um eina møguliga privatisering av ’lyklafyritøkum’, sum Føroya Tele, Strandfaraskipum Landsins og Postverki Føroya.

Støðan er broytt og leiklutirnir verða – so at siga – settir av nýggjum. Tann ”politiska dimensiónin”, har íløgur ofta ikki vórðu gjørdar, tí at tað loysti seg, men meiri sum ein avleiðing av nøkrum samfelagsligum valdsskipanum, er ikki longur so avgerandi fyri íløgumøguleikarnar hjá teimum ymsu pørtunum av landinum. Tískil er tað í dag sera umráðandi hjá einum og hvørjum øki í landinum at áhaldandi at leita sær nýggjan kunnleika fyri at skapa sær sín egna leiklut í tí ’nýggju’ samfelagsskipanini.

**Miðvís langtíðarætlan**
Økini hava, hvørt í sínum lagi, brúk fyri eini ambitión (t.e. eini strategi/ætlan um, hvussu øki ætlar sær at vinna í dystinum um framtíðaríløgur og arbeiðspláss, sum er grundalagið undir framtíðar trivnaði á plássinum), ið skal byggja á eina langtíðarætlan fyri, hvønn leiklut økið ætlar sær. Her gerst tað ein avgerandi avbjóðing at staðfesta egnan strategiskan leiklut í mun til umheimin. Í hesum samanhangi er tað er sera umráðandi, at økini, hvørt í sínum lagi, byggja framtíðarætlanir á núverandi førleika í nærumhvørvinum.

Ein miðvís satsing er neyðug, og einki lokalt øki kann gera sær vónir um framburð og menning, um henda tilgongd ikki byggir á núverandi førleika og fyritreytir, og sostatt er spurningurin greiður: Hvat duga vit lokalt sum umheimurin (t.e. øll frá granna til fjarskotnasta marknaðin í heiminum) hevur tørv á? Tørvurin á eini langtíðarætlan, sum byggir á tilvitað val og ætlanir, verður eisini undirstrikaður av tí veruleika, at í flestøllum økjum í landinum eru núverandi vinnusamanseting og førleiki beinleiðis knýttur at meiri ella minni ”tilvildarligum” viðurskiftum, sum t.d. hvørji virki Fiskavirking valdi at lata aftur og hvørji ikki.

**Grundarlag fyri menning**
Grundarlagið fyri menning í einum og hvørjum øki er og skal verða núverandi lokal viðurskifti, sum t.d. landafrøðilig støða, ’image’, undirstøðukervi, útbúgvingartstigið hjá arbeiðsstyrkini, kommunala tænastustigið, vinnusamansetingin, serligur vinnuførleiki og teir útbúgvingarstovnar, sum møguliga eru í økinum.

Tað er ein innlýsandi lokalur veikleiki, um støðan í einum øki er soleiðis, at undirstøðukervið ikki er viðlíkahildið og/ella yvirhøvur ikki er nøktandi fyri virksemið í økinum (eisini møguligt. virksemi). Í hvønn mun eitt lokalt øki er ”tyngt” av vinnugreinum, sum eru í miðvísari afturgongd (”solnedgangs-industrier”), er avgerandi fyri menningarmøguleikarnar í økinum - serliga í stutttíðar høpi.

Skeivur hugburður og snævurskygni eru helst størsta forðingin fyri eini menning, har lokalsamfelagið miðvíst sjálvt arbeiðir við at staðfesta sær leiklutin í framtíðarsamfelagnum, men tað er eingin vegur uttan um eina miðvísa tillaging til núverandi og komandi viðurskifti, um eitt lokalt øki skal gera sær nakrar vónir um búskaparligan framburð í komandi tíðum.

**Skattainntøkur og almenna tænastustigið**
Fleiri skattainntøkur skapa møguleika fyri einum hægri almennum tænastustigi, og hetta fer – alt annars eins – at gera tað meira liviligt í einum øki. Somuleiðis eru fleiri skattainntøkur fyritreytin fyri at skapa røttu karmarnar um vinnuligt virksemi, og má hesin veruleiki verða grundalagið undir umrøðuni av framtíðar vinnu- og búskaparmenning kring landið.

Um eitt øki (kommuna) ikki er ført fyri at draga fólk til sín, kann hetta fáa stórar avleiðingar fyri inntøkugrundarlagið og harvið eisini skattainntøkurnar hjá kommununi. Á henda hátt kemur økið í eina ”ónda ringrás”, sum førir við sær, at tað verður sera trupult at hækka almenna tænastustigið í økinum.

Almenna tænastustigið fær alt størri týdning fyri menningarmøguleikarnar hjá einum øki, tí hetta er eitt tað fyrsta, ið hugt verður eftir, tá ið avgerð skal takast um at seta búgv, ella hvar eitt virki skal leggjast. Í sambandi við búseting er tað at siga, at eitt lágt tænastustig í sambandi við t.d. barnaansing førir við sær, at barnafamiljur – alt annars eins - vraka økið, tá ið avgerðin um hvar húskið skal búsetast, verður tikin.

**Búsetingarmynstrið**
Báði viðvíkjandi búseting og arbeiði eru barnafamiljurnar millum tær mest mobilu. Serliga tá ið talan er um familjur við børnum undir skúlaaldri. Hesar familjur hava ofta ikki tikið endaliga støðu til búsetingarspurningin, men búsetast ofta, har sum tey ”samanlagt” kunnu fáa mest burturúr. Av somu orsøk verður spurningurin um barnaansing ofta avgerandi, báði tá ið talan er um ansingarmøguleikar yvirhøvur og kostnað.

Hjá barnafamiljum eru útreiðslurnar til barnaansing millum tær størstu yvirhøvur. Kanningar vísa eisini, at barnaansingin er millum tey øki, sum serligur dentur verður lagdur á, tá ið talað verður um kommunala tænastustigið í *kommunalum* høpi. Eldrarøktin er hinvegin eitt "tvíeggjað svørð“: Samstundis sum góð viðurskifti á hesum øki uttan iva er við til at gera eitt øki meiri áhugavert sum búsetingarpláss, er sama støða við til at økja munandi um útreiðslurnar í eini kommunu, og harvið verður eisini størri trýst á skattaprosentinum í økinum.

Búsetingarmynstrið er eisini avgerandi, tá ið vinnulívið ger íløgur. Økti eftirspurningurin eftir tí ”røttu” arbeiðsmegini ger, at fyritøkur alt meiri síggja tað kommunala tænastustigið, sum *eitt parametur* fyri, hvussu áhugavert eitt ávíst øki er í sambandi við ætlaðar íløgur.

Í ávísum økjum er búsetingin tó *meiri avgerandi* enn at draga til sín íløgur til vinnulív. Henda støða er galdandi, tá ið fólk hava møguleika at *pendla* til og frá arbeiði.

**Nýggjar búsetingar - útjaðarin hevur trupulleikar við at draga fólk til sín**

***Ein stutt søga um, hvat man skal kunnað lesa burtur úr álitinum***
Per (28 ár) og Ása (27 ár) búgva í Næstved og eiga 2 børn, Onnu (5 ár) og Niklas (12 ár). Per er upprunaliga Heiman av Sandi og Ása er úr Porkeri. Per hevur eftir lokna útbúgving arbeitt á kommunuskrivsstovuni í Næstved, og Ása hevur arbeitt á eini verksmiðju í Næstved.

Í desember 2000 fær Per boðið starv sum kommunustjóri á Heima á Sandi - og í sambandi við hetta ger hann sær nakrar tankar, áðrenn hann tekur endaliga avgerð.

*Per hugsar:*

| | |
|---|---|
| *Fólkatalsfrøði* | Sum so hevði tað verðið gott at flutt aftur Heim á Sand til familju og vinfólk. Men tey flestu í hansara aldursbólki eru flutt, sum hann eisini sær í aldurs-pyramiduni fyri Sandoyar sýslu. |
| *Fólkatalsfrøði og Vinnuviðurskifti* | Hvat arbeiði viðvíkur, hevði tað tó ikki verðið so galið, tí Ása kundi arbeitt á flakavirkinum, sum er farið ígongdaftur. Men um arbeiðið hjá Peri er at siga, at fólkatalið er minkað teir 10 fyrstu mánaðirnar í ár, so spurningurin er, hvussu leingi tað verður tørvur á einum kommunustjóri - nú tað verða færri og færri fólk Heima á Sandi |
| *Arbeiðsmarknaðar-viðurskifti og Kostnaðarstig* | Hóast lønarinntøkurnar hjá Peri og Ásu vera oman fyri miðal, er kommunuskattaprosentið Heima á Sandi høgt, og tað minkar helst ikki tey fyrstu árini orsakað av tí stóru kommunuskuldini. Hinvegin eru húsini væl ódýrari enn í t.d. Tórshavn, so tað er ein greiður fyrimunur. |
| *Trivnaðarfyritreytir* | Harumframt er tað eingi trupulleiki at fáa ansingarpláss til Onnu, sum tað er í t.d. Tórshavn. Niklas má hinvegin halda uppat at spæla hondbólt, tí eingin tróttarhøll er í Sandoy. Fótbólt dámar honum ikki, so tað verður |

einki serligt.

*Undirstøðukervi*

Í arbeiðinum sínum kemur Per at ferðast nógv til Tórshavnar. Nýggi Teistin, ið fer í sigling í apríl - mei mánaði, kemur væl við, tí Per er sera ringur av sjóverki, og um tað tekur ov langa tíð at sigla verður tað heilt galið.
Av somu orsøk verður neyvan farið oftani at vitja verforeldrini í Porkeri, tí tá mugu tey umvegis Tórshavn og so sigla 2 tímar og 15 minuttir við Smyrli til Suðuroyar afturat tí. Hetta fer Ása at halda vera øguliga keðiligt, nú tey fara at vera so fáar kilometrar frá foreldrum hennara. Hevði man bara kunnað siglt Heiman av Sandi suður til Hvalbiar, hugsar Per, tað er jú eitt hanagleiv.

Per og Ása umhugsa støðuna og velja at bíða til eftir jól at taka endaliga støðu.

Meðan Per og Ása eru heima á jólum, sær Per, at Runavíkar Kommuna eisini søkir eftir kommunustjóra. Stutt hugsar Per, at tað verða stórar avbjóðingar fyri framman í Runavíkar Kommunu, tí fólkatalið veksur jú heilt skjótt. Og tað verður neyvan nakar trupulleiki hjá Ásu at fáa arbeiði, tí stór vinnulig menning er í økinum. Børnunum báðum verður heldur ongin trupulleiki við, tí enn eru nøkur leys barnaansingarpláss - og ítróttarhøll eru jú í Runavík. Harumframt kann koyrast til Havnar, men tað eru enn 2 tímar og 15 minuttir til Suðuroyar, so verforeldrini verða neyvan vitjað oftani.

Í januarmánaði søkir Per arbeiði í Runavíkar Kommunu - og Per og Ása flyta til Runavíkar í mars.

## Styrkt útjaðaraøki – einar sterkari Føroyar

Er politiski viljin á Føroya Løgtingi tann, at útjaðarin eisini skal verða við í eini framtíðarmenning av føroyska samfelagnum, er tað ikki nøktandi at lata onkra hendinga krónu til einstakar verkætlanir ella at flyta onkran skúla út á bygd. Veruleikin er tann, at uttan munandi nýhugsan verður útjaðarin ikki førur fyri at gerast partur í eini komandi samfelagsmenning, sum setir sera stór krøv til tann einstaka samfelagsborgaran.

Í dag verður talað um eitt nýtt fyrisitingarligt býti millum land og kommunur. Henda nýhugsan tykist byggja á eina staðfesting av, at eitt meira hóskandi *ábyrgdarbýti* má finnast millum mál, sum skulu loysast sentralt, og tey sum eiga at verða loyst lokalt. Hetta er m.a. neyðugt, fyri at optimalar loysnir eisini kunnu finnast á spurningum, sum eru neyvt knýttir at ávísum lokaløki.

Økismenningarbólkurin tekur fult undir við hesui grundhugsan, men neyðygt er at eitt tílíkt nýbýti samstundis byggir á eina broyting av verandi fyrisiting, sum er funktionelt uppbygd, t.e. at hon er fyrst skift sundur í ávísar funktiónir og síðani í øki. Í framtíðini mugu vit fáa eina

skipan, har økini koma fyrst og síðani funktiónirnar, soleiðis at dagliga fyrisitingin verður kring landið, men høvuðssamskipanar- og eftirlitsfunktiónir verða varðveittar sentralt.

Ein grundleggjand staðfesting er tann, at fyritreytir eru altavgerandi. Tað er neyðugt at teingja hugtakið *fyritreytir* upp í alt kjak um desentralisering av ábyrgd og fyrisiting. Tað gevur t.d. onga meining at tosa um at *skapa karmar* fyri trivnaði, útbúgving og vinnulívi, um kommunurnar samstundis eru bundnar á hond og fót av stórari kommunuskuld. Tað gevur heldur onga meining at loyva lítlum kommunum at gera, sum tær vilja, um eingin peningur er at gera nakað fyri orsakað av lítlari og ongari kommunalari skattainntøku. Alt tos um, at fyrisitingarligar uppgávur skulu leggjast út, er sostatt treytað av eini skipan, sum ger tað gjørligt hjá økjunum til fulnar at taka við hesi ábyrgd.

**Orka og førleiki**

Til tess at skapa fyritreytir fyri eini skipan, har avgerðir verða tiknar á einum hóskandi *nærleikastigi*, leggur Økismenningarbólkurin upp til, at Føroyar fyrisitingarliga verða býttar sundur í 3 ymisk nærleikastig. Hesi eru ávikavist *land, øki og kommunur*. Hesin bygnaður er væl kendur í londunum kring okkum. Í Noregi verða tílíkar eindir nevndar 'fylki', í Danmørk verða hesar eindir kallaðar 'amt'. Í Bretlandi kann henda skipan best samanberast við 'counties' og/ella stór-kommunur.

Felags fyri dømini omanfyri er, at talan er um eina fyrisitingarliga skipan, har tørvur er á munandi orku og førleika. Í londunum kring okkum er tað soleiðis, at hesar eindir hava fyrisitingarligu ábyrgdina av størri uppgávum (t.d. sjúkrahúsverkinum í DK). Her er talan um uppgávur, sum eru ov tungar at leggja á kommunalt stig, men hinvegin eru her ofta lokal viðurskifti galdandi, sum gera at tað ikki er nøktandi, at landið sentralt tekur sær av hesum uppgávum (smb. spurninginum um hóskandi nærleikastig).

'Umhvørvi' – í einum sera breiðum týdningi – krevst fyri at fáa fólk við góðari útbúgving at støðast uttan fyri miðstaðarøkið. Nýggja skipanin við størri felagsfyrisitingum kring landið er ein av fyritreytinum fyri yvirhøvur at kunna fáa skapt tílík 'umhvørvi' í útjaðaranum. Eitt betri lokalt umhvørvi fer at draga fólk við góðari útbúgving til sín, og júst hesi fólkini kunnu verða við til at styrkja umhvørvið í útjaðaranum enn meiri. Hervið verður ein 'ónd ringrás' brotin, og ein góð skapt.

## Bygnaður fyri felagsfyrisitingarnar:

<u>Felagsráðið</u>

Hetta er eitt ráð, ið er samansett av øllum borgarstjórunum í tí økinum, sum talan er um. Tað vil siga, at í felagsráðnum fyri eitt nú Vesturøkið sita borgarstjórarnir fyri kommunurnar í Vágum, Vestmanna og Kvívík. Borgarstjórarnir, sum umboða kommunurnar, fáa hervið eitt 'felags-forum', har avgerðir, sum hava týdning fyri alt økið, verða tiknar.

Borgarstjórarnir eru í dag løntir eftir eini skipan, har smáar kommunur hava borgarstjórar, sum eru løntir hálva tíð, og størri bygdir og býir hava borgarstjórar við fullari løn. At hesi fólk í dag sostatt hava veruligan møguleika at arbeiða við álvarsmálum, sum hava týdning fyri økini, skuldi eisini styrkt felagsráðini munandi.

Umboðsnevndir
Hesar umboðsnevndir verða býttar sundur í málsøki, sum t.d. sosiala nevnd, mentanarnevnd, heilsu- og umhvørvisnevnd osfr. Í hesum nevndum sita formenninir í kommunalu nevndunum, sum longu eru í tí núverandi kommunalu skipanini. Hetta førir við sær, at nevndarformenninir fyri eittnú Tvøroyrar- og Vágs kommunur *í felag* mugu finna fram til, hvussu m.a. havna- og skúlaviðurskifti á bestan hátt kunnu skipast fyri *alt* suðurøkið. Tílíkar umboðsnevndir, har ábyrgdin og avgerðarrætturin gerst eitt felagsmál, stimbra eina tilgongd, har burðardyggar avgerðir, sum gagna øllum økinum, verða raðfestar høgt.

Felagsumsitingin
Felagsfyrisitingin kann verða bygd upp soleiðis, at tey, sum í dag arbeiða hjá kommununum, verða 'flutt yvir' í økisfyrisitingina. Eftir hesum leisti verður sostatt ikki í fyrstu atløgu talan um munandi sparingar í starvsfólkakostnaði, men hinvegin verður fyrisitingin heldur ikki darvað av einum tíðarskeiði, har umsitingin skal seta eina rúgvu av nýggjum starvsfólkum inn í lokal viðurskifti.

Eftir at tann nýggja fyristingin hevur fótað sær, kemur hetta sjálvandi at føra til broytingar, tí at uppgávurnar koma líðandi at broytast. Eftirspurningur verður eftir fakfólki, sum skulu taka sær av nýggju uppgávunum hjá felagsfyrisitingini, og kemur hetta at føra til eina heilt aðra samanseting av starvsfólki, enn ta vit kenna frá kommunalari umsiting í dag.

## Uppskot um sundurbýti av felagsfyrisitingum:

**Norðara Felagsfyrisiting: Norðoyggjar**
(pr. 31.10.2000: 5.921 fólk = uml.13%)

**Eystara Felagsfyrisiting: Eysturoy**
*(+ møg. Eystursíðuna av  Norðstreymoy, t.e. Haldórsvík, Langasand osfr.)*
(fólkatal: 10.153 = uml.22% - áðrenn tað sum stendur í klombrum)

**Miðstaðar Felagsfyrisitingin: Streymoy, tó ikki Vestmanna og Kvívík**
*(-møg. Eystursíðuna av Norðstreymoy, t.e. Haldórsvík, Langasand osfr.)*
(fólkatal: 19.083 = uml.41,5% - áðrenn tað sum stendur í klombrum)

**Vestara Felagsfyrisiting: Vágar, Vestmanna og Kvívík**
(fólkatal: 4.441 = uml.9,5%)

**Sunnara Felagsfyrisiting: Suðuroy og Sandoy**
(fólkatal: 6.416 = uml.14%)



Mynd-1 : uppskot a) um sundurbýtið

**Hví størri felagsfyrisitingar?**

Endamálið við at skapa lutfalsliga stórar felagsfyrisitingar fyri tey ymisku økini byggir á nakrar staðfestingar og grundleggjandi niðurstøður, sum Økismenningarbólkurin er komin til, og eru hesar í høvuðsheitum, at eingin burðardygg økismenning gerst veruleiki uttan:

At útjaðarin verður styrktur munandi, soleiðis at fyrisiting, ábyrgd og avgerðarrættur á t.d. týdningarmiklum trivnaðarøkjum verða lokal mál (t.e. verða loyst í økjum)

At meiri fleksiblar og hóskandi loysnir verða settar í verk kring landið, soleiðis at til ber at krevja somu viðurskifti galdandi í Tórshavn, Klaksvík og Fámjin innan t.d. barnaansing
At økini fáa nóg mikið av fyrisitingarligum uppgávum, soleiðis at 'lyklafunktiónir' sum fjarskifti, samferðsla, postflutningur o.a. loysa seg eftir *marknaðarbúskaparligum treytum* kring alt landið.

**Høvuðsmál hjá Felagsfyrisitingini**
Sterkar felagsfyrisitingar er tað sama sum ein sterkari útjaðari, og ein sterkari útjaðari er einar sterkari Føroyar. Uttan á nakran hátt endaliga at staðfesta hvørji málsøki skulu loysast av eini komandi felagsfyrisiting, gevur listin niðanfyri eina greiða ábending um, hvørji málsøki skulu umhugsast sum partur av eini neyðugari miðspjaðing av fyrisitingar- og ábyrgdarøkjum:

- Almanna- og heilsumál
- Onnur sosialmál
- Undirvísingarmál
- Onnur mentanarmál
- Umhvørvis- og trygdarmál
- Vinnumál

Uppgávur hjá Felagsfyrisitingini - dømi: Sosialfyrisiting (íroknað sosiala nevnd), barnavernd, skúlaverkið (íroknað skúlastýri), barnagarðar, vøggustovur, dagrøktarskipanir, sjúkrahús (møg.?), heilsumiðstøðir, kommunulæknar, heilsusystrar, skúlaheilsusystrar, tannlæknar, ljósmøður, ellisheim, røktarheim, eldrasambýli, umlættingarheim, heimarøkt, vardir verkstaðir, dagtilhald osfr.
(Í heild: lutfalsliga strategiskar/politiskar uppgávur)

Uppgávur hjá kommunum - dømi: Kommunuskattur, býarskipan (íroknaðir kommunalir vegir), vatnveiting til sethús, rottangaskipan, spillivatnsleiðing, kirkjugarðar, hegnsýnisnevnd, ”leysir hundar”, rottutýning osfr.
(Í heild: lutfalsliga konkretar/praktiskar uppgávur)

## Samanumtikið

Í einum øki er ofta eitt landafrøðiligt býti millum býir/størri bygdir og tær smáu bygdirnar í sambandi við t.d. arbeiðspláss, skúla og heilsutilboð. Í Suðuroy eru Vágur og Tvøroyri t.d. miðdeplar fyri bygdirnar í ávikavist norðaru og sunnaru helvt, og í Eysturoy kann sigast tað sama um Runarvíkarøkið í mun til fleiri av bygdunum nærhendis Skálafirði. Økisloysnir skulu hjálpa upp á felags økistrupulleikar og/ella felagsuppgávur/avbjóðingar.

Skipanin við felagsfyrisitingum kring landið kann báði gerast ”glíðandi”, har m.a. núverandi kommunuskipan verður varðveitt, og sum ein partur av einum nýggjum býti millum ta sentralu fyrisitingina og økini kring landið, har eisini sjálv kommunuskipanin verður broytt

samstundis. Økismenningarbólkurin metir ikki, at tað er innan fyri arbeiðssetningin hjá hesum bólki at viðgera t.d. kommunusamanlegging.

Uttan mun til kommunusamanlegging skal tó her staðfestast, at tað hevur alstóran týdning at fáa størri fyrisitingarligar eindir kring landið, um vit vilja at føroyska samfelagið *í felag* skal mennast komandi árini. Privatiseringin av samfelagsligum lyklafunktiónum, sum t.d. fjarskifti og samferðslu, oljuvinnan, fjarskiftissamfelagið og altjóðagerðin – øll hesi viðurskifti krevja, at vitan, ábyrgd og avgerðarrættur verða ein nattúrligur partur av at liva og virka í útjaðaranum. Hesum slepst ikki undan, um livilíkindi eisini frameftir skulu verða kring alt Føroya land.

Tað er avgerandi fyri skipanina við størri eindum, at tað ikki verður talan um ”eitt lið afturat” í føroyskari fyrisiting. Skipanin skal leggjast soleiðis tilrættis at Felagsfyrisitingarnar fáa uppgávur og ábyrgd frá bæði núverandi sentral – og kommunalfyrisiting. Heldur enn at leggja eitt lag afturat føroyskari fyrisiting skal nýggja skipanin taka tvey løg burtur. Sum sagt eigur kommunala umsitingin framyvir at taka sær av ítøkiligum *lokalum* spurningum. Hinvegin skal landsmynduleikin hava eftirlitsfunktiónina, og syrgja fyri at fyrisitingarligar uppgávur verða loystar til lítar kring landið av Felagsfyrisitinginum.

---

[i] Sí Appendix I fyri fyritreytir fyri framrokningunum.

[ii] Í viðgerðini av teimum ymisku økjunum verða fyritreytirnar fyri gongdini í teimum einstøku økjunum viðgjørdar.

[iii] Sí vinnu- og arbeiðsmarknaðarpartin.

[iv] Undantikið Tórshavn

[v] Dagrøktarskipanin nøktar tørvin sum er, tó at tað er ein lítil bíðilisti á barnagarðinum á Tvøroyri.

[vi] Undantikið Tórshavn

[vii] Eins og víst í Talvu 3.

[viii] Undantikið Tórshavn

[ix] Undantikið Tórshavn

[x] Undantikið Tórshavn

[xi] Undantikið Tórshavn

[xii] Ein ’pendlari’ er ein, ið býr í einari kommunu og ferðast til eina aðra kommuna at arbeiða; t.d er búsetandi í Hvalvík, men arbeiðir í Tórshavn.

[xiii] 1. Januar 2001 gerst Kollafjørður partur av Tórshavnar Kommunu.

[xiv] Undantikið Tórshavn

[xv] Undantikið Tórshavn

[xvi] Undantikið Tórshavn

[xvii] Undantikið Tórshavn

[xviii] Undantikið Tórshavn

[xix] Undantikið Tórshavn

[xx] Um vinnulívið ikki breyðføðir tey lokalu, verða hesi til byrði hjá ávikavíst Almannastovuni og ALS

[xxi] Hóast hetta orðalag kann tykjast heldur ”háfloygt”, so er hetta ikki annað enn vanligt er at seta í hvørt samgonguskjal, bara við ymiskum orðingum frá skjali til skjal.